| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>17. september 2026 | Blað nr.: 906 |
| | Forkvinnunnar merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 17. september 2026 **Kl**. 16:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr:** 240/26-268/26

**FUNDARLEIÐARI:**
Elsa Berg

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Heidi Lava Elgeirsdóttir
Annita á Fríðriksmørk
Anja Weyhe
Kristianna Winther Poulsen
Bergur Robert Dam Jensen
Guttormur í Skála
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Høgni Vilhelmsen
Birgir Nielsen

**LUTTÓKU EISINI:**
Eyðfríð Jacobsen
Fríður P. Dalsgarð
Hermann Mortensen
David Andresen
Jeanette Ellefsen Blaasvær
Janus Haraldsen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Jóan Petur Hentze

**PROTOKOLLFØRARI:**
Olga Knudsen/Anna Brekku Havmand

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 240/26 | 26/00448-1 | Mál beind í nevndir 2026 | 909 |
| 241/26 | 25/00338-1 | Útboð av útbygging av Býlingshúsinum Vesturi á Flat - 19/00411 | 911 |
| 242/26 | 25/05863-1 | Reinsiverk til vinnuútstykking á Ovara Hjalla - 22/01377 | 913 |
| 243/26 | 26/00599-1 | Fjarhiti til útstykkingina Stórutjørn | 917 |
| 244/26 | 25/00315-1 | Sólorkuskipan til Svimjihøllina í Gundadali | 921 |
| 245/26 | 26/00589-1 | Íløgujáttanin 2026 “Dagstovna, frítíðarskúla og ungdómstilboð" | 926 |
| 246/26 | 25/05665-1 | Heildarætlan fyri kjarnutænastur til børn og ung | 931 |
| 247/26 | 25/01683-1 | Nýtt røktarheim og við røktaríbúðum | 936 |
| 248/26 | 25/03897-1 | Alment WC á Hvítanesi | 942 |
| 249/26 | 26/04235-4 | Bilfríir dagar í miðbýnum | 946 |
| 250/26 | 26/03292-5 | Torg á Argjum | 950 |
| 251/26 | 26/05626-1 | Ábøtur á kirkjugarðin við Velbastaðvegin | 953 |
| 252/26 | 26/04480-1 | Broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 200a og 42i, Argir. Frá D1 til A1 og frá A1 til D1 | 955 |
| 253/26 | 25/06231-2 | Útbjóðing av matr. nr. 203c í Kollafirði til raðhúsa- ella íbúðarbygging - 21/02624 | 957 |
| 254/26 | 25/01096-1 | Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kaldbak | 963 |
| 255/26 | 25/03667-1 | Trivnaðarøki í Kollafirði | 974 |
| 256/26 | 26/01053-1 | Útbygging. Lonir til Skúlan á Fløtum | 979 |
| 257/26 | 26/02779-1 | Nýtt endurnýtsluplàss í Nólsoy | 983 |
| 258/26 | 25/08024-23 | Góðselevatorar á Bacalao og í Sjóvinnuhúsinum | 986 |
| 259/26 | 26/06036-1 | NAX : Leigusáttmáli um grundøki á Sundi - broyting av endamálsorðing | 989 |
| 260/26 | 25/02706-10 | Matr.nr. 11a, Kaldbaks bygd. Leigusáttmáli millum Búnaðarstovuna og Tórshavnar kommunu. Lendi til eina transformarastøð. | 991 |
| 261/26 | 26/05097-1 | Ábyrgd av tænastum til fólk við demenssjúku undir fólkapensjónsaldur flutt til kommunurnar - fígging | 993 |
| 262/26 | 26/05986-1 | Tilmæli um regulering av brúkaragjøldum | 996 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 263/26 | 26/06941-1 | Gjøld fyri íbindingar og tænastur | 1000 |
| 264/26 | 26/04948-1 | Fíggjarætlan 2027, Tórshavnar kommuna | 1005 |
| 265/26 | 26/00100-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2026 | 1015 |
| 266/26 | 25/09594-2 | Fjallasúkklubreyt til Oyggjaleikir 2027 | 1018 |
| 267/26 | 25/09934-3 | Umsókn um leingjan av leigusáttmálanum matr. nr. 970n, Álakeri 20, Tórshavn | 1023 |
| 268/26 | 25/06061-1 | Eldradepil í Kollafirði | 1026 |

**Til viðgerðar**

## 240/26 Mál beind í nevndir 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 29.01.2026 | 3/26 | 26/00448-1 |
| 2 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 26/26 | 26/00448-1 |
| 3 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 73/26 | 26/00448-1 |
| 4 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 104/26 | 26/00448-1 |
| 5 Býráðsfundur | 04.06.2026 | 174/26 | 26/00448-1 |
| 6 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 203/26 | 26/00448-1 |
| 7 Býráðsfundur | 17.09.2026 | 240/26 | 26/00448-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |

| | | |
|---|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>17. september 2026 | Blað nr.: 910 | |
| | Forkvinnunnar merki: | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli**:

**Býráðsfundur 29. januar 2026:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Framlagt.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Framlagt.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Framlagt.

**Býráðsfundur 04. juni 2026:** Framlagt.

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Framlagt.

**Býráðsfundur 17. september 2026:** Framlagt.

# 241/26 Útboð av útbygging av Býlingshúsinum Vesturi á Flat - 19/00411

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 03.06.2026 | 88/26 | 25/00338-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.06.2026 | 138/26 | 25/00338-1 |
| 3 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 207/26 | 25/00338-1 |
| 4 Býráðsfundur | 17.09.2026 | 241/26 | 25/00338-1 |

**Upprunin til málið**
Loka verkætlan

**Lýsing av málinum**
Verkætlanin “Útbygging, Býlingshúsið vesturi á Flat” er liðug og kann lokast.

Mælt verður til at loka verkætlanina at flyta avlopið á 390 tús. kr av konto 3175 - L31010 til konto 6110 og oyramerkja upphæddina til ventilatión í Sankta Jósef barnagarði.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>17. september 2026 | Blað nr.: 912<br>Forkvinnunnar merki: |

Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☒

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 3175 | L31010 | Útbygging, Býlingshúsið vesturi á Flat | 6110 | | Umsiting og røkt av bygningum, egið rakstrarstað | | 390.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjóri, tekniski stjóri, deildarleiðari fyri Barna- og ungdómsdeildina og deildarleiðarin fyri Bygningsdeildina mæla til at:

- verkætlan verður lokað,
- avlopið verður flutt á konto 6110 og
- upphæddin verður oyramerkt til ventilatión í Sankta Jósef barnagarði.

**Mentamálanevndin 03. juni 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 10. juni 2026:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 17. september 2026:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>17. september 2026 | Blað nr.: 913 |
| | | Forkvinnunnar merki: |

# 242/26 Reinsiverk til vinnuútstykking á Ovara Hjalla - 22/01377

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 01.09.2025 | 44/25 | 25/05863-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.09.2025 | 145/25 | 25/05863-1 |
| 3 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 193/25 | 25/05863-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 01.06.2026 | 69/26 | 25/05863-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 10.06.2026 | 141/26 | 25/05863-1 |
| 6 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 228/26 | 25/05863-1 |
| 7 Býráðsfundur | 17.09.2026 | 242/26 | 25/05863-1 |
| 8 Tekniska nevnd | | | 25/05863-1 |

**Upprunin til málið**
Í sambandi við útstykkingararbeiðið til vinnustykkini á Ovara Hjalla og á Stórutjørn, verður neyðugt at staðseta eitt nýtt reinsiverk við vegamótið á Hjalla og Hvítanesvegurin, sum skal kunna rúma ca. 800 rúmmetrum.

Samstundis sum arbeitt verður við loysnini at staðseta reinsiverkið, er neyðugt at gera nakrar tillagingar á verandi kloakkleiðingum frá øllum vinnuøkinum á Hjalla.

Tørvur er á at fáa gjørt útbjóðingartilfar, har byggiskráin skal fevna um staðseting av reinsiverki við leiðingum frá:

1) Vinnustykkjunum á ovara Hjalla
2) Útstykkingini á Stórutjørn
3) Verandi útstykking á Hjalla
4) Við Tjarnir

Harumframt skal byggiskráin fevna um at leggja høvuðskloakkleiðing frá reinsiverkinum og oman til sjóvarmálan sunnanvert Byrsumúla. Mett verður, at verandi høvuðskloakk, oman fyri Hvítanes, ikki klárar at taka ímóti meiri spillvatni.

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | X | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | X | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | X | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>17. september 2026 | Blað nr.: 914<br>Forkvinnunnar merki: |

Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6875 | LK68999 | Kloakkir (íløgur) | 6875 | | | Reinsiverk á Hjalla | 750.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 750.000 av løgukarmi fyri kloakkir LK68999 undir kontu 6875, Kloakkir (íløgur) til nýggja verkætlan "Reinsiverk á Hjalla" og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 01. september 2025:** Ein meiriluti, Bergur Robert Dam Jensen, Heðin Mortensen, Anja Weyhe, tekur undir við tilmælinum.

Ein milliluti, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 10. september 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 18. september 2025:**

Atkvøtt varð um tilmælið:

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen og Guttormur í Skála

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen

Blankt atkvøddu: ongin

Málið varð sostatt samtykt við 8 atkvøðum fyri, 5 atkvøðum ímóti og ongari blankari.

**Ískoyti**
Prosjekteringin av reinsiverkinum er liðug, og mettur kostnaður verður kr. 23,542 mió. íroknað eftirlit, keyp av lendi/matrikulútreiðslur og ókend viðurskifti orsakað av ótryggum tilfarsprísum. Víst verður til kostnaðarmeting j.nr. 25/05863-6 Samlað kostnaðarmeting.

Sambært galdandi tíðarætlan verða øll vinnustykkini avhendað í juli 2026, og væntast kann tí, at fyrstu eigararnir av vinnustykkjunum fara undir sítt virksemi í hest. Tískil hevur verkætlanin skund.

**Skjøl**

25/05863-6 Samlað kostnaðarmeting
22/01377-1 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla
25/05863-11 Sáttmáli við Articon at gera Stórutjørn, og optión at gera trixtanga.pdf
25/05863-12 Flatmynd atkoma og økið við reinsiverkum.pdf
25/05863-13 Grátt spillivatn út á sjógv G101.pdf
25/05863-14 Yvirlitsmynd B100.pdf

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6475 | L64021 | Útstykking við Stórutjørn B1 og B4 (Útlegg) | 6875 | L68050 | Reinsiverk á Hjalla | | 20.542.000 |
| 6975 | L69004 | Vinnuútstykking á Ovara Hjalla (Útlegg) | 6875 | L68050 | Reinsiverk á Hjalla | | 3.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 24.292.000 |
| Áður játtað | Upphædd: | 750.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 200.000 |

**Tilmæli**

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at:

1. Bjóða arbeiðið út í innbodna lisitatión.
2. Heimila umsitingini at taka av lægsta tilboði innan játtaða fíggjarkarmin og at seta arbeiðið í verk.
3. Játta kr. 20.542.000 til verkætlanina sum útlegg á verkætlan L64021 Útstykking við Stórutjørn B1 og B2.
4. Játta kr. 3.000.000 til verkætlanina sum útlegg á verkætlan L69004 Vinnustykkini á Ovara Hjalla.
5. beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 01. juni 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, treytað av at málið verður lagt fyri nevndina aftur til støðutakan, tá tilboðini fyriliggja.

**Fíggjarnevndin 10. juni 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við teknisku nevnd og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við níggju atkvøðum fyri, fýra atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Elin Heðinsdóttir Joensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála og Astrið Breckmann.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Annfinn Brekkstein.

**Býráðsfundur 17. september 2026:** Tróndur Sigurðsson skeyt upp at beina málið aftur í nevnd.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið fall við seks atkvøðum fyri og sjey atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen, Annfinn Brekkstein og Bergur Robert Dam Jensen.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Síðani varð atkvøtt um broytingaruppskot frá Elsu Berg um at geva teknisku nevnd heimild at avgreiða málið endaliga, samsvarandi samtyktina í teknisku nevnd.

Uppskotið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen, Høgni Vilhelmsen og Annfinn Brekkstein.

Tróndur Sigurðsson bað um at fáa ført til gerðabókina, at hann vil hava eina frágreiðing frá umsitingin um, hví príshækkingin á reinsiverkinum hevur verið so høg.

# 243/26 Fjarhiti til útstykkingina Stórutjørn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.02.2026 | 38/26 | 26/00599-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 09.02.2026 | 25/26 | 26/00599-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 18.02.2026 | 35/26 | 26/00599-1 |
| 4 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 45/26 | 26/00599-1 |
| 5 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 87/26 | 26/00599-1 |
| 6 Tekniska nevnd | 01.06.2026 | 70/26 | 26/00599-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 10.06.2026 | 142/26 | 26/00599-1 |
| 8 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 229/26 | 26/00599-1 |
| 9 Býráðsfundur | 17.09.2026 | 243/26 | 26/00599-1 |

**Upprunin til málið**
Víst verður til mál nr. 25/00581

**Lýsing av málinum**
Í sambandi við útstykkingararbeiðið á Stórutjørn, skal støða verða tikin til um farast skal undir arbeiði at leggja fjarhita ella ikki. Fjarhitafelagið hevur boðað frá, at fíggjarligt rúm er ikki til at bera kostnaðin at leggja fjarhitaleiðingar. Tískil er neyðugt at kommunan í samstarvi við Fjarhitafelagið rindar fyri arbeiðið eins og gjørt er í sambandi við veitan av fjarhitaleiðingum til vinnustykki á Ovara Hjalla. Víst verður til mál nr. 22/01377 og 25/01179

Vísandi til at útstykkingararbeiðið er longu sett í verk í 2024 og at støða enn ikki er tiknin um at fjarhitaleiðing, er neyðugt er at taka eina skjóta avgerð so arbeiðið ikki steðgar upp. Vanliga hevur Fjarhitafelagið ikið sær av at veita og leggja fjarhitaleiðingar, men orsaka av væntandi haldføri hjá felagnum er støða ikki tikin til hetta eftir at farið var undir ústykkingararbeiði.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
26/00599-2 Upplegg til sáttmála millum Tórshavnar kommunu og Fjarhitafelagið ver5.docx
25/08816-5 137/25 Samtykt Byggi- og býarskipanarnevndin, 29.09.2025 Skipan av býlingum við Stórutjørn
25/08816-2 Upprunalig málslýsing mál nr. 25_00581 Útstykking til sethús við Stórutjørn 22_02943
25/08816-1 Skipan av býlingum við Stórutjørn
25/00581-2 Útstykking til sethús við Stórutjørn - 22/02943
25/01179-1 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla - 22/01377

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>17. september 2026 | Blað nr.: 918<br>Forkvinnunnar merki: |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

Verkætlanin at leggja fjarhitarør í Stórutjørn verður mett at kosta uml. kr. 8 mió. Talan er um prosjektering, at veita og leggja fjarhitarør og eftirlit. Neyvari kostnaðarmeting fyriliggur, tá ið prosjekteringsarbeiðið er liðugt væntandi primo apríl 2026.

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | Útlegg | 6475 | | | Fjarhiti til útstykking til Sethús Stórutjørn | 8.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 8.000.000 |
| Áður játtað | Upphædd: | 0 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | ultimo 2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 0 |

**Tilmæli**

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at:

1) heimila umsitingini at gera avtalu við Fjarhitafelagið um planlegging, fremjan og avhandan av fjarhitaanleggi til býlingarnar B1 og B4 við Stórutjørn.
2) kr. 8 mió. verða játtaðar til at leggja fjarhita o.a. í sambandi við hetta útleggið til verkætlan L64021 Útstykking við Stórutjørn, B1 og B4, verður hækkað við 8 mió kr., sum eykajáttan til kr. 134.825.142.
3) beina málið í býráðið til tvær viðgerðir umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. februar 2026:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Heidi lava Elgeirsdóttir, Birgir Nielsen, tekur undir við tilmælinum.

Kári Johansen tekur støðu á seinni fundi.

**Tekniska nevnd 09. februar 2026:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur støðu á býráðsfundi.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, við tí nágreining at endalig avtala við Fjarhitafelagið verður løgd fyri býráðið aftur til góðkenningar, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Atkvøtt varð við aðru viðgerð, og varð málið samtykt við átta atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Gunnar Djurhuus, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Elin Heðinsdóttir Joensen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála,

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Annfinn Brekkstein, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddu: Eingin.

**Ískoyti**
Í sambandi við detailprosjekteringina av fjarhitanum til útstykkingini á Stórutjørn er komið fram, at meirikostnaðurin er uml. kr. 8 mió.
Sí j. nr. 26/00599-18, 26/00599-19, og 26/00599-20

Høvuðsorsøkirnar til, at arbeiðið er dýrkað, er, at sveisi- og muffuarbeiðið vísti seg at blíva væl dýrari, enn upprunaliga mett, vegna tvørligar arbeiðsumstøður, og at fleiri stikk eru løgd inn til randarhúsini.

Tað kann viðmerkjast, at arbeiðið at leggja fjarhitarør er gjørt í tøttum samstarvi við Fjarhitafelagið, ið skal yvirtaka/keypa verkætlanina eftir nærri avtalu. Samstarvið viðførir, at arbeiðið er gjørt á sama hátt, sum um tað var Fjarhitafelagið, ið gjørdi tað – Mest sveisar og muffar, Glasir ger kontrol av sveisingum, SMJ prosjekterar og hevur eftirlit. Eisini verða rørini keypt frá Logstor har vit, sum fjarhitafelagið, fáa avsláttur uppá á 62%.

**Skjøl**
26/00599-18 Upprunaliga kostnaðarmetingin Fjarhiti - Stórutjørn Kostnaðarmeting_pdf.msg
26/00599-19 Dagførd kostnaðarmeting Fjarhiti - Stórutjørn og Vinnuøkini Kostnaðarmeting_pdf.msg
26/00599-20 26-00599 Samlað dagførd kostnaðarmeting.xlsx

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6475 | L64021 | Útstykking við Stórutjørn B1 og B4 (Útlegg) | 6475 | L64023 | Fjarhiti til útstykking til Sethús Stórutjørn | | 8.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 16.000.000 |
| Áður játtað | Upphædd: | 8.000.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2026 |

| | | |
|---|---|---|
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 200.000 |

**Tilmæli**
Tekniski stjóri og býarverkfrøðingurin mæla til, at:
- kr. 8.000.000, verða játtaðar til at leggja fjarhita o.a. í sambandi við hetta útleggið til verkætlan L64021 Útstykking við Stórutjørn,
- B1 og B4, verður hækkað við 8 mió kr., sum eykajáttan til kr. 142.825.142.
  og beina málið um fíggjarnevndina til 2 viðgerðir í býráðnum.

**Tekniska nevnd 01. juni 2026:** Ein meiriluti, Bergur Robert Dam Jensen, Anja Weyhe, Heðin Mortensen, tekur undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein tekur ikki undir við tilmælinum, grundað á at SEV, sum annar eigari av Fjarhitafelagnum, ikki er við í fíggingini í hesum umfari.

**Fíggjarnevndin 10. juni 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við meirilutanum í teknisku nevnd og beinir málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Atkvøtt varð við fyrstu viðgerð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við níggju atkvøðum fyri, fýra atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Elin Heðinsdóttir Joensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála og Astrið Breckmann.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, og Annfinn Brekkstein.

**Býráðsfundur 17. september 2026:** Atkvøtt varð við aðru viðgerð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

# 244/26 Sólorkuskipan til Svimjihøllina í Gundadali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 05.05.2025 | 35/25 | 25/00315-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.05.2025 | 92/25 | 25/00315-1 |
| 3 Býráðsfundur | 22.05.2025 | 126/25 | 25/00315-1 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 09.02.2026 | 21/26 | 25/00315-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 18.02.2026 | 42/26 | 25/00315-1 |
| 6 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 55/26 | 25/00315-1 |
| 7 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 01.06.2026 | 44/26 | 25/00315-1 |
| 8 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 31.08.2026 | 51/26 | 25/00315-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 09.09.2026 | 178/26 | 25/00315-1 |
| 10 Býráðsfundur | 17.09.2026 | 244/26 | 25/00315-1 |

**Upprunin til málið**
Umhvørvispolitikkurin 'Grøna Leiðin' hjá Tórshavnar kommunu.

**Lýsing av málinum**
Í samsvari við orðingar í samgonguskjalinum um at minka um CO2 útlát frá kommunalum bygningum, er málið ein liður í gongdini at knýta kommunalu bygningarnar í varandi orkukeldur.

Samstundis er hetta málið eisini ein liður hjá Tórshavnar kommunu at fylgja við allari tøkniligari framgongd og vera við í áhaldandi menningini innan aðrar orkukeldur.

Umsitingin ynskir heimild at gera útbjóðingartilfar og at bjóða út sólorkuskipan til Svimjihøllina í Gundadali, umframt at játta kr. 300.000 av løgukarminum LK61705 "Orkupolitikkur" til ráðgeving og útbjóðing.

Ein sólorkuskipan við mátti á 259 kW og við einari mettari árligari framleiðslu á 181.000 kWt verður fyri samlaðu verkætlanina mett at kosta umleið kr. 3,2 mió uttan mvg.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | x | | | |

| | | |
|---|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>17. september 2026 | Blað nr.: 922 | |
| | Forkvinnunnar merki: | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | **x** | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 6177 | LK61705 | Orkupolitikkur |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 6177 | | Sólorkuskipan til Svimjihøllina í Gundadali | ja |

| |
|---|
| **Upphædd** |
| 300.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri, leiðarin á umhvørvisdeildini og leiðarin á bygningsdeildini mæla nevndini til at taka undir við at flyta kr. 300.000 av løgukarminum LK61705 Orkupolitikkur undir kontu 6177 Umsiting og røkt av bygningum, inn á nýggja verkætlan Sólorkuskipan til Svimjihøllina í Gundadali, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 05. mai 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og at umsitingin leggur málið fyri nevndina aftur til støðutakan, tá tilboðini koma inn.

**Fíggjarnevndin 14. mai 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum um at flyta kr. 300.000 av løgukarminum LK61705 Orkupolitikkur undir kontu 6177 Umsiting og røkt av bygningum, inn á nýggja verkætlan Sólorkuskipan til Svimjihøllina í Gundadali, og beina málið í býráðið.
Fíggjarnevndin viðmerkir, at talan bert er um heimild at gera útbjóðingartilfar v.m., og at innkomin tilboð verða løgd fyri viðkomandi nevndir til viðgerðar og støðutakan.

**Býráðsfundur 22. mai 2025:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Talan er bert um tekjuna, sum vendir suðureftir (gamla svimjihøllin allir hyljar) og ikki yvir skiftirúmunum, skrivstovu v.m.

Vit hava nú gjørt kanningar av verandi tekju, í mun til styrki. Kanningarnar vísa, at takið er nóg sterkt til at bera eina sólorkuskipan, tó mugu súlurnar í fasaduni inni í høllini brunamálast og onkur besløg styrkjast.

Verandi tak á svimjihøllini varð lagt á fyri 23 árum síðani, tá var takið sera vánaligt, og kommunan valdi tá eina bíliga loysn við at leggja ein dúk omaná verandi papptekju. Tá varð skorið í verandi tekju fyri at fáa tað dampopið.

Undirtakið er í vánaligum standi og takdúkurin er gamal, so takið eigur at verða skift, áðrenn sólorkuskipan verður løgd á tekjuna. Tað eru nakrir lekar í tekjuni.

Í høllini eru 27-28 gradir inni, og av tí at takið ikki er væl bjálvað, so gevur tað eitt stórt orkutap upp gjøgnum tekjuna. Tí eigur meira bjálving at verða løgd á tekjuna, samstundis sum takið verður skift.

Takdúkurin er kannaður av RS-service, fyri at fáa at vita meira nágreiniliga, hvat standurin er á takinum og nær tað má skiftast. RS-service metir, at takið hevur eina liviðtíð uppá 15+ ár aftrat. Tað er tó ikki galdandi fyri trýkantslistarnar, sum eru í sera vánaligum standi, og fara at loysna meir og meir frá takinum.

Vit eru í ferð við at gera 6 destruktivar prøvar fyri at síggja, hvussu standurin er longur niðri í bjálving og ståltrapetsurnar.

Alt prosjektið er mett at kosta umleið kr. 9 mió., harav kr. 4 mió. eru til sólorkuskipan og kr. 5 mió. til at skifta og bjálva takið.

Mælt verður til, at hetta verður fíggjað soleiðis:
- Konto 6177, umsiting og røkt av bygningum, orkuátøk, kemur at gjalda kr. 6,5 mió.
- Konto 6110, umsiting og røkt av bygningum, egið rakstrarstað, kemur at gjalda kr. 2,5 mió.

**Hjálagt:**
j.nr. 25/00315-5 Støðulýsing av takinum frá RS-service

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6177 | LK61705 | Orkupolitikkur | 6177 | L61715 | Sólorkuskipan til Svimjihøllina í Gundadali | | 400.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, leiðarin á umhvørvisdeildini og leiðarin á bygningsdeildini mæla til:
- At farið verður undir at prosjektera og bjóða út arbeiðið at skifta tekjuna, eftirbjálva og seta upp sólorkuanlegg á tekjuna.
- At játta kr. 400.000 til prosjektering og útbjóðing av Løgukarmi LK61075 Orkupolitikkur undir konto 6177 á verkætlan L61715 Sólorkuskipan til Svimjihøllina í Gundadali.
- At málið verður lagt fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina.

- At málið verður lagt fyri umhvørvisnevndina aftur, tá tilboðini eru komin inn.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 09. februar 2026:** Ein meiriluti, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Annita á Fríðriksmørk, Annfinn Brekkstein, tekur undir við tilmælinum.

Kári Johansen tekur ikki undir við tilmælinum, vísandi til at arbeiðið er ikki átrokandi.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið, ið varð samtykt við ellivu atkvøðum fyri, einari atkvøðu ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson

Blankt atkvøddi: Kári Johansen

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur kannað verandi tekju nærri.

Bygningurin er frá 1982, og í 2005 var tekjan so vánalig at okkurt mátti gerast. Tá var protandúkur lagdur á, umframt 5 cm av bjálving. Henda tekjan er mett at halda 10-15 ár afturat.

Tekjan á svimjihøllini er ein heit tekja, sum merkir, at øll bjálvingin liggur omaná berandi konstruktiónini. Um sólorkuskipan skal setast upp, ger hetta, at festi mugu setast niður gjøgnum takdúk, bjálving og niður í sperrurnar. Av tí at festini til sólorkuskipanina skulu setast niður gjøgnum tekjuna, er neyðugt at skifta hana.

Hetta kemst av, at tekjan hevur ein aldur, sum ger, at inntrivið verður so stórt, at óvist er, hvussu tekjan kemur at halda framyvir. Tí gerst tað neyðugt at skifta tekjuna fyrr enn annars neyðugt, og verkætlanin gerst fleiri mió. kr. dýrari.

Tí mælir umsitingin til at bíða við at leggja sólorkuskipan á tekjuna á svimjihøllini, til tekjan skal skiftast um 10-15 ár.

Umsitingin hevur hugt eftir øðrum kommunalum bygningum, har tað er møguligt at leggja sólorkuskipan á tekjurnar, sí journal nr. 26/04363 Sólorkuskipanir á kommunalar bygningar. Umsitingin mælir til, at kommunan fer í gongd við hesar bygningarnar fyrst.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á umhvørvisdeildini og leiðarin á bygningsdeildini mæla til at bíða við at leggja sólorkuskipan á tekjuna í svimjihøllini, til tekjan skal skiftast um 10-15 ár.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 01. juni 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>17. september 2026 | Blað nr.: 925<br>Forkvinnunnar merki: |

**Ískoyti:**
Av tí at samtykt er at bíða við at leggja sólorkuskipan á tekjuna í svimjihøllini í Gundadali, til tekjan skal skiftast um 10-15 ár, er ætlanin sum nú er at loka verkætlanina.

Tað standa 485.000 kr. á løguni L61715 Sólorkuskipan til svimjihøllina í Gundadali, hesar verða at flyta aftur á løgukarmin LK61705 Orkupolitikkur.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☒

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6177 | L61715 | Sólorkuskipan til svimjihøllina í Gundadali | 6177 | LK61705 | Orkupolitikkur | | 485.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri og leiðarin á umhvørvisdeildini mæla til:
- at verkætlanin verður lokað.
- at tær 485.000 kr. verða fluttar aftur á løgukarmin.
- at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 31. august 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 09. september 2026:** Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 17. september 2026:** Atkvøtt varð um tilmæli hjá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við ellivu atkvøðum fyri, tveimum atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.
.
Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

# 245/26 Íløgujáttanin 2026 “Dagstovna, frítíðarskúla og ungdómstilboð"

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 11.02.2026 | 16/26 | 26/00589-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.03.2026 | 77/26 | 26/00589-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.03.2026 | 84/26 | 26/00589-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 03.06.2026 | 89/26 | 26/00589-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 08.09.2026 | 97/26 | 26/00589-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 09.09.2026 | 166/26 | 26/00589-1 |
| 7 Býráðsfundur | 17.09.2026 | 245/26 | 26/00589-1 |

**Upprunin til málið**
Leysgeva játtanina av íløgukarminum til løgukonto.

**Lýsing av málinum**
Á fíggjarætlanini 2026 eru játtaðar 3 mió. kr. á íløgujáttanini til “Dagstovna, frítíðarskúla og ungdómstilboð”.

Á fundi í mentamálanevndini í mars og apríl í fjør var nevndin kunnað um hølisviðurskiftini hjá:

- frítíðarskúlanum til børn í Eysturskúlanum
- frítíðarskúlanum til børn í Sankta Frans skúla
- frítíðarskúlanum til børn í Skúlanum á Fløtum og,
- dagstovnurin 0-18 ár í Kaldbak

Niðan fyri er ein stutt lýsing av hølisumstøðunum:

Frítíðarskúlin til børn í Eysturskúlanum
Frítíðarskúlin er staðsettur í Smílibýlinum, sum er eitt sethús á Stoffalág 82 og í Garðalon sum er ein fyribils lon, sum stendur í garðinum við í Eysturskúlanum. Annar árgangurin í frítíðarskúlanum er í Smílibýlinum og hin í Garðalon.
Fyribils lonin, Garðalon, varð útvegað til Eysturskúlan, sum hevur stóran tørv á fleiri undirvísingarhølum. Av tí at frítíðarskúlin hevði bráðfeingis tørv á meira pláss í 2022-2023 mátti skúlin lata frítíðarskúlan brúka hølini ein part av skúladegnum.
Sum heild eru hølini á alt for trong og lítið funktionel. Harumframt eru ljóðviðurskiftini eru stak vánaligt.
Fyri eina nærri lýsing sí nevndarmál nr. 34/25, sum var viðgjørt í mentamálanevndini 12. mars 2025.

Frítíðarskúli til børn í Sankta Frans skúla
Børn í Sankta Frans skúla eru tilknýtt tveir frítíðarskúlar. Í forskúlanum eru tey í frítíðarskúlanum Sankta Frans, sum er staðsettur í eini lon í skúlagarðinum. Í 1.-2. flokki eru tey í gomlu kantinuni í Badmintonhøllini. Tað er avbjóðandi at fáa ein skynsaman rakstur í Frítíðarskúlan Sankta Frans, tí barnatalið er lágt fyri at vera ein frítíðarskúli. Námsfrøðiliga hevur tað nakrar avbjóðingar, at børnini bara eru eitt ár í frítíðarskúlanum og so skifta tey aftur til eitt nýtt umhvørvi. Í Badmintonhøllini er so trongt og rúmini lítið funktionel, at stovnurin brúkar fyribils lonir á fríøkinum útsynningsmegin Badmintonhøllini og leigar B36 húsið fyri at rúma øllum frítíðarskúla børnunum. Harumframt hevur Havnar Badmintonfelag í nógv ár havt eitt ynski um at sleppa fyrr inn í Badmintonhøllina, men vísandi til trongu umstøðurnar skal frítíðarskúlin brúka høllina til kl. 16.
Fyri nærri lýsing av viðurskiftunum sí nevndarmál nr. 35/25, sum var viðgjørt í mentamálanevndini 12. mars 2025.

Frítíðarskúli til børn í Skúlanum á Fløtum

Frítíðarskúlin er staðsettur á tveimum staðsetingum. Frítíðarskúlin í Skúlanum á Fløtum er til børn í forskúla og 1. flokki. Í skúlanum, hevur frítíðarskúlin eingin egin høli. Frítíðarskúlabørnini uppihalda seg í gongdini og í skúlastovunum hjá forskúlanum. Tað hevur fleiri avbjóðingar við sær. Børnini og starvsfólk hava tørv á hølum, sum gera tað møguligt at spæla still spøl uttan at verða órógvaði. Hetta letur seg illa gera í Skúlanum á Fløtum.
2. flokkur er í Spíranum, sum heldur til í fyribils lonum og felagshúsinum hjá Føroya Ríðingafelag í Havnadali. Í Spíranum er tað for trongt og sera stórar avbjóðingar eru við uttanumøkinum. Fyri eina nærri lýsing sí nevndarmál nr 47/25, sum var viðgjørt í mentamálanevndini 2. apríl 2025.

Dagstovnur 0-18 ár til børn og ung í Kaldbak

Í løtuni er alt námsfrøði virksemi í Kaldbak í dagstovninum Flatnagarður. Stovnurin er í einum vanligum Norðsetur húsi, og tað er sera trongt til námsfrøðiligt virksemi. Fyri nøkrum árum síðan var barnatalið so høgt, at stovnurin mátti leiga høli frá samkomuni Nazaret til frítíðarskúlan.
Fyri eina nærri lýsing sí nevndarmál nr 46/25, sum var viðgjørt í mentamálanevndini 2. apríl 2025.
Umsitingin mælir til, at íløgujáttanin verður brúkt til projektering av nýggjum bygning til ein av omanfyri nevndu stovnum.

Í fjør fekk stjórnin eitt tilmæli frá umsitingini við raðfestingarlista til bygging av nýggjum stovnum. Listin tekur støði í áðurnevndu stovnum. Tveir stovnar eru raðfestir sum nr. 1.
Neyðugt er at mentamálanevndin umrøður og tekur støðu til hvør ella hvørjir stovnar skulu projekterast.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

Býráðið samtykti í fjør at gera eina heildarætlan fyri kjarnutænastur fyri børn og ung í Tórshavnar kommunu. Sí mál nr. 159/25 á býráðsfundi 18. juni 2025.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- 25/05665 Heildarætlan fyri kjarnutænastur til børn og ung
- 25/03288 Frítíðarskúlin til næmingar í Eysturskúlanum
- 25/03406 Frítíðarskúli til næmingar í Sankta Frans skúla
- 25/01116 Nýggjur stovnur til børn og ung 0-18 ár í Kaldbak
- 25/04293 Frítíðarskúli til børn í skúlanum á Fløtum

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 3175 | LK31021 | Dagstovna, frítíðarskúla og ungdómstilboð | 3175 | | | Nýbygging XXX | 3 mió. kr |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | n/a |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | n/a |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | n/a |

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, deildarleiðarin fyri Bygningsdeildina og deildarleiðarin fyri Barna- og ungdómsdeildina mæla til,

- at nevndin tekur støðu, hvør stovnur skal prosjekterast fyri áðurnevndu íløgujáttan 2026,
- at peningurin verður játtaður av LK31021 og játtaður á nýggja løgukonto til endamálið
- at beina málið í býráðið og fíggjarnevndina umvegis byggi- og býarskipanarnevndina

**Mentamálanevndin 11. februar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum at raðfesta frítíðarskúlarnar á Fløtum og í Eysturskúlanum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina og byggi- og býarskipanar-nevndina.

Nevndin samtykkir at gera eins bygningar fyri báðar frítíðarskúlarnar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. mars 2026:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. mars 2026:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Annita á Fríðriksmørk, Birgir Nielsen, samtykti at taka undir við mentamálanevndini.

Kári Johansen tekur støðu á seinni fundi.

**Ískoyti:**
Víst verður til samtykt nr. 16/26 í mentamálanevndini tann 11. februar. Samtykt var at raðfesta frítíðarskúlarnar á Fløtum og í Eysturskúlanum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina og byggi- og býarskipanar-nevndina. Nevndin samtykkir at gera eins bygningar fyri báðar frítíðarskúlarnar.

Á býráðsfundi 30. apríl varð samtykt, at kommunan keypir ognina á Djóna í Geil gøtu 49 til staðseting av nýggjum frítíðarskúla. Við støði í hesi býráðssamtykt mælir umsitingin til at nevndin endurskoðar samtyktina um at gera eins bygningar í til frítíðarskúlan í Eysturskúlanum og á Fløtum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, deildarleiðarin fyri Barna- og ungdómsdeildina og deildarleiðarin fyri Bygningsdeildina mæla til at umrøða málið.

**Mentamálanevndin 03. juni 2026:** Nevndin heitir á umsitingina um at arbeiða víðari við byggiskráum til frítíðarskúlan á Fløtum og frítíðarskúlan Smílibýlið.

**Ískoyti**:
Víst verður til samtyktina omanfyri.

Talan er um at játtað 2 mió. kr, sum eru tøkar á fíggjarætlanini 2026, av LK31021. Játtað verður 1,5 mió. kr á nýggja løgukonto til verkætlan at gera frítíðarskúla til børn í Eysturskúlanum og 0,5 mió. kr. til verkætlan at gera frítíðarskúla til børn í Skúlanum á Fløtum.

Býráðið samtykti í vár at leysgeva 1 mió. kr. á løgukonto 3175 L31021 "Frítíðarskúlin í Badmintonhøllini - bráfeingishølir", sum kemur á aftur í samband við arbeiðið at gera fíggjarætlanina 2027.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 3175 | LK31021 | Dagstovna, frítíðarskúla og ungdómstilboð | 3175 | | | FTS á Fløtum | 500.000 kr. |
| 3175 | LK31021 | Dagstovna, frítíðarskúla og ungdómstilboð | 3175 | | | FTS við Eysturskúlan | 1.500.000 kr. |

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, tekniski stjóri, deildarleiðarin fyri Barna- og ungdómsdeildina og deildarleiðarin fyri Bygningsdeildina mæla til at:

- At játtaðar verða 500.000 kr. av løgukarmi LK31021 á nýggja verkætlan, "FTS á Fløtum".
- At játtaðar verða 1.500.000 kr. av løgukarmi LK31021 á nýggja verkætlan, "FTS við Eysturskúlan".
- At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 08. september 2026:** Ein meiriluti, Bergur Robert Dam Jensen, Heðin Mortensen og Annita á Fríðriksmørk, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Høgni Vilhelmsen, mæla til at tað verða tiknar 125.000 kr. av ávíkavist LK31021 (FTS á Fløtum) og FTS við Eysturskúlan tilsamans 250.000, sum fer til L31015 høli til frítíðarskúla og ungdómstilboð í Kaldbak.

**Fíggjarnevndin 09. september 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen tekur undir við meirilutanum í mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Høgni Vilhelmsen og Kári Johansen, tekur undir við minnilutanum í mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 17. september 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen, Høgni Vilhelmsen og Annfinn Brekkstein.

# 246/26 Heildarætlan fyri kjarnutænastur til børn og ung

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.06.2025 | 98/25 | 25/05665-1 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 05.06.2025 | 40/25 | 25/05665-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 04.06.2025 | 88/25 | 25/05665-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 110/25 | 25/05665-1 |
| 5 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 159/25 | 25/05665-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2026 | 123/26 | 25/05665-1 |
| 7 Trivnaðarnevndin | 04.06.2026 | 29/26 | 25/05665-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 03.06.2026 | 93/26 | 25/05665-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 10.06.2026 | 139/26 | 25/05665-1 |
| 10 Býráðsfundur | 17.09.2026 | 246/26 | 25/05665-1 |

**Upprunin til málið**
Tórshavnar kommuna stendur fyri nýggjum krøvum innan skúlaøkið. Hesi krøv fevna millum annað um færri næmingar í hvørjum flokki, nýggjar forskúlar og sum avleiðing eisini nýggj krøv til frítíðarskúlarnar í kommununi. Hetta hevur við sær avbjóðingar fyri verandi stovnar og krevst at gjørd verður eina heildarætlan fyri, hvussu stovnarnir innrætta seg, útbyggjast og staðsetast í ymisku býarpørtunum í kommununi við atlitið til herdu krøvini innan økið.

**Lýsing av málinum**
Tá ið vísast skal til staðsetingar av nýggjum kjarnutænastum til børn og ung (eitt nú skúlar, forskúlar og frítíðarskúlar) er tað ein fyrimunur um avgerðir kunnu takast á hollum vitanargrundarlagi, soleiðis at atlit verður tikið til verandi stand av bygningum og tørvi kring alla kommununa.

Til tess at fremja eina yvirskipaða lýsing av økinum mælir umsitingin til, at staðseting av verandi kjarnutænastum, umframt verandi og væntandi kapasitetur, verður neyvt kortlagdur.
Fyri at skipa arbeiðið tvørtur um ymisku kjarnuøkini, so verður mælt til, at ein arbeiðisbólkur verður settur, sum hevur til endamáls at:

- Skapa eina heildarfatan av teimum nýggju krøvunum og hvussu tey ávirka verandi stovnar.
- Kanna og lýsa, hvussu stovnarnir fyri børn og ung í dag arbeiða í mun til nýggju krøvini.
- Gera tilmæli til, hvussu krøvini kunnu setast í verk á ein samanhangandi hátt.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Arbeiðið skal fremjast í samsvar til tær lógir og ásetingar, sum eru galdandi fyri ymisku kjarnuøkini, tað verið seg skúla- og frítíðarskúlaøkið, umframt at arbeiðið má taka atlit til kommunalu býarskipanina.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Til tess at fremja heildarætlanina verður mælt til, at skipa arbeiðið út frá trimum deiluppgávum:

1. Hvørji eru nýggju krøvini
    - Lýsa og kortleggja krøvini, broytingarnar í samfelagnum, fólkatalsfrøðina, sum eru við til at ávirka yvirskipaða bygnaðin á ymisku stovnunum
    - Eyðmerkja fyrimunir og vansar á ymisku stovnunum.

2. Stovnarnir og nýggju krøvini
    - Kanna, hvussu ymisku stovnarnir í dag møta og arbeiða við ella eru førir fyri at lofta teimum nýggju krøvunum (t.d. skúlar/flokkar við færri næmingum, forskúlar, frítíðarskúlar).
    - Lýsa møguligar avbjóðingar og møguleikar.
3. Tilmæli
    - Gera uppskot til, hvussu krøvini kunnu náast við atlitið til:
        - Verandi bygning, møguligar útbyggingar, verandi skipan og møguliga nýggjar staðsetingar.
    - Gera uppskot til í hvørji raðfesting politiska skipanin eigur at raðfesta ymisku stovnarnar

Sí annars eisini lýsing av Kjarnuuppgávunum hjá Barna- og ungdómsdeildini, j.nr. *25/05665-3, Kjarnuuppgávur hjá Barna- og ungdómsdeildini*.

Arbeiðsháttur
Mælt verður til at uttanhýsis ráðgevi samskipar og savnar tilfarið.
Arbeiðsbólkur fylgir arbeiðinum við afturvendandi fundum, hjálpir til at fáa nøktandi tilfar til ráðgeva, skipar fyri neyðugum fundum við stovnar ella onnur, sum kunnu hava eina ávirkan á arbeiðið osfr.

Arbeiðsbólkurin saman við uttanhýsis ráðgeva leggja tilfar fyri stjórn til umrøðu og góðkenningar, áðrenn málið verður lagt fyri avvarðandi nevndir til endaliga góðkenning.

Tíðarætlan
Arbeiðið byrjar beinanvegin og arbeiðsbólkurin skal vera liðugur við frágreiðingina við skjótast gjørligt og í seinasta lagi við árslok 2025.

Luttakarar
Arbeiðsbólkurin verður mannaður við umboðum frá:

- B&U
- Mentamáladeildini
- Bygningsdeildini
- Býarskipanardeildini

Fíggjarætlan

| | |
|---|---|
| Setan av uttanhýsis ráðgeva (uml. 4 mánaðir á kr. 30.000) | kr. 120.000 |
| Grafisk uppsetan | kr. 50.000 |
| Óvissur | kr. 30.000 |
| Tilsamans | kr. 200.000 |

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
j.nr.
25/00102 og 22/05751 Hoyvíkar skúli dagføring og høvuðsumæling (nýbygging)
24/07481 Umvæling av gamla Argja skúla til frítíðartilboð til 3.-6. flokk og undirvísingarhølir hjá Gulaskúla (flyting av tilb. Í lonunum í Hoydølum)
25/03288 Høllisviðurskifti í frítíðarskúlanum til børn í Eysturskúlanum
25/03406 Frítíðarskúli til børn í Sankta Frans skúla
25/04293 Frítíðarskúli til børn í skúlanum á Fløtum
25/01116 Nýggjur stovnur til børn og ung 0-18 ár í Kaldbak
25/05134 Minni barnabólkar og harvið meira tíð til námsfrøði
24/01070 Lýsing av karmunum um námsfrøðiliga virksemið í 2024
25/01718 Frítíðartilboð til 3. - 6. flokk

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Mentamáladeildin, Børn&Ung, Bygningsdeildin og Býarskipanardeildin standa saman um hesa málslýsing, og skal málið tískil í avvarðandi nevndir til góðkenningar.

**Skjøl**
*25/05665-3, Kjarnuuppgávur hjá Barna- og ungdómsdeildini*

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 3214 | | Broytingar og minni umvælingar | | | | | 100.000 |
| 4140 | | Ætlanir á skúlaøkinum | | | | | 50.000 |
| 7315 | | Kommunuætlan | | | | | 50.000 |
| | | | | | | | |
| | | | | | | | |
| | | | | | | | |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 200.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | - |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, leiðarin fyri Mentamáladeildina, leiðarin fyri Børn&Ung og býararkitekturin mæla til at:

- arbeiðið at fremja heildarætlan fyri kjarnutænastur til børn og ung í Tórshavnar kommunu verður sett í gongd.
- arbeiðið verður goldið av hesum rakstrarjáttanum, sum lýst omanfyri:
  - kt. 3214, *Broytingar og minni umvælingar*,
  - kt. 4140, *Ætlanir á skúlaøkinum* og
  - kt. 7315, *Kommunuætlan*
- málið verður beint í býráðið umvegis trivnaðarnevndina, mentamálanevndina og fíggjarnevndina

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Mentamálanevndin 04. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Trivnaðarnevndin 05. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum**.**

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. juni 2025**: Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Eftir at umsitingin móttók fyrsta tilboðið, hevur Trivnaðarfyrisitingin mælt til, at alt barnagarðsøkið verður tikið við beinanvegin. Upprunaliga var ætlanin, at hetta arbeiðið varð gjørt, eftir at skúlaøkið var framt.

Í sambandi við hetta hevur umsitingin móttikið dagført tilboð frá SNA. Tilboðið fevnir nú bæði um dagstovnaøkið, skúlaøkið og frítíðartilboð, og er tilboðið áljóðandi tilsamans kr. 481.000 uttan mvg. Samlaða upphæddin fyri arbeiðið er so statt kr. 511.062,50 við kommunalum mvg.

Tá málið varð samtykt í juni 2025, varð játtan á kr. 200.000 sett av til arbeiðið.

Tørvur er á at fáa játta írestandi fígging á kr. 311.062,50 íroknað mvg, soleiðis at arbeiðið kann fremjast sambært dagførda tilboðnum.

Umsitingin mælir til at írestandi fíggingin verður tikin av hesum kontum:
- kr. 100.000 av konto **3214, Broytingar og minni umvælingar**
- kr. 100.000 av konto **4140, Ætlanir á skúlaøkinum**
- kr. 111.062,50 av konto **1312, Trivnaðarfyrisitingin**

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei
Verður fíggjað av rakstarkontum sum lýst omanfyri.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, leiðarin fyri Mentamáladeildina, leiðarin fyri Børn og Ung og býararkitekturin mæla til at:
- heildarætlanin verður sett í verk
- arbeiðið verður fíggjað soleiðis:
  - kr. 100.000 av kt. **3214, Broytingar og minni umvælingar**
  - kr. 100.000 av kt. **4140, Ætlanir á skúlaøkinum**
  - kr. 111.062,50 av kt. **1312, Trivnaðarfyrisitingin**

  og beina málið í trivnaðarnevndina, mentamálanevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Birgir Nielsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Mentamálanevndin 03. juni 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 04. juni 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 10. juni 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála, Kristianna Winther Poulsen og Høgni Vilhelmsen, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum, vísandi til at umsitingin sjálv kann gera arbeiðið, og at tilboðið omanfyri kr. 500.000 ikki er boðið út.

**Býráðsfundur 17. september 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við ellivu atkvøðum fyri, tveimum atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

# 247/26 Nýtt røktarheim og við røktaríbúðum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.01.2025 | 11/25 | 25/01683-1 |
| 2 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 14.01.2025 | 7/25 | 25/01683-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.01.2025 | 43/25 | 25/01683-1 |
| 4 Heilsu- og eldranevndin | 27.03.2025 | 12/25 | 25/01683-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 27.03.2025 | 62/25 | 25/01683-1 |
| 6 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 82/25 | 25/01683-1 |
| 7 Heilsu- og eldranevndin | 03.09.2026 | 20/26 | 25/01683-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 09.09.2026 | 173/26 | 25/01683-1 |
| 9 Býráðsfundur | 17.09.2026 | 247/26 | 25/01683-1 |

**Upprunin til málið**
Málið er lýst í fylgiskjali *Nýtt røktarheim og við røktaríbúðum jnr. 25/01683-2*.

**Ískoyti**
Víst verður til samtykt hjá undanfarnu byggi- og býarskipanarnevnd hin 11. desember 2024, har tað varð samtykt í máli nr. 23/05639, Nýggj serstøk byggisamtykt fyri røktarheim á Stórubrekku, matr. nr. 138a, Hoyvík, at gera eina umhvørvisárinsmeting, áðrenn nakað arbeiði fer í gongd.

**Søgulig gongd**
Grundøkið, er partur av einum størri øki í býarpartinum 'Hoyvíkshagi suður'", sum varð lagdur til rættis mitt í 80´árunum. Økið hevur so statt í mong ár verið ætlað til byggilendi. Søguliga hevur byggisamtyktin fyri økið verið hendan:

- 1982: Byggisamtyktarkort av Hoyvík, vísir alt økið við Stórubrekku sum A1, ætlað sethúsum.
- 1996: Økið er broytt til A3, sum fevnir um blandaða bústaðar- og miðstaðarbygging.
- 2020: Partur av Dalinum Langa verður broyttur frá A3 til D1, sum verður lagt til almenning, náttúrufriðingar- og mentanarlig endamál (j.nr. 18/04229).
- 2022: Økið á Stórubrekku verður broytt frá A3 til D3, sum fevnir um stórar almennar stovnar fyri umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tílíkt (j.nr. 22/00349).
- 2024: Serstøk byggisamtykt fyri Stórubrekku verður galdandi fyri D3 økið (j.nr 23/05639). Serstaka byggisamtyktin lýsir nágreiniliga, hvat er loyvt at byggja á lendinum. Tekningar, so sum støðuplanur, skurðar og visualiseringar vísa ætlaðu byggingina.

**Kanning og vernd av økinum**
Økið, har røktarheimið er staðsett, er í fleiri umførum kannað. Eitt nú hevur Jarðfeingi gjørt eina frágreiðing til Tórshavnar kommunu um "Nøkur fyribrigdi í landslagnum á Stórubrekku í Hoyvík". Sí skjal, j.nr.25/01683-4

Somuleiðis hevur Býarskipanardeildin í byggiskránni til nýggja røktarheimið lagt stóran dent á at varðveita upprunalendið kring byggingina. Viðfest er brot úr byggiskránni, sum fevnir um lýsing av "býarskipan og grundøki". Sí skjal, j.nr.25/01683-3

Í útbjóðingartilfarinum verður álagt arbeiðstakaranum, ið skal byggja røktarheimið, at varðveita upprunalendi í størst møguligan mun, m.a. við at endurnýta partar av flagnum, sum verður grivið av. Viðfest er brot úr arbeiðsfrágreiðingini hjá lendisarkitektinum. Sí skjal, j.nr. 25/01683-11.

**Status í verkætlanini:**
Byggiloyvi varð útskrivað í juni, høvuðsprosjektið er bjóðað út, og lisitatiónin verður 31. januar 2025. Tá ið sáttmáli er gjørdur við vinnandi arbeiðstakaran, er so statt klárt at fara undir at byggja røktarheimið á Stórubrekku.

Vísandi til omanfyristandandi metir umsitingin, at tilgongdin í sambandi við ætlaðu byggingina á Stórubrekku hevur fylgt øllum teimum mannagongdum og krøvum, sum verða sett til slíkar byggingar, herundir kanningar, sum eru gjørdar av landslagnum í økinum, jarðfrøðiligar kanningar, boriroyndir og annað.

Tað er ein sannroynd, at alsamt størri sjóneyka verður sett á ávirkanina, sum býarmenning og bygging hevur á náttúruna, umhvørvið og nærumhvørvið. Einki krav er um, at árinsmetingar skulu gerast í sambandi við vanliga bygging. Formell krøv finnast bert í mun til verkætlanir innan el-framleiðslu – í sambandi við uppsetan av vindmyllum – og í sambandi við verkætlanir á sjónum, og tá ið sjóøki verður fylt upp.

Spurningurin um, í hvønn mun og hvussu árinsmetingar eiga at verða gjørdar, eigur tó at verða viðgjørdur, hvørja ferð kommunan fer í gongd við at inndraga nýtt byggilendi og í gongd við størri byggingar og útstykkingar, og mælt verður tí til, at mannagongdir verða gjørdar hesum viðvíkjandi.

Hetta er eitt arbeiði, sum er málsøki hjá náttúru- og umhvørvisnevndini, og mælt verður tí til, at málið verður reist har.

Umsitingin mælir tí til, at umhvørvisdeildin hjá Tórshavnar kommunu fer undir at gera mannagongdir fyri umhvørvisárinsmetingar í sambandi við býarmenning og bygging í kommununi.

**Skjøl**
25/01683-2 Upprunaliga málslýsingin: Nýtt røktarheim og við røktaríbúðum (jnr. 17/03196)
25/01683-3 Byggiskrá
25/01683-4 Nøkur fyribrigdi í landslagnum á Stórubrekku í Hoyvík
25/01683-11 K02_C08.2_N01 Arbeiðs- og bygningslutafrágreiðingar, lendisarbeiði LARK 28-30

**Tilmæli**
Heilsu- og umsorganarstjórin, miðfyrisitingarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til:

- At nevndin tekur omanfyristandandi málsgongd til eftirtektar, har staðfest verður, at nøktandi kanningar eru gjørdar av økinum, og at neyðugt tí ikki er við fleiri kanningum í ítøkiliga málinum, og harumframt at umsitingin fer undir eina tilgongd at gera mannagongdir fyri umhvørvisárinsmetingar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. januar 2025:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen og Heidi Lava Elgeirsdóttir, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Kári Johansen og Birgir Nielsen, krevur málið fyri býráðið.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 14. januar 2025:** Málið umrøtt.

**Býráðsfundur 30. januar 2025:** Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen løgdu fram broytingaruppskot um at gera umhvørvisárinsmeting í økinum, áðrenn arbeiðið at byggja røktarheim í Stórubrekku fer í gongd.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið fall við fimm atkvøðum fyri, sjey atkvøðum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen, Høgni Vilhelmsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen og Kristianna Winther Poulsen.

Blankt atkvøddi: Guttormur í Skála.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, trimum atkvøðum ímóti og tveimum blankum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Birgir Nielsen og Høgni Vilhelmsen.

**Ískoyti:**
Verkætlanin, Røktarheimið á Stórubrekku, hevur havt lisitatión tann 31. Januar 2025. Fimm arbeiðstakarar bjóðaðu uppá arbeiðið. Hesir vóru Articon, HVT, J&K Petersen, KANJON og MTV Byggivirki.

Tilboðini, sum komu inn, vóru soljóðandi:

| | |
|---|---|
| Articon: | 297.420.971,00 kr. u/mvg |
| HVT: | 327.950.467,00 kr. u/mvg |
| J&K Petersen: | 336.682.229,00 kr. u/mvg |
| KANJON: | 318.590.098,00 kr. u/mvg |
| MTV Byggivirki: | 326.912.935,00 kr. u/mvg |

Umsitingin hjá Tórshavnar kommunu hevur verið í sáttmálasamráðingum við tilboðsveitara, Articon, um verkætlanina Røktarheimið á Stórubrekku. Umsitingin, umboð frá Articon, heildarráðgevi, byggiharraráðgevi og undirráðgevar hava gjøgnumgingið tilboðslistarnar og prosjektið sum heild. Articon hevur nú príssett meir/minniveitingarnar. Talan er um eitt samlað tilboð frá Articon áljóðandi:

**Samlað tilboð frá Articon:** 296.270.627,00 u/mvg

<u>Arbeiðstøkusáttmáli millum Tórshavnar kommunu og Articon</u>
Umsitingin hevur gjørt uppskot til arbeiðstøkusáttmála millum Tórshavnar kommunu og Articon fyri høvuðsarbeiðstøkuni fyri verkætlanina, Røktarheimið á Stórubrekku, sí j. nr 25/01683-16.

Arbeiðstøkusáttmálin millum Tórshavnar kommunu og Articon at byggja nýtt Røktarheim á Stórubrekku er treytaður av, at málið um partshoyring við øllum, sum hartil hoyrir, er liðugt og avklárað, og at málið verður samtykt í øllum avvarandi nevndum í Tórshavnar kommunu.

Mett byggitíð er 2 ár og 8 mánaðir. Arbeiðið at byggja Røktarheimið skal eftir ætlan byrja á vári 2025. Og arbeiðið skal vera liðugt ultimo 2027.

Sáttmáli millum Tórshavnar kommunu og Ráð
Umsitingin hevur gjørt uppskot til sáttmála millum Tórshavnar kommunu og fyritøkuna, Ráð, at standa fyri byggiharraráðgeving og byggileiðslu fyri verkætlanina, Røktarheimið á Stórubrekku, sí j. nr 25/01683-17.

Samlað kostnaðarmeting
Umsiting hevur gjørt ein samlaðan heildarkostnað fyri verkætlanina, Røktarheimið á Stórubrekku. Her er talan um meirvirðisgjald, Lønar- og prísvøkstur(index regulering), óvæntaður kostnað, list og prýði, tryggingarviðurskifti, byggileiðsla, prosjektumsiting, og onnur viðurskifti, sum skal koma afturat HVÙ kostnaði. Samlaða kostnaðarmetingin liggur í málinum, sí j. nr 25/01683-18.

**Upplýsing frá umsitingini**

Partshoyring
Byggimálsdeildin hevur í samráð við Løggdeildina hjá Tórshavnar kommunu sent málið um byggiloyvið á Røktarheimið á Stórubrekku út til partshoyring hjá grannum, sum búgva nærhendis Røktarheiminum á Stórubrekku. Niðurstøða á málinum um partshoyring verður lagt fyri Byggi og býarskipanarnevnd 31.03.2025, og tá verður málið eftir ætlan endaliga avgreitt.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 2775 | LK27012 | Røktarheimið á Stórubrekkur | 2775 | L27012 | Røktarheimið á Stórubrekku | | 50 mió. kr |

**Tilmæli:**
Bygginevndin, heilsu- og umsorganarstjórin, miðfyrisitingarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til:

- at tikið verður undir við fyriliggjandi arbeiðstøkusáttmála millum Tórshavnar kommunu og Articon, og at byggiarbeiðið verður sett í gongd eftir teimum treytum, sum lýst omanfyri, sí j. nr 25/01683-16
- at tikið verður undir við fyriliggjandi sáttmála millum Tórshavnar kommunu og Ráð, sí j. nr 25/01683-17.
- At játtaðar verða 50 mió. kr av LK27012, Røktarheimið á Stórubrekku til L27012, Røktarheimið á Stórubrekku
- at tikið verður undir við fyriliggjandi samlaðu kostnaðarmetingini, sí j. nr 25/01683-18 og at fíggja samlaða kostnaðarmetingina í byggitíðini
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og eldranevndin 27. mars 2025:** Ein meiriluti, Kristianna Winther Poulsen, Annita á Fríðriksmørk, Heidi Lava Elgeirsdóttir og Birgir Nielsen, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Kári Johansen, atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 27. mars 2025:** Samtykt at taka undir við heilsu- og eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari atkvøðu ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála, Sunnvá Dahl Høgfeldt, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

**Ískoyti:**
Í sambandi við langtíðaríløguætlan hjá Tórshavnar kommunu eru 147 mió kr játtaðar í 2026 til verkætlanina, Røktarheimið á Stórubrekku.

Neyðugt er at framflyta 147 mió kr av LK27012, Røktarheimið á Stórubrekku til L27012, Røktarheimið á Stórubrekku.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 2775 | LK27012 | Røktarheimið á Stórubrekkur | 2775 | L27012 | Røktarheimið á Stórubrekku | | 147 mió. kr |

**Tilmæli:**
Bygginevndin, heilsu- og umsorganarstjórin, miðfyrisitingarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til:

- At játtaðar verða 147 mió. kr av LK27012, Røktarheimið á Stórubrekku til L27012, Røktarheimið á Stórubrekku.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og eldranevndin 03. september 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 09. september 2026:** Samtykt at játta 139 mió. kr. av LK27012, Røktarheimið á Stórubrekku til L27012, Røktarheimið á Stórubrekku og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 17. september 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við tólv atkvøðum fyri, einari atkvøðu ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

# 248/26 Alment WC á Hvítanesi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Hvítanesnevndin | 12.03.2025 | 2/25 | 25/03897-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.06.2025 | 93/25 | 25/03897-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 106/25 | 25/03897-1 |
| 4 Hvítanesnevndin | 16.06.2025 | 7/25 | 25/03897-1 |
| 5 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 152/25 | 25/03897-1 |
| 6 Hvítanesnevndin | 23.09.2025 | 10/25 | 25/03897-1 |
| 7 Hvítanesnevndin | 24.02.2026 | 3/26 | 25/03897-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 31.08.2026 | 174/26 | 25/03897-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 09.09.2026 | 169/26 | 25/03897-1 |
| 10 Býráðsfundur | 17.09.2026 | 248/26 | 25/03897-1 |

**Upprunin til málið**
Staðbundna nevndin vísir á, at tað manglar eitt alment vesi á Hvítanesi

**Lýsing av málinum**
Bygdin er nógv vitja av barnagørðum, havdypparum og øðrum. Einki alment VESI er í bygdini.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
Í 2018 varð arbeitt við eini heildarætlan fyri almenn vesir í kommununi – sí mál nr. 18/03758.
Í hesum málinum varð einamest arbeitt við at fáa fleiri almenn vesir í býnum.
Sí yvirskipaðu heildarætlanina fyri almenn vesir í býnum, sí mál nr. 18/03758-11, *almenn wc heildarætlan 25-11-2020.*
Arbeiðið steðgaði upp, tá játtanin varð raðfest til aðra verkætlan.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
18/03758, Almenn wc í Tórshavnar kommunu.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Viðmerkingar frá staðbundnu nevndini:

Trupuleikin lýstur í stuttum
Nógv fólk koma aðrastaðni ifrá, at ganga túr á Hvítanesi. Fleiri koma at ganga túrin runt nesi, og nógv koma at vitja fjørðuna – tað eru serliga skúlar og barnagarðar. Seinastu árini eru fleiri fólk byrja at ”havdyppa” á hvítanesi, og somuleiðis síggja vit ofta útlendskar bilar á sumri steðga omanfyri fjørðuna, at njóta eitt ábit og útsýni.

Einki alment VESI er á Hvítanesi. VESI nýtast ikki at standa í hvørjari bygd og á hvørjum horni, men vit halda, at nógv talar fyri, at júst á Hvítanesi skal mann seta pengar av til eitt alment VESI. Tá fólk ganga oman á Hvítanes, ella taka bussin, so er mann eitt sindur avskorin fyri møguleikanum at koma á eitt VESI. Fyri kommununa vil tað eisini siga, at kommunan betrar um møguleikan hjá stovnum og skúlum at gera eina upplagda útflugt til Hvítanes við brúk av busleiðini.

Tað skal tó viðmerkjast, at fyri júst barnagarðar og skúlar, so royna vit í nevndini, at gera skúlan tøkan fyri fólk at fara inn í, ma. fyri at sleppa á VESI, men tað er bert um onkur kennur okkum og ringjur til okkum privat. Vit eru kunna um, at tað skuldi verið ein lykil á rundferð millum onkrar stovnar, fyri at

sleppa inn á skúlan, og sum hendur kann fáast á, við at seta seg í samband við Snarskivuna. Vit kenna ikki til hesa avtalu. Í øllum førum vil eitt alment VESI hjálpa uppá hettar.

Nærri loysnir.
Vit halda, at tann upplagda staðsetingin er oman móti lendingini, antin omanfyri ella niðanfyri nestini. Kann evt byggjast saman við skiftirúminum hjá havdypparinum, sum er komi at standa oman móti lendingini. Soleiðis kann VESI skipast sum eitt mál fyri seg, og staðsetingin passar best fyri tey vitjandi í bygdini.

Um kloak og onnur viðurskiftið gera hettar trupult, so kann onnur staðseting finnast, sum er í tráð við átaksætlanina fyri økið um fjørðuna, men so má tað verður partur av eini stórri ætlan, standa í økinum norðan fyri fjørðuna, og tá mugu nógv viðurskifti koma uppá pláss.

**Skjøl**
- 18/03758-11, *almenn wc heildarætlan 25-11-2020*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Málið verður umrøtt við tí endamálið at finna útav, um málið skal raðfestast.

**Hvítanesnevndin 12. mars 2025:** Umrøtt. Finna eina loysn við wc-inum í skúlanum og at reingerðin verður skipað.

**Ískoyti**
Bygningsdeildin hevur gjørt uppskot til innrætting av almennum WC í skúlanum. Í hesum sambandi verður skotið upp, at verandi tvey WC´ir verða gjørd um til eitt WC, sum lýkur plásskravið um WC til rørslutarnað. Samstundis er neyðugt at asfaltera tún og parkeringspláss, soleiðis at WC verður gjørt atkomuligt fyri rørslutarnað.

Skúlin verður ma. brúktur til veitslur og annað virksemi, sum bygdafólkið skipar fyri. Í samskifti millum bygningsraksturin hjá kommununi og hvítanesnevndina er sett fram ynski um dagføring/nýgerð av køkinum. Køkurin er við í uppskotinum til broyting av innrætting í skúlanum, og samlaða loysnin í skúlanum er leysliga kostnaðarmett.

Bygningsdeildin hevur ábyrgdina av og ber rakstrarkostnaðin av reingerð av almennum WC´um.

Av tí at gl.skúlin á Hvítanesi ikki er serliga sjónliga staðsettur í bygdini, so verður mælt til, at skelti verður sett upp í bygdini, sum upplýsir at alment vesi er í gl. Skúlanum. Hetta eigur at verða gjørt samstundis sum at vesið verður innrættað.

**Skjøl**
jnr. 18/03758-3 TekningAlmentWCáHvítanesi 21-05-2025

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
Av tí at eingin uppløgd játtan er tøk til at gera køk inni í skúlanum, verður mælt til, í fyrsta umfarið at fara undir at gera atkomuligt alment wc í skúlanum, og at játtan til at innrætta køk í skúlanum verður raðfest á fíggjarætlanini 2026.

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 6275 | | Fríðkan, bygdir og økir |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 6275 | | | Alment WC á Hvítanesi |

| **Upphædd** |
|---|
| 225.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 225.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 40.000 |

**Tilmæli:**
Tekniski Stjóri, Býararkitekturin og leiðarin á Bygningsdeildini mæla til:

- at gera WC til rørslutarnað við túni og rampu, sambært tekning, og at játta kr. 225.000 av kt. 6275, LK62998, Fríðkan bygdir og økir, á nýggja verkætlan undir kt. 6275 til hetta,
- at skeltið verður sett upp í bygdini, sum vísir til vesið,
- at játtan áljóðandi kr. 175.000 verður raðfest á Fíggjarætlanini 2026 til at gera køkin í skúlanum. at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Hvítanesnevndin 16. juni 2025:** Kunnað varð um málið.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá tekniska stjóranum, býararkitektinum og leiðarinum á Bygningsdeildini.

**Ískoyti:**
Kunning til fund í Hvítanesnevndini 23.09.2025: Bygningsdeildin hevur biðið tvær fyritøkur um tilboð upp á WC og atkomuviðurskifti í túninum. Eftir ætlan verða tilboðini latin upp í viku 43, og arbeiðið byrjar væntandi stutt eftir hetta.

**Hvítanesnevndin 23. september 2025**: Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Arbeiðið er byrjað. Avtalað er, at arbeiðið verður liðugt ultimo mai.

**Hvítanesnevndin 24. februar 2026:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**
Verkætlanin "Alment WC á Hvítanesi" er komin væl ávegis, og vesið er liðugt.
Men fyri at tryggja, at koyristólar lættliga kunnu koma til vesið, so er tørvur á at gera túnið gott at koyra á. Mælt verður til, at túnið verður asfalterað. Harumframt manglar at verða gjørt reint eftir bygging, umframt at neyðugt er at montera El-lás á innaru hurðina.

Mett verður, at arbeiðini, sum mangla at verða gjørd, koma at kosta uml. Kr. 130.000. Av tí at upprunaliga játtanin til arbeiðið ikki strekkur til hesi síðstu arbeiðini, so verður mælt til at hækka játtanina við kr. 130.000.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 6275 | LK62998 | Fríðkan, bygdir og økir |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 6275 | L62065 | Alment WC á Hvítanesi | |

| **Upphædd** |
|---|
| 130.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 355.000 |
| Áður játtað | Upphædd: | 225.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 40.000 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri, Býararkitekturin og leiðarin á Bygningsdeildini mæla til:

- at írestandi arbeiðir verða raðfest, og at játtaðar verða kr. 130.000 av kt. 6275, LK62998, Fríðkan, bygdir og økir, á kt 6275, L62065, Alment WC á Hvítanesi,
- og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. august 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 09. september 2026:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 17. september 2026:** Einmælt samtykt.

# 249/26 Bilfríir dagar í miðbýnum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.06.2026 | 141/26 | 26/04235-4 |
| 2 Tekniska nevnd | 01.06.2026 | 74/26 | 26/04235-4 |
| 3 Ferðslunevndin | 08.06.2026 | 10/26 | 26/04235-4 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.06.2026 | 161/26 | 26/04235-4 |
| 5 Tekniska nevnd | 07.09.2026 | 84/26 | 26/04235-4 |
| 6 Vinnunevndin | 07.09.2026 | 25/26 | 26/04235-4 |
| 7 Fíggjarnevndin | 09.09.2026 | 170/26 | 26/04235-4 |
| 8 Býráðsfundur | 17.09.2026 | 249/26 | 26/04235-4 |
| 9 Býráðsfundur | | | 26/04235-4 |

**Upprunin til málið**
Samgongan hevur ynski um, at gongugøtan, Niels Finsens gøta, frá Ráðhúsinum og niðan í Steinatún, verður ferðslufrí og eitt gott øki til frið og samveru í ávís tíðarskeið um summarhálvuna og vetrarhálvuna. Tað skal einans verða koyrandi av Tinghúsvegnum oman til Tórsgøtu umvegis Sverrisgøtu.

**Lýsing av málinum**
Seinastu árini hava verið ymisk átøk í handilsgøtuni, serliga er afturvendandi árliga tiltakið Jólabýurin í desember mánaði. Tílík átøk savna borgarar og skapa lív í miðbýnum ávís tíðarskeið, men fyri at tílík tiltøk kunnu lata seg gera, er neyðugt at sperra økið fyri almenna ferðslu í ávísum tíðarskeiðum. Ynskiligt er, at gongugøtan skiftir ham, alt eftir um talan er um summar ella vetur, eitt nú í juli og desember mánaði.

At byrja við verður mett ráðiligt, at gongugøtan verður stongd fyri almennari ferðslu ein mánað um summarið og ein mánað um veturin, t.e. í juli og desembur. Fyri at átakið skal eydnast, er týdningarmikið, at gongugøtan verður virkin í ávísu tíðarskeiðunum, tá hon verður stongd.

Mett verður ráðiligt, at tá gongugøtan verður stongd, verða ymisk tiltøk skipað, hetta fyri at draga borgarar oman í býin og fyri skipa gongugøtuna við øðrum enn til bilar.
Tað er sjálvandi sera týdningarmikið at tiltøkini taka atlit til, at vørukoyring letur seg gera, t.d. avmarkað tíðarskeið, umframt at hýruvognar fáa avsett øki til teirra virksemið.

Men fyri at hetta skal kunna lata seg gera, verður mælt til, og er tað sera týdningarmikið, at tey virkandi í gongugøtuni verða hoyrd og kunnað, og møguliga kunnu tey luttaka við ávísum virksemi á gongugøtuni ávísu tíðarskeiðini. Eisini er hugsað, at Miðbýarfelagið skal takast við upp á ráð, tí tað kann eisini vísa seg, at ávíst virksemi í miðbýnum hevur áhugað í at luttaka í hesum tiltakinum.

Tað er serliga kent uttanlands, at handils miðbýarfeløg í felag standa saman um at skipa fyri ymiskum tiltøkum, soleiðis at borgarar verða drignir í býin at uppihalda sær. Eisini síggja vit nakað líknandi á eitt nú torginum í SMS, og tá einstakir handlar skipa fyri serligum døgum til frama fyri at draga fólk til teirra handil.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
Kommunan royndi nakað líknandi í 2022, í sambandi við at Vágsbotntorgið varð skipað til eitt økið til trivnað og uppihald. Í summarhálvuni varð samskipari settur at skipa fyri ymiskum tiltøkum á Vágsbotntorginum, soleiðis at torgið kundi inntakast til ymisk endamál. Tað var Visit Tórshavn, sum saman

við tíðarsetta samskiparanum stóð fyri at samskipa tiltøkini, soleiðis at økið varð í brúk. Hetta varð sera væl eydnað og vóru borgarar sum heild sera væl nøgdir við ymisku tiltøkini. Eftirfylgjandi síggja vit eisini, at ávísir felagsskapir hava gjørt til vana at brúka Vágsbotntorgið til teirra tiltøk.

Tvey byggimál eru ávegis á matr. nr. 369 og 370, Tórshavn, Sverrisgøta 11 og 12. Tað kann hugsast, at verkætlanirnar verða settar í verk tvørtur um summarið. Umsøkjari er spurdur, um verkætlanin kemur at ávirka ferðsluna á Sverrisgøtu í byggitíðarskeiðinum, og var svarið, at tað er heilt óbetýðiligt, tí tað verður ikki neyðugt at steingja vegin av í byggitíðarskeiðinum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
22/01036, Menning av Vágsbotni

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Málið er viðgjørt og avrátt millum Stjórnarskrivstovuna, Teknisku deild, Býarskipanardeildina og Visit Tórshavn.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
-

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
Av tí at talan er um eina verkætlan, sum fevnir um at aktivera gongugøtuna, verður mælt til, at Visit Tórshavn stendur fyri átakinum, og at játtanin so statt verður flutt teimum at handfara.

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6275 | LK62999 | Fríðkan av býnum | 7312 | | Vinnutiltøk | | 300.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 300.000 |
| Áður játtað | Upphædd: | 0 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 0 |

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- at gongugøtan, N. Finsensgøtu, frá Káta Horninum til og við Vaglið, verður stongd í tíðarskeiðinum juli 2026 og desember 2026, sum ein roynd fyri at økja um trivnaðin hjá borgarum, ábæru ferðsluni og vinnuni í býnum,
- at økið verður skipað, soleiðis at vøruvognar sleppa til handlar o.a. virksemi við vørukoyring ávís tíðarskeið á degnum,
- at økið verður sett av til hýruvognar millum ráðhúsið og Havnará
- at Visit Tórshavn stendur fyri at samskipa tiltakið/verkætlanina, og í hesum sambandinum somuleiðis stendur fyri at kunna og hoyra vinnuna í miðbýnum,
- at kr. 300.000 verða játtaðar av kt. 6275 Fríðkan av kommununi (íløgur), løgukarmi LK62999, Fríðkan av býnum til kt. 7312, Vinnutiltøk,

- at málið verður lagt fyri nevnd aftur, tá tiltøkini hava verið, við eini eftirmeting, um verkætlanin skal endurtakast í 2027,
- at málið verður beint í býráðið til tvær viðgerðir umvegis teknisku nevnd, ferðslunevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. juni 2026:** Málið útsett.

**Tekniska nevnd 01. juni 2026:** Málið útsett. Nevndin ynskir, at umsitingin hoyrir vinnuna, og at málið verður beint í vinnunevndina.

**Ískoyti:**
Til umrøðu í ferðslunevndini.

**Ferðslunevndin 08. juni 2026:** Málið umrøtt.

**Ískoyti:**
Av tí at tað er avmarkað við tíð til at gera neyðugu fyrireikingarnar, umframt at ymiskar um- og nýbyggingar verða framdar í miðbýnum yvir summarið, so verður ikki mett ráðiligt at raðfesta átakið at gera miðbýin bilfrían í summar 2026.

Harafturímóti, so verður mælt til, at umrødda økið verður bilfrítt í vetur í sambandi við Jól í miðbýnum, og í summar 2027. Fyrireikingararbeiðið skal setast á breddan, væl áðrenn vegirnir verða stongdir, soleiðis at virkandi í økinum hava stundir at fyrireika seg til átakið, og soleiðis at Visit Tórshavn hevur stundir at fyrireika ítøkiligu átøkini væl áðrenn.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Sak** | **Upphædd** |
| 6275 | LK62999 | Fríðkan av býnum | 7312 | | Vinnutiltøk | Jól í miðbýnum | 300.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 300.000 |
| Áður játtað | Upphædd: | 0 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 0 |

Viðv. fíggingini til átakið summar 2027 verður mælt til, at fígging verður raðfest til hetta á fíggjarætlanini 2027.

**Tilmæli**:

Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- at útseta átakið, bilfríir dagar í miðbýnum til í vetur 2026 og summar 2027
- at gongugøtan, N. Finsensgøtu, frá Káta Horninum til og við Vaglið, verður stongd í tíðarskeiðinum desember 2026 og juli 2027, sum ein roynd fyri at økja um trivnaðin hjá borgarum, ábæru ferðsluni og vinnuni í býnum,
- at økið verður skipað, soleiðis at vøruvognar sleppa til handlar o.a. virksemi við vørukoyring ávís tíðarskeið á degnum,
- at økið verður sett av til hýruvognar millum ráðhúsið og Havnará
- at Visit Tórshavn stendur fyri at samskipa tiltøkini/verkætlanina, og í hesum sambandinum somuleiðis stendur fyri at kunna og hoyra vinnuna í miðbýnum,
- at kr. 300.000 verða játtaðar av kt. 6275 Fríðkan av kommununi (íløgur), løgukarmi LK62999, Fríðkan av býnum til kt. 7312, Vinnutiltøk,
- at málið verður lagt fyri nevnd aftur, tá tiltøkini hava verið, við eini eftirmeting,
- at málið verður beint í býráðið til tvær viðgerðir umvegis teknisku nevnd, vinnunevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. juni 2026:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen og Høgni Vilhelmsen, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir umvegis teknisku nevnd, vinnunevndina og fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur støðu á seinni fundi.

Heidi Lava Elgeirsdóttir var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Tekniska nevnd 07. september 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, treytað av at møguleiki verður hjá hýruvognum at tæna borgarum optimalt á Vaglinum, og at vegforðingin verður sett beint við standmyndina av Sóparanum, og at skeltið verður blendað.

Tróndur Sigurðsson tekur ikki undir við tilmælinum.

**Vinnunevndin 07. september 2026:** Samtykt at taka undir við byggi- og býrarskipanarnevndini og teknisku nevnd.

**Fíggjarnevndin 09. september 2026:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Kári Johansen tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 17. september 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við fyrstu viðgerð við ellivu atkvøðum fyri, tveimum atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

# 250/26 Torg á Argjum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 31.08.2026 | 183/26 | 26/03292-5 |
| 2 Fíggjarnevndin | 09.09.2026 | 171/26 | 26/03292-5 |
| 3 Býráðsfundur | 17.09.2026 | 250/26 | 26/03292-5 |

**Upprunin til málið**
9. maj 2028 fyllir Argja bygd 200 ár. Í hesum sambandi er ynskiligt, at øki verður sett av til eitt torg/tilhaldsstað, har borgarar á Argjum kunnu savnast, og at torgið kemur at virka í gerandisdegnum eins og til høgtíðir.

**Lýsing av málinum**
Nógv er hent á Argjum hesi seinastu 200 árini, bygdin er vaksin til ein sjálvstøðugan part av Havnini, fólk flyta til, og gerandislívið blómar við barnagørðum, skúlum, frítíðartilboðum osfr.

Á Argjum er tó einki veruligt torg/uppihaldstað, sum saman við hentleikunum á Argjum annars virkar sum miðsavningarstað fyri býarpartin.

Greining sum grundarlag undir víðari arbeiði
Tørvur er á einari yvirskipaðari greining av Argjum, fyri at fáa eitt haldgott grundarlag undir at meta um, hvar eitt møguligt torg hóskar seg best at verða staðsett.
Greiningin skal lýsa, hvussu eitt torg kann laga seg til samleikan, virksemið og umhvørvið á staðnum. Harumframt skal hon geva kommununi eitt fakliga væl grundað grundarlag undir einari avgerð um staðsetingina.

Tað er týdningarmikið, at hugt verður at virkseminum í økinum og teimum bólkum, ið kunnu væntast at nýta torgið í gerandisdegnum, eitt nú til spæl og uppihald. Eisini eigur at verða greinað, hvør samleikin og leikluturin hjá torginum skal vera.
Hugtakið „torg“ kann geva ábendingar um eitt hátíðarligt stað, ið verður nýtt til størri almenn tiltøk. Mett verður tó ikki, at eitt torg á Argjum ella aðra staðni í kommununi eigur at taka størri hátíðarhald og tiltøk, sum vanliga verða hildin í miðbýnum. Tað er týdningarmikið, at miðbýurin framhaldandi varðveitir sín leiklut sum karmur um týðandi felags tiltøk.

Ynski er eisini, at greiningin fevnir um gøtusambondini á Argjum og lýsir, hvussu ymisku økini kunnu knýtast betur saman. Tá ið ein staðseting er vald, eigur at verða víst á tær gøtur og leiðir, ið kunnu knýta torgið at øðrum týðandi økjum á Argjum.

Tí er týdningarmikið at gera eina yvirskipaða greining, sum kortleggur og lýsir:
• hvar eitt torg hóskar best at verða staðsett á Argjum
• hvat slag av torgi talan eigur at vera um
• hvørjar funktiónir torgið skal hava
• hvønn týdning torgið skal hava fyri argjafólk
• hvussu torgið kann knýtast at øðrum týðandi støðum og uppihaldsøkjum.

Fleiri støð á Argjum kunnu vera hóskandi til eitt torg ella annað alment uppihaldsøki. Fleiri øki kunnu vera viðkomandi og hava ymiskar funktiónir. Greiningin skal tí eisini gera tað møguligt at raðfesta arbeiðið og mæla til, hvørjum øki farið eigur at verða undir fyrst, umframt at vísa á møguleikar fyri seinni at menna onnur øki.

Greiningin kann soleiðis verða grundarlag undir framtíðar avgerðum um sambond, uppihaldsøki og yvirskipaðu heildarmenningina av Argjum.

Umsitingin hevur verið í sambandi við Lofti Arkitektar og Arkitektar 99 um at koma við eini kostnaðarmeting fyri greiningararbeiðið, sum eftirfylgjandi skal leiða til eina disponering og innrætting av útvalda økinum. Metti kostnaðurin fyri hetta arbeiðið er kr. 250.000.

**Lógir, ásetingar o.a.**
**-**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Heilt yvirskipað er visjónin at skipa eitt torg, ið kann nýtast til ymisk endamál. Ætlanin er at skapa eitt fjølbroytt býarrúm, sum kann vera karmur um bæði smærri og størri tiltøk og samstundis verða eitt natúrligt savningarstað í gerandisdegnum.

Hetta er einans fyrsta fasa av verkætlanini. Um farið verður víðari við verkætlanini, so skal verkætlanin prosjekterast, kostnaðarmetast, bjóðast út til bygging og byggjast.

Verður farið undir arbeiðið at gera torgið, er tað ynskiligt, at tað stendur liðugt 9. mai 2028.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Verður eitt torg gjørt við gamla Argja skúla, vísir Tekniska deild á, at eitt nýtt bussteðgipláss eigur at verða gjørt á Argjavegi oman fyri skúlan. Harumframt vísir Bygningsdeildin á, at tørvur er á einum skúri til ymisk endamál hjá frítíðarskúlanum og gula skúla.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
-

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
Fyri at seta innleiðandi kanningar/greiningar og ger av skipanaruppskotið í gongd, verður mælt til at ein játtan verður sett av til arbeiðið.

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | Játtast á: | |
|---|---|---|

| Deild | Verk-ætlan | Navn |
|---|---|---|
| 6275 | LK62999 | Fríðkan av býnum |

| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |
|---|---|---|---|
| 6275 | | | Torg á Argjum |

| Upphædd |
|---|
| 250.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 250.000 |
| Áður játtað | Upphædd: | 0 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2026-2028 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | ? |

**Tilmæli**:
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til, at:

- Heimila umsitingini at seta greiningararbeiðið av Argjum á breddan, soleiðis at ein endalig staðseting av nýggjum býartorgi á Argjum verður nágreina, og eftirfylgjandi at seta arbeiðið at gera skipanaruppskot í gongd,
- Játtaðar verða kr. 250.000 av kt. 6275, LK62999, Fríðkan av býnum á nýggja verkætlan undir kt. 6275.
- Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. august 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við tí nágreinan, at greiningararbeiðið eisini fevnir um at tosa við staðbundin umboð.

**Fíggjarnevndin 09. september 2026:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 17. september 2026:** Einmælt samtykt.

# 251/26 Ábøtur á kirkjugarðin við Velbastaðvegin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 31.08.2026 | 186/26 | 26/05626-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 09.09.2026 | 172/26 | 26/05626-1 |
| 3 Býráðsfundur | 17.09.2026 | 251/26 | 26/05626-1 |

**Upprunin til málið**
Partur av øki M í Kirkjugarðinum við Velbastaðvegin, sum er nýggjasta økið í kirkjugarðinum hevur brek, sum neyðug eru at umvæla, soleiðis at gravarøkið kann takast í brúk.

**Lýsing av málinum**
Vatn á økinum rennur ikki frá í neyðugan mun, umframt at yvirflatuvatnið og frá koyribreytunum ikki rennur í ristirnar, men inn yvir gravarøkið, og er gravarøkið í niðasta parti av øki M tí sera vátt og kann ikki brúkast sum er.

Av tí at tað er so mikið langt fráliðið síðani verkætlanin, *mál nr. 14/02585, Kirkjugarðurin við Velbastaðvegin - víðkan av gravøki móti Sandá,* varð handað kommununi, uttan at brekið hevur verið ávíst, er einki at koma eftir í sambandi við at fáa arbeiðstakaran at seta økið í nøktandi stand.
Harumframt er tað væl hugsandi, at standurin helst er grundaður á sparingar í verkætlanartilgongdini, sum Tórshavnar kommuna eigur ábyrgdina av.

Neyðugt er tí at fara undir at gera ábøturnar, soleiðis at moldfyllan er við hóskandi tilfarssamanseting, og soleiðis at frárenningin undan økinum verður nøktandi.
Fyri at fáa gravarøkið í nøktandi stand, soleiðis at tað kann brúkast, verður neyðugt at grava moldina uppaftur og skifta hana út við hóskandi samanseting, soleiðis at vatn setur frá gravunum, umframt at vatnið frá koyribreytunum eisini skal beinast í vegristirnar.
Nógva yvirflatuvatnið hevur eisini gjørt skaða á gøturnar, so neyðugt er somuleiðis at gera ábøtur og broytingar á gøturnar í hesum økinum.
Støddin á samlaða økinum, ið má gerast umaftur, er uml. 2500 $m^2$, har fyrsta stigið fevnir um smáar 700 $m^2$.

Leysliga mett er kostnaðurin fyri alt arbeiðið arbeiðið 5,4 mió kr, men vit mæla til at gera øki M1 og M2 fyrst, og eftirmeta úrslitið, áðrenn farið verður víðari. Neyðugt er at játta 2,0 mió. kr. til at gera øki M1 og M2.
Tá ið úrslitið av umvæling av øki M1 og M2 er greitt, verður støða tikin til, um játtan skal fáast til vega til øki M3-M6 eisini.

Ætlanin er at bjóða arbeiðið út í innbodnari útbjóðing, har vegna stødd á arbeinum verður mælt til at bjóða arbeiðið út til arbeiðstakarar, sum hava royndir við at kirkjugarðsarbeiði.

Moldin, ið grivin verður burtur, verður løgd oman á vallgarðin móti Sandá, soleiðis at vallgarðurin móti Sandá heldur áfram á sama hátt sum vallgarðurin er framvið Glyvursvegi, og harvið eisini er betri vardur fyri veðrið.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Kirkjugarðurin er í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu í økisásetingini D1 í 3. grundumráði, sum er ætlað til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál.

**Upplýsingar frá umsitingini**

Umsitingin hevur kannað lendið, sum vísir seg at vera sera vátt ,og er tað týðuligt, at vatnið ikki rennur frá í nøktandi mun.

Tað er týdningarmikið, at vatnið somuleiðis verður veitt í frárenningarnar í vegnum, og tískil er neyðugt, at gera laðingar framvið vegnum. Hetta kann somuleiðis verða við til at minka um avbjóðingarnar í gravaraøkinum.

Av tí at kirkjugarðar skulu standa 1-2 ár, eftir at arbeiðið er liðugt, og áðrenn økið kann takast í brúk, so er týdningarmikið at hetta arbeiðið verður raðfest skjótast gjørligt. Tískil verður mælt til, at játtan til arbeiðið verður raðfest í Fíggjarætlanini 2027.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Mál nr. 14/02585, *Kirkjugarðurin við Velbastaðvegin - víðkan av gravøki móti Sandá*

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Málið hevur ikki verið til viðmerkingar á øðrum deildum.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
Skjal nr. 26/05626-2 Kortskjal í kirkjugarðin við Velbastaðvegin 2026

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
Samlaða verkætlanin verður mett at kosta kr. 6.000.000, men tørvur er at á, at metti kostnaðurin fyri M1 og M2 á kr. 2.000.000 verður raðfestur í sambandi við fíggjarætlanina 2027.

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:

- at heimila umsitingini at fyrireika og bjóða arbeiðið út í innbodnari útbjóðing,
- at kr. 2.000.000 verða raðfestar á kt. 6575, Kirkjugarðar, á Fíggjarætlanini 2027,
- at komið verður aftur í nevnd, tá tøk játtan er til arbeiðið,
- at arbeiðið við øki M3-M6 verður raðfest, tá ið eftirmeting av umvælingunum av M1 og M2 er gjørd,
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. august 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við tí viðmerking at minst 5 fyritøkur verða bodnar við.

**Fíggjarnevndin 09. september 2026:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 17. september 2026:** Einmælt samtykt.

# 252/26 Broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 200a og 42i, Argir. Frá D1 til A1 og frá A1 til D1

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 31.08.2026 | 178/26 | 26/04480-1 |
| 2 Býráðsfundur | 17.09.2026 | 252/26 | 26/04480-1 |

**Upprunin til málið**
Á býráðsfundi 24. apríl 2024 varð samtykt at gera gerðabýti millum matr. nr. 42i, Argir, sum er privat og matr. nr. 200a, Argir, sum er kommunal, sí mál 23/03517 - *Byggiverkætlan á matr. nr. 40g, 40h, 40l og 42l, Argir, Heiðagøta*.

**Lýsing av málinum**
Í sambandi við eina byggiverkætlan ynskir eigarain av 42i, Argir at gera eitt gerðabýti við Tórshavnar kommunu, soleiðis at hann fær lendi burtur av matr. nr. 200a og 200e hjá kommununi, móti at kommunan fær lendi frá honum, burtur av matr. nr. 42i, Argir.

Sambært ætlanini fær umsøkjarin 579 $m^2$ av matr. nr. 200a og 200e frá kommununi, meðan kommunan fær 903 $m^2$ av matr. nr. 42i frá umsøkjaranum, sí skjal 26/04480-2 – *Støðumynd_Gerðabýti.*

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

- Umráðisparturin verður lagdur til stakhús. Eftir serloyvi frá byggivaldinum kunnu eisini byggjast tvíhús, raðhús og tílíkir bústaðir fyri eitt húski. Stakhús og tvíhús kunnu eisini hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.

Ásetingar fyri D1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

- Umráðisparturin verður lagdur til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Umsitingin metir, at talan er um eitt skilagott gerðabýti, av tí at kommunan kemur at eiga tann partin av matr. nr. 42i, har áin, sum somuleiðis er partur av fríøkinum á matr. nr. 200a og 200e, liggur.

Um gerðabýti skal kunna fremjast, er neyðugt at broyta byggisamtyktina til umráðispart A1 fyri tann partin, sum umsøkjari fær, og til D1 fyri tann partin, sum kommunan fær.

Í sambandi við uppskot um broyting av almennu byggisamtyktini í økinum, verður somuleiðis mælt til at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 200e, Argir, sum kommunan í samráð við grannalagið er í holt við at menna sum fríøki. Sí uppskot til byggisamtyktarbroytingar á skjali 26/04480-4 – *Byggisamtykt – eftir broyting.*

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- 25/05033 – *Umsókn frá Valbjørn Dalsgarð um byggiverkætlan á matr. nr. 42i, 40g, 40h og 40i – 23/03517.*
- 25/00401 – *Uppskot til fríøki á matr. nr. 200a, Argir – 23/05950.*

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**

- 26/04480-2 – *Støðumynd_Gerðabýti.*
- 26/04480-4 – *Byggisamtykt – áðrenn broyting.*
- 26/04480-4 – *Byggisamtykt – eftir broyting.*

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta almennu byggisamtyktina fyri matr. nr. 200e, 200a og 42i, Argir, sambært skjalinum 26/04480-4 – *Byggisamtykt – eftir broyting,* og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. august 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 17. september 2026:** Einmælt samtykt.

# 253/26 Útbjóðing av matr. nr. 203c í Kollafirði til raðhúsa- ella íbúðarbygging - 21/02624

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.06.2025 | 107/25 | 25/06231-2 |
| 2 Tekniska nevnd | 10.06.2025 | 42/25 | 25/06231-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 108/25 | 25/06231-2 |
| 4 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 155/25 | 25/06231-2 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 21.11.2025 | 182/25 | 25/06231-2 |
| 6 Fíggjarnevndin | 03.12.2025 | 226/25 | 25/06231-2 |
| 7 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 277/25 | 25/06231-2 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.04.2026 | 87/26 | 25/06231-2 |
| 9 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 120/26 | 25/06231-2 |
| 10 Kollafjarðarnevndin | 09.06.2026 | 8/26 | 25/06231-2 |
| 11 Býráðsfundur | 05.05.2026 | 153/26 | 25/06231-2 |
| 12 Byggi- og býarskipanarnevndin | 31.08.2026 | 185/26 | 25/06231-2 |
| 13 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.09.2026 | 198/26 | 25/06231-2 |
| 14 Býráðsfundur | 17.09.2026 | 253/26 | 25/06231-2 |

**Upprunin til málið**
Hetta mál er framhald av máli nr. 21/02624, Útbjóðing av matr. nr. 203c í Kollafirði til raðhúsa- ella íbúðarbygging.
Gamla málslýsingin sæst í viðhefta skjali, *j.nr. 25/06231-3, Mál nr. 21_02624-2_Málslýsing_Útbjóðing av matr. nr 203c.*

**Lýsing av málinum**
Matr. nr. 203c bleiv í 2021 boðin út til raðhúsa- og/ella íbúðarbygging. Eitt tilboð varð móttikið, og varð tað samtykt at selja tilboðsveitara stykkið til raðhúsa- og íbúðarbygging. Men samráðingarnar rukku ikki á mál, og tí varð tilboðið avlýst.

Síðani varð økið boðið út í tveimum umførum í 2022, men grundað á, at eingi tilboð komu inn, varð samtykt at skipa økið til sethús, umframt at keypa nakað av lendi frá grannaognunum, soleiðis at sethúsaútstykkingin kundi skipast við grundstykkjum á 400 fermetar. Samráðingarnar við grannaognirnar komu væl ávegis, og økið varð boðið út til sethús.

Kommunan móttók tvey tilboð upp á at gera útstykkingina. Hallur Hansen, entreprenørur sp/f, vann útboðið, men grundað á, at kostnaðurin á sethúsastykkjunum gjørdist ov høgur, varð samtykt í býráðnum, at selja grundstykkini fyri kr. 500.000 pr. stk, og at játta kr. 2.500.000 fyri at fíggja írestandi fígging, sum kom at mangla í.

Kommunala eftirlitið tók málið upp og kom til ta niðurstøðu, at kommunur ikki kunnu fara undir útstykkingar, um tað frammanundan er greitt, at útstykkingin ikki kemur at hanga saman fíggjarliga og tær tí koma at áleggja skattgjaldaranum eyka útreiðslur

Samtyktin í býráðnum er tí ikki í samsvari við niðurstøðurnar frá kommunala eftirlitinum. Av hesi orsøk verður mælt til, at útboðið verður annullerað, og arbeiðstakarin loystur úr sínum skyldum mótvegis Tórshavnar kommunu, og møguligt endurgjald veitt honum í hesum sambandi.

Á várið 2025 varð arbeiðsbólkur settur at vísa á 7-10 átøk, sum kunnu gera sítt til at fremja málið um, at fleiri bústaðir verða bygdir komandi árini. Í hesum arbeiðinum lýsti átak E, at kommunur skuldu fáa loyvi til partvís at rinda fyri byggibúning. Tí verður mælt til, at farið verður aftur til upprunaætlanina við økinum, og

harvið undir enn eina roynd at bjóða matr. nr. 203c út til bygging av raðhúsa- og/ella íbúðarbygging, har kommunan antin áðrenn ella samstundis luttekur í at skipa og gera vegin í økinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Nýggj serstøk byggisamtykt skal gerast fyri økið, tá ætlanin fyri økið er góðkend, og verandi serstaka byggisamtyktin, *SB_Kollafjørður_Lygnnes_2011_2_2011*, skal avtakast.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Málið eigur at verða lagt fyri staðbundnu nevndina í Kollafirði til kunningar, tá tað er samtykt í býráðnum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
*j.nr. 25/06231-3, Mál nr. 21_02624-2_Málslýsing_Útbjóðing av matr. nr 203c*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei
Í núverandi støðu eru ongar fíggjarligar avleiðingar av málinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- At verandi útboð til sethúsaútstykking verður avlýst, og arbeiðstakarin loystur úr sínum skyldum og møguligt endurgjald verður latið.
- At nýtt útboð fyri matr. nr. 203c verður skipað til bygging av íbúðum og/ella raðhúsum.
- At málið verður beint í býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 10. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og at málið verður lagt fyri nevndina aftur til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Borgarstjórin setti fram soljóðandi broytingaruppskot:

Tikið verður undir við fíggjarnevndini við teirri broyting, at gjørdar verða keypsavtalur við ognararnar av matr. 209a, 308 og 309, og at játta upp til kr. 410.000 alt eftir endaligu fermetrunum íroknað tinglýsing og matrikulering av løgukontu L64022 útstykking Lygnnes.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið.

Fyri broytingaruppskotinum atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen, Astrið Breckmann og Hildur Eyðunsdóttir.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

Málið varð, soleiðis broytt, samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongari atkvøðu ímóti og einari blankari atkvøðu.

**Ískoyti:**
Samráðingar hava verið við ymisku eigararnar av lendi niðanfyri matr. nr. 203c, Kollafjørður.

Viðvíkjandi matr.nr. 308
Søla av uml. 68 m², sum verður lagt afturat matr.nr. 308.
Keyp av uml. 418m², sum verður lagt afturat matr.nr. 203c.
Kostnaðurin fyri hetta er áljóðandi: netto 350 m² x 350 kr/m² = 122.500 kr.
Samstundis søkir eigari av matr.nr. 308, um sundurbýti av einum grundstykki á 500 $m^2$ burturav matr.nr. 308.

Viðvíkjandi matr. nr. 309
Keyp av uml. 971 m² av matr. nr. 309, sum verður lagt saman við matr.nr. 203c.
Kostnaðurin fyri hetta er áljóðandi: 971m² x 350 kr/m² = 339.850 kr.

Samlaður netto keypsprísur: 122.00 kr + 339.850 kr = **462.350 kr.**

Neyðugt verður harumframt at leggja upp fyri útreiðslum til matrikulering og tinglýsing v.m., mettar útreiðslur.

Leyslig útrokning av kostnaði til matrikulering:

| | |
|---|---|
| Grundgjald | 4.000,00 |
| 3. frábýttir lutir ( 3.000 x 3 ) = | 9.000,00 |
| Gjald fyri virði 2 % av 1.427 m² á 350 kr. m² = | 9.989,00 |
| Tilsamans | 22.989,00 |

Tinglýsingargjald:
Tinglýsing: 1 % + kr. av hvørjum skeyti

Torført er at meta um, hvussu hetta ítøkiliga málið verður avgreitt, men talan verður helst um 3 skeytir.

Samlaður mettur keypsprísur 462.350,00 kr. x 1 % = 4.623,50 kr.+ 3.000 kr. = 7.623,50 kr.

Samlaður mettur kostnaður verður hereftir uml. **492.962,5 kr.**

Møgulig onnur sakargjøld og møguligar endaligar víddir kunnu víkja frá, og verður tí søkt um at fáa eina fígging til vega á kr. 500.000 til avgreiðslu av hesum málinum.

Á býráðsfundinum 18. juni varð samtykt at játta upp til kr. 410.000, alt eftir endaligu fermetrunum, íroknað tinglýsing og matrikulering av løgukontu L64022, Útstykking Lygnnes. Nú tá samráðingarnar eru komnar

á mál, so er tørvur á nakað hægri fígging til at fremja endaliga keypið. Sí journal nr. 25/06231-11, *"Kort. skjal. Keyp av lendi frá privatum, til útstykking á Lygnesi"*, sum sýnir, hvat ítøkiliga keypið fevnir um.

**Skjøl**
Journal.nr. 25/06231-11, *"Kort. skjal. Keyp av lendi frá privatum, til útstykking á Lygnesi"*

**Tilmæli**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni og býararkitekturin mæla til at hækka játtanina til keyp av lendinum við kr. 90.000 á løgukontu L64022, Útstykking Lygnnes, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. november 2025:** Samtykt at játta kr. 200.000 til at fremja keyp av matr.nr. 308, 309 og 209a á løgukontu L64022, Útstykking Lygnnes, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 03. desember 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winher Poulsen, tekur undir tilmælinum og beina málið í býráðið.
Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur ikki undir við málinum.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Atkvøtt varð um tilmælið, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fýra atkvøðum ímóti og eini blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Rúni Reginsson Hammer.

Atkvøddi blankt: Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti**
Á býráðsfundi 18. juni 2025 varð samtykt, at nýtt útboð fyri matr. nr. 203c í Kollafirði skal skipast til bygging av íbúðum og/ella raðhúsum.

Umsitingin hevur síðani arbeitt víðari við málinum. Samráðingar hava verið við nærmastu grannar, soleiðis at partar av teirra lendi er keypt og yvirtikið, og kann lendið sostatt verða partur av útbjóðingini.

Nýtt útboðstilfar er gjørt, sum leggur upp til, at partar av matr.nr. 203c, 308 og 209, uml. 5.772 m², verður boðið út til bústaðarbygging við íbúðum og/ella raðhúsum samsvarandi samtyktini hjá býráðnum. Sí skjal nr. *25/06231-30 Útbjóðingartilfar, matr. nr. 203c, 308 og 309, apríl 2026*.

Dentur verður lagdur á eina bústaðarbygging við góðari dygd, hóskandi býti millum rað- og íbúðarbygging og eigaraviðurskifti, samstundis sum kommunan tryggjar, at bústaðirnir í størstan mun koma røttum málbólki til gagns.

**Skjøl:**
Skjal nr. 25/06231-30 *Útbjóðingartilfar, matr. nr. 203c, 308 og 309, apríl 2026*

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at
- *Útbjóðingartilfar, matr. nr. 203c, 308 og 309, apríl 2026,* til bygging av íbúðum og/ella raðhúsum, skjal nr. 25/0623-30, verður samtykt,
- at umsitingini verður heimilað at bjóða økið út samsvarandi hesum
  at málið verður beint í býráðið

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. apríl 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Útsett.

**Býráðsfundur 05. mai 2026:** Atkvøtt varð um tilmæli í byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri, 2 atkvøðum ímóti og 1 blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Jón Kragesteen, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

Blankt atkvøddi: og Annfinn Brekkstein.

**Kollafjarðarnevndin 09. juni 2026:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**
Tá freistin at lata tilboð inn var farin, var eitt tilboð innkomið. Tilboðið var frá HVT, og umsitingin hevur havt fund við felagið um innlatna tilboðið.
HVT vísti á, at tað hevur stóran týdning fyri felagið at sleppa skjótt undir bygging og sølu. Eftir fundin avgjørdi HVT tí at trekkja tilboðið aftur, tí mett varð, at neyðuga tilgongdin við broyting av byggisamtyktini og eftirfylgjandi tilgongdin við byggimálsviðgerð fór at taka ov langa tíð.
Á fundinum vísti HVT tó áhuga fyri at keypa økið og byggja lyklaklár sethús samsvarandi galdandi byggisamtykt (sí skjal 25/06231-43 kort 'Áðrenn broyting').

Av tí at eingi onnur tilboð komu inn, mælir umsitingin til at arbeiða víðari við einum leisti, har økið verður boðið út til sethúsabygging. Fyri at skapa møguleika fyri so nógvum bústaðareindum sum gjørligt á økinum verður samstundis mælt til at broyta byggisamtyktina fyri útboðsøki frá A1-øki til A4-øki (sí skjal 25/06231-43 kort 'Eftir broyting). Útboðsøki er tað økið, sum upprunaliga bleiv boðið út til rað- ella/og íbúðarbygging, og tað økið, sum kommunan hevur samrátt seg til at keypa (sí skjal 25/06231-27 umsókn um sundurbýti).

A4-ásetingarnar loyva sethúsakendari bygging, sum kann býtast sundur í fleiri sjálvstøðugar bústaðareindir. Byggingin í hesum umráðispartinum er at sammeta við sethúsa- og tvíhúsabygging, men loyvir fleiri bústaðareindum fyri betri at gagnnýta avmarkaða lendið. Skipanin av tílíkum økjum skal taka atlit til og hóska til kringliggjandi bústaðarøki.

**<u>Viðmerkingar frá umsitingini</u>**
Av tí at økið nýliga hevur verið boðið út, so verður mett, at tað er hóskandi at stytta innlatingarfreistina, soleiðis at greiða fæst skjótt á, um áhugi er at byggja á lendinum. Vanliga liggur boðið úti í uml. 4-6 vikur, í hesum førinum verður mælt til at stytta freistina niður í 2-4 vikur.

Útbjóðingartilfarið verður tillagað, soleiðis at økistreytirnar verða broyttar til, at byggingin skal halda seg til ásetingarnar fyri umráðispartinum A4 í almennu byggisamtyktini. Annars verða treytirnar tær somu, sum seinast økið varð boðið út.

**Lógir, ásetingar o.a.**
<u>Ásetingar fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:</u>
- Umráðisparturin verður lagdur til stakhús. Eftir serloyvi frá byggivaldinum kunnu eisini byggjast tvíhús, raðhús og tílíkir bústaðir fyri eitt húski. Stakhús og tvíhús kunnu eisini hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.

<u>Ásetingar fyri A4 øki smb. uppskoti til broyting av almennu byggisamtykini eru m.a.:</u>

- Umráðisparturin verður lagdur til opna/lága bústaðabygging.
- Skipanin av økinum skal taka atlit til og hóska til kringliggjandi bústaðarøki.

**Nýggj skjøl**
25/06231-43 Áðrenn broyting
25/06231-43 Eftir broyting
25/06231-27 umsókn um sundurbýti

**Tilmæli**
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla nevndini til:
- at heimila umsitingini at fara undir broyting av byggisamtykt fyri útboðsøkið frá A1-øki til A4-øki (sí kort).
- at bjóða økið út av nýggjum við einari lutfalsliga stuttari útboðsfreist (2-4 vikur) til sethúsakenda bygging, sum kann býtast sundur í fleiri sjálvstøðugar bústaðareindir.
- og at beina málið beint í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. august 2026:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. september 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 17. september 2026:** Anja Weyhe legði fram broytingaruppskot við tilmæli um at kortið verður broytt, soleiðis at kortið A4 eisini fevnir um partar av matr. nr. 209a og ein størri part av matr. nr 308, sambært skjalinum, *Kort – Eftir broyting, 17.09.2026*.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið varð samtykt við ellivu atkvøðum fyri, einari atkvøðu ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Kári Johansen, Birgir Nielsen og Høgni Vilhelmsen.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

Uppskotið samtykt soleiðis broytt.

# 254/26 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kaldbak

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Kaldbaksnevndin | 17.03.2025 | 4/25 | 25/01096-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 21.11.2025 | 186/25 | 25/01096-1 |
| 3 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 286/25 | 25/01096-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.03.2026 | 64/26 | 25/01096-1 |
| 5 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 81/26 | 25/01096-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 31.08.2026 | 180/26 | 25/01096-1 |
| 7 Býráðsfundur | 17.09.2026 | 254/26 | 25/01096-1 |

**Upprunin til málið**
Í málinum Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar er samtykt at endurskoða byggisamtyktirnar fyri allar bygdirnar í kommununi.

Fyri fleiri av bygdunum eru byggisamtyktirnar ikki vorðnar endurskoðaðar, síðani tær eru blivnar partur av Tórshavnar kommunu, og tí er í nógvum førum ósamsvar millum byggisamtyktirnar fyri bygdirnar og almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu. Harumframt er munur á hvat loyvt verður í teimum ymisku bygdunum, og hetta ger byggisamtyktirnar fyri bygdirnar torskildar, truplar at umsita og viðførir ójavnvág í kommununi.

Í málinum Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar eru yvirskipaði viðurskifti viðgjørd við tí endamáli at fáa eins ásetingar í byggisamtyktunum fyri bygdirnar, tó við nøkrum frávikum, tá talan er um staðbundin viðurskifti, serstakan bygdadám og tílíkt.

Í hesum málinum verður byggisamtyktin fyri Kaldbak viðgjørd nærri, við støði í yvirskipaðu viðurskiftunum, sum eru viðgjørd í málinum Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar.

**Lýsing av málinum**
Í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar verður mælt til, at bygdirnar Kirkjubøur, Velbastaður, Nólsoy, Hvítanes, Kaldbak og Hestur fáa hvør sína almenna byggisamtykt.

Mett verður ikki, at byggisamtyktirnar fyri bygdirnar skulu hava líka nógv ymisk øki, sum almenna byggisamtyktin hevur, av tí at talan er um minni bygdir, har ikki ber til at regulera virksemið eins neyvt og í høvuðsstaðnum. Tí eru tær ymisku ásetingarnar fyri allar bygdirnar samanbornar, og funnið er fram til nakrar felags ásetingar, ið hóska til allar bygdirnar.

Áðrenn endurskoðanina av byggisamtyktini fyri Kaldbak, eru hesi ymisku økini í bygdini:

A: Sethúsabygging
B: Almenn endamál
C: Havnar – og vinnuendamál
D: Miðstaðarøki

Niðanfyri eru ásetingarnar í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kaldbak, sum sambært uppskotinum eru tær somu fyri allar bygdirnar:

A: Bústaðarøki
B1: Havnarøki
B2: Vinnuøki
C: Miðstaðabygging
D1: Frílendi

D2: Almennir stovnar og mentan
E: Neyst
F: Frítíðarhús
G: Bóndahús
4. gr.: Landbúnaður

Sum sæst, so eru tað fleiri øki í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kaldbak, enn tað eru áðrenn endurskoðanina.

Umframt tey økini, sum vóru áðrenn endurskoðanina, so eru D1: Frlendi, E: Neyst, F: Frítíðarhús, G: Bóndahús og 4. grundumráði komin afturat. Økið til Havnar- og vinnuendamál er koyrt í hvør sítt øki.

Tær ávísu broytingarnar í økjum og ásetingum eru nærri lýstar í skjalinum Kaldbak ásetingar – áðrenn og eftir broyting, og ein meira yvirskipað lýsing er niðanfyri. Broytingar í kortunum eru at síggja í skjølunum Kort - áðrenn broyting og Kort - eftir broyting.

**Bústaðarøki**
Bústaðarøkini í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu loyva typologiunum stakhús, tvíhús, raðhús og íbúðir. Í bygdunum er ein meting gjørd av, hvør typologi skal loyvast í hvørjari bygd, gjørd út frá m.a. verandi bygging/ásetingum og bygdadámi.

Í Kaldbak verður mett ráðiligt at loyva stakhúsum og tvíhúsum. Kaldbak er ein minni bygd, og mett verður ikki, at íbúðarbygging og raðhúsabygging hóskar seg til dámin í bygdini.

Í sethúsaøkjum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er minsta grundstykkjavídd 500 m2. Í bygdunum verður yvirskipað mett, at grundstykkini kunnu vera minni, og í Kaldbak verður mett, at ein hóskandi minsta grundstykkjavídd er 400 $m^2$. Hetta m.a. grundað á verandi ásetingar fyri grundstykkjavídd í Kaldbak og verandi víddir á grundstykkjum í Kaldbak.

Ásetingar viðv. hædd, byggi- og nýtslustig vera tær somu sum fyri sethúsaøki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

**Miðstaðarøki**
Økið skal rúma virksemi sum t.d. stórir ella miðal stórir mentanarstovnar, samkomuhús og bygging til ferðavinnu. Tað er ikki vist, at øllum bygdum tørvar tílíkt øki, og í summum førum kann serloyvi gevast til smærri handlar, vinnuvirkir og stovnar í bústaðarøkjum, um hetta natúrliga hoyrir býlinginum til.

**Almenn øki**
Umframt øki til almennar stovnar og mentan, verður tað í bygdunum mett at vera skilagott við einum øki til frílendi, har ikki ber til at byggja.

**Neystaøki og øki til frítíðarhús**
Ynski hevur leingi verið um at loyva frítíðarbústøðum í neystum, og mett verður, at ásetingarnar fyri neystaøkini í bygdunum skulu vera soleiðis, at til ber at hava frítíðarbústað á loftinum. Tó skulu nakrar treytir vera, t.d. skulu kloakkir og aðrar leiðingar gjaldast av neystaeigarunum, og á niðastu hædd skal vera møguligt at hava bát.

Í bygdunum eiga somuleiðis at vera løgd av øki til frítíðarhús. Hesi eiga at liggja í útjaðaranum av bygdini, soleiðis at nærleiki er til almennar hentleikar, uttan at tey gera seg ov nógv inn á bygdalagið – í hesum sambandi eiga atlit, so sum stødd á øki, bygging, snið og tílíkt, at verða tikin. Á økjunum til frítíðarhús eigur ikki at vera møguligt at búgva alt árið, grundstykkini kunnu vera minni, og til ber at skipa tey annarleiðis enn vanlig bústaðarøki, við t.d. felags parkeringsplássum.

**Landbúnaðarøki**

Ásetingarnar fyri landbúnaðarøki verða tær somu sum fyri 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Í nøkrum av bygdunum var áðrenn endurskoðanina ein serskild áseting fyri øki til bóndahús. Hendan gav festarunum størri frælsi til at umvæla sethús síni, enn ásetingarnar fyri 4. grundumráði geva. Tí verður ynskt, at eitt øki, G: Bóndahús, verður í byggisamtyktunum fyri bygdirnar.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar,* journal nr. 20/04243.
- *Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kaldbak,* journal nr. 22/04935

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kaldbak sambært skjølunum Kaldbak – endurskoðað 11.01.24 og Kort – eftir broyting og beina málið í býráðið umvegis staðbundnu nevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. februar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Kaldbaksnevndin 02. apríl 2024:** Kunnað var um málið.

**Býráðsfundur 30. mai 2024:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:** Kunnað verður um, at byggisamtyktin er løgd til hoyringar.

**Kaldbaksnevndin 23. oktober 2024:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Kaldbaksnevndin hevur biðið um at fáa málið á skrá. Uppskot um nýggja almenna byggisamtykt fyri Kaldbak hevur ligið til almenna hoyring í tíðarskeiðnum 18. september til 30. oktober 2024. Kommunan hevur móttikið fleiri viðmerkingar. Hesar viðmerkingar verða viðgjørdar, og eitt tillagað uppskot verður síðani lagt fyri byggi- og býarskipanarnevndina, tá ið uppskotið er klárt.

**Kaldbaksnevndin 17. mars 2025:** Býararkitekturin greiddi frá, at málið hevur verið til hoyringar og nógvar viðmerkingar eru komnar. Málið verður lagt fyri í byggi- og býarskipanarnevndina til viðgerðar og viðgjørt eftir vanligu mannagongdini.

**Ískoyti:**
Í hoyringstíðarskeiðnum millum 18. september og 30. oktober 2024 móttók kommunan 9 viðmerkingar, sum vísa á ymsar vansar við uppskotinum og broytingaruppskot (sí skjal *25/01096-8 Viðmerkingar og brytingaruppskot*).

Grundleggjandi ósemja er, um økir í bygdini skulu leggjast afturat sum byggilendi ella varðveitast sum landbúnaðarjørð.

Búnaðarstovan mælir ítøkiliga til, at partar av matr. nr. 11a, 22a og 36a verður varðveitt sum landbúnaðarjørð ella verður broytt frá byggilendi til landbúnaðarjørð, eitt øki svarandi til omanfyri 12.500 $m^2$.

Ein borgari leggur somuleiðis dent á, at innleiðandi orðing frá galdandi byggisamtykt, skal varðveitast, har tað m.a. stendur *«Kaldbak er ein bóndabygd, og bøurin eigur í størst møguligan mun at varðveitast sum hann er. Tó hava bygdafólkini loyvi at byggja í sjálvari bygdini, men skal tá ansast eftir, at sum minst verður tikið av bønum, og at býlingsdámurin verður varðveittur.»*

Umboð frá kaldbaksnenvdini vísir hinvegin á fleiri økir, sum sambært broytingaruppskoti ikki eru væl egnað til landbúnaðarendamál, og tískil eiga at vera løgd afturat sum møguligt sethúsaøki. Á henda hátt kann bygdin mennast sambært siðbundnum byggimynstri. Bøur kann annaðhvørt varðveitast til landbúnað ella brúkast sum byggilendi, og er talan um ósambærilig endamál.

Umsitingin mælir til at gera eitt nýtt uppskot, sum í størri mun er varðveitandi, og er orsøkin til tilmæli, at bygdin á henda hátt varðveitir verandi dám í samsvari við søguligu menningina. Støða kann takast til at víðka byggilendið, eftir at ein bygdaætlan er gjørd fyri bygdina í samráð við staðbundnu nevndina og borgarar í bygdini.

Niðanfyri er ein samanumtøka og viðgerð av viðmerkingunum:

- ***Spískisteinur eigur at friðast***

Í tveimum mótmælum verður heitt á kommununa, at friða Spískastein, sum sambært uppskotinum verður innan fyri nýtt A øki (sethús).

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Umsitingin metir, at serlig eyðkennir í lendinum eiga at verða vird og varðveitt, har tað er møguligt, og fer at mæla til nýtt uppskot, har økið kring Spískastein framyvir ikki verður byggilendi.*

- ***Dvørgasteinur skal friðast***

Dvørgasteinur er í útnyrðingshorninum av D økinum (D2 økinum, sambært uppskotinum), sum er vestan fyri høllina og oman fyri kirkjuna.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***

*Vísandi til viðmerking um Spískastein, verður uppskotið somuleiðis tillagað, soleiðis at Dvørgasteinur kemur at standa uttan fyri byggiøki.*

- ***Stykkið vestan fyri høllina og omanfyri Kirkjuna (partur av matr. 22a) skal friðast***

Í tveimum mótmælum verður víst á týdningin, at kirkjan frá 1834 sleppur at standa frítt. Sipað verður til løgtingslóg nr 19 frá 1948 um friðan av fornminnum, sum ásetur, at umliggjandi øki innan fyri 100 m frá friðaðum bygningum (kirkjuni) kann verða lagt undir friðing.

Búnaðarstovan mælir somuleiðis frá at byggja í hesum økinum, av tí at økið verður dyrkað og hevur landbúnaðarligan týdning.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Kirkjan stendur lutfalsliga frítt og er omanfyri 50 m frá nærmasta sethúsi. Verandi D byggiøki (sambært uppskotinum D2, ætlað almennum stovnum og mentan) er omanfyri Korssgøtu, beint yvir 20 m norðanfyri kirkjuna. Ongar ítøkiligar byggiætlanir fyrileggja, men hevur ætlanin verið at byggja frítíðarskúla í økinum omanfyri høllina.*

*Í viðmerking mælir umboð frá umsitingini vegna Børn og Ung til, at nýggjur stovnur verður bygdur til námsfrøðiliga virksemið, og at námsfrøðiliga er skilabest, um hølisviðurskiftini fyri barnagarð og frítíðarskúla vera atskilt.*

*Mælt verður til at broyta verandi D øki til miðstaðarbygging fyri part av matr. nr 22a til 4. grundumráði, í samsvari við varðveitandi grundhugsanina, og soleiðis at lendið kring kirkjuna verður verandi óbygt. Og mælt verður til at partur av matr.nr. 11a (við svingið niðan móti á Soylugørðum) verður varðveitt sum byggilendi til framtíðar stovn (D2), sum í upprunaliga uppskotinum.*

- **Matr nr. 34, á Soylugøðum 50, skal vera bústaðarøki (tvey mótmælir)**

Ætlanin er at høvuðsumvæla húsini, ið eru millum elstu sethús í Kaldbak, í uppruna stand. Eigarar vísa á, at tað er sera umráðandi, at húsini framvegis eru staðsett í sethúsaøki. Matrikkulin er omanfyri 26.000 $m^2$, og skotið er upp at gera eitt 500$m^2$ stórt bústaðarøki kring húsini.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar***
*Mælt verður til at ganga viðmerkingni á møti, og at tillaga uppskotið, tó soleiðis at 400$m^2$ bústaðarøki (A1) verður galdandi kring húsini. Hetta er minst loyvda grundstykkjavídd, sambært uppskotinum, og verður hetta mett ráðiligt, tá talan er um smá og eldri hús. Broytingin verður gjørd, til tess at lógliggera verandi bygging, men áleggur broytingin ikki kommununi at dagføra veg og annað infrakervi til ognina á Soylugørðum 50.*

- **Partur av matr. nr 36a skal ikki vera sethúsaøki**

Festari mótmælir, at byggilendi er ásett fyri part av matr. nr 36a. Grundgevingin er, at stykkið er gamalt og væl veltur slátturbøur, ið ber nógv gras og er grundarlag undir fóðrinum til mjólkarframleiðslu. Økið verður eisini nýtt sum atkomuvegur til restina av bønum tilhoyrandi garðin, og lagt verður afturat, at ábendingar eru um fornar toftir í bønum.

Búnaðarstovan frámælir somuleiðis, at bygt verður á hesum økinum.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar***
*Talan er um eitt galdandi bústaðarøki, sum í uppskotinum verður varðveitt sum sethúsaøki. Umsitingin er sinnað út frá nevndu grundgevingum at rætta uppskotið, soleiðis, at A økið verður broytt til 4. grundumráði.*

- **Mælt verður til at varðveita og virða orðing í innleiðandi tekstinum, um at Kaldbak er bóndabygd**

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar***
*Umsitingin mælir til, at orðingin, sum er frá upprunaligu byggisamtyktini, verður varðveitt í uppskotinum um endurskoðaða byggisamtykt fyri Kaldbak, undir innleiðandi brotinum «Endamál», tó við broyting, soleiðis at tað ikki verður skilt millum bygdafólk og aðrar borgarar í kommununi*

- **Mótmælt, at øki sett av til búnaðarbrúk, verður broytt til bústaðarøki.**

Mótmælið snýr seg sum heild um, at óbygd økir gerast til bústaðarøkir sambært uppskotinum, og at hetta er ódámligt at fremja, meðan bóndur bíða eftir, at landið fær lendið skrásett. Serliga verður vist á broytingina av parti av matr.nr. 10 og 8, har fjós, hoyggjhús og úthús eru broytt til bústaðir í uppskotinum, tí hetta forðar bóndaskapinum.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar***
*Umsitingin ger nýtt uppskot, har størri partur av lendinum á Kaldbak verður lagt av til landbúnaðarjørð, og er tað best, um lendið verður skrásett, so avgerðir um nýtslu av lendinum kunnu takast á hollum vitanargrundarlagi. Í mun til matr. nr 8 og 10 (býlingurin Við Á) er talan um býling við bústøðum og landbúnaði. Umsitingin metir, at tað hóskar seg at gera ein nýggjan umráðispart (A2), sum verður lagdur til stakhús og bygging í sambandi við djórahald og jarðarbrúk. Endamálið er at staðfesta, at í hesum býlinginum er hóskandi framhaldandi at fremja virksemið, sum hevur við landbúnað at gera. Ásetingar fyri nýggja A2 økispartin, sum einans verður galdandi í býlinginum Við Á, er soleiðis:*

§. Ásetingar fyri umráðispart A2
*1 Umráðisparturin verður lagdur til stakhús og bygging í sambandi við djórahald og jarðarbrúk*
*2 Sethúsini skulu lúka somu treytir, sum eru galdandi fyri umráðispart A1.*
*3 Bygging í samband við djórahald og jarðarbrúk skal lúka somu treytir, sum eru galdandi fyri*
*4. grundumráði.*

- **Broyta matr. nr 68 til neystaøki**

Mjólkargøta 14 (matr.nr. 68) er ein neystagrund, og hava eigarar fingið loyvi at byggja neyst, tá ið byggisamtyktin er endurskoðað. Sambært broytingaruppskotinum er økið tó lagt út sum økið í C, miðstaðarbygging v.m., og er ynskið tískil at broyta ásetingarnar fyri matr. nr 68 til øki E neystaøki.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Nýtt uppskot verður gjørt, har matr. nr. 68 er neystaøki, og metir umsitingin, at hesar ásetingarnar hóska seg til økið.*

- **Ivamál um matr. nr 86**

Bygningurin á matr. nr. 86 er ikki eitt neyst, og hevur ongantíð verið eitt neyst. Tó er bygningurin sambært uppskotinum endaður í øki E, neystaøki. Víst verður á, at henda nýtslan kann gerast ein avmarking.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Í løtuni er bygningurin í sama grundumráði sum neystini eystanfyri (C-Havna- og vinnuøki), og staðsetingin við fjøruna talar fyri eini áseting, ið loyvir virksemi, sum hevur við sjógv at gera. Mælt verður til at halda fast í byggisamtyktarbroytingini, og víst verður á, at byggisamtyktarbroytingin ikki er til hindurs fyri, at núverandi lóglig bygging verður varðveitt, ella at hildið verður fram við lógligari nýtslu av eini ogn.*

- **Víðka neystaøkið vestanfyri Býggjarstøð**

Vestanfyri neystini á Barkhellu er eitt óbygt neystastykkið, sum ikki er tikið við í neystaøkið, sambært uppskotinum. Økið verður sambært eigara leigað frá Búnaðarstovuni, men er ikki frámatrikulerað, og hoyrir tí til matr.nr. 49a. Mælt verður til, at hetta økið verður tikið við í økispart E, neystaøki.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Neystaøkið fevnir um øki vestanfyri neystini á Barkhellu og part av matr.nr.49a. Tískil er ikki neyðugt at broyta uppskotið til tess at ganga ynskinum omanfyri á møti.*

- **Uppskot um staðseting av møguligari bygdalund**

Á tekning verður eitt økið leysliga markerað millum nýggju høllina og nýggju útstykkingina við vegnum á Kongsjørð. Sambært broytingaruppskotinum verður lendið sjáldan sligið, og er tað tí møguleiki at planta hetta økið við t.d. lægri trøum og runnum.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Í mun til byggisamtyktarbroytingar, er mest hóskandi ásetingin fyri eina møguliga bygdalund D1. Tað er torført at staðseta nágreiniligt mark millum bø og lund, áðrenn ein ítøkilig plantingarætlan og skipan av gøtum fyriliggur. Mælt verður til at varðveita økið í 4. grundumráði, men at staðfesta eina møguliga bygdalund í Kaldbak í byggisamtyktini og býarskipanini, tá ið ein ítøkilig verkætlan er komin longur ávegis.*

- **Tá bygt verður fram við vegnum niðan á Garðar, skal vera ávís frástøða frá húsum, garasjum o.ø.**

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Umsitingin mælir til, at viðkomandi økið, niðanfyri vegin Niðan á Garðar, í nýggjum uppskoti verður broytt frá sethúsaøki til 4. grundumráði. Tískil er fyribils ikki neyðugt at víðka veg ella áseta byggilinju.*

- **Fleiri økir eiga at leggjast afturat sum sethúsaøkir**

Víst verður á økir, sum sambært viðmerkingini ikki vera brúkt av bóndrum, og sum eru væl egnað til bústaðarendamál. Økini sum víst verður á, eru í leingjan av verandi býlingum í gomlu bygdini, og tískil verður hildið uppá tað gamla siðbundna byggimynstrið.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
Vísandi til varðveitandi útgangstøðið í nýggjum uppskoti mælir umsitingin frá, at staðseta nýggj sethúsaøkir á bøi, áðrenn nýggj bygdaætlan staðfestir, hvussu ynskiligt er, at bygdin skal mennast. Harafturat er sambært nýggja uppskotinum pláss fyri omanfyri 10 bústøðum innanfyri A økini, harímillum nýggj útstykking á vegnum, Á Kongsjørð, og verður hetta mett at nøkta bústaðartørvin í nærmastu framtíð. Mælt verður til at taka støðu til eina møguliga víðkan av sethúsaøkjunum, eftir at nýggj bygdaætlan er dagførd fyri Kaldbak.

- **Matrikkul 19c (Við Á 25A) er ikki í bústaðarøki, hóast talan er um bústað**

Ynskið er, at matr. 19c verður broyttur til bústaðarøki.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Støddin á húsinum, grundøkinum og frástøðan frá bygdini er lík áðurnevnda Á Soylugørum 50. Umsitingin mælir tí somuleiðis til at broyta grundøkið (matr. nr 19c) til bústaðarøki A1, og áleggur broytingin ikki kommununi at dagføra veg og annað infrakervi til ognina á Soylugørðum 50.*

- **Øki við Byggjarstøð (støðna) kann takast við sum neystaøki**

Í broytingaruppskoti verður skotið upp at víðka neystaøki niðan í bøin við matr. nr. 49a, soleiðis at neystaøkið kann byggjast, partvíst undir bøi, í samráð við avvarðandi eigara.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Í uppskotinum fylgir neystaøkið neyvt matrikkulmarkinum, og mælir umsitingin frá at víðka neystaøkið norður og tvørturum matrikkulmarkið millum matr. nr 49c og 49a.*

- **Búnaðarstovan ynskir at taka av byggilendinum**

Við grundgeving um týdningin at varðveita gott landbúnaðar- og matvøruframleiðslulendi í Føroyum, og at tryggja okkara eftirkomarum atgongd til hetta tilfeingið, verður víst á, at partar av matr. nr. 11a, 22a og 36a skulu varðveitast sum landbúnaðarjørð ella broytast frá byggilendi til landbúnaðarjørð, svarandi til eitt øki omanfyri 12.500 $m^2$.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Í nýggja uppskotinum gongur umsitingin viðmerkingini partvíst á møti, men letur framvegis part av matr nr 11a vera byggilendi, í samband við bygging av møguligum framtíðar stovni.*

At enda eru tvey byggisamtyktarmál, sum eru viðkomandi í samband við endurskoðan av byggisamytiktini fyri Kaldbak, men sum umsitingin ikki hevur móttikið sum beinleiðis viðmerking í hoyringartíðarskeiðnum.

1) Grótbrotið við Krossá (*mál nr. 21/00569*)

Við gamla grótbrotið við Krossá er áseting C-Vinnu- og havnaøki galdandi. Økið hevur innkoyring og verður í innanhýsis samskifti víst á, at økið møguliga í framtíðini kann nýtast sum sethúsaøki. Umsitingin mælir til at halda fast við verandi uppskot, har vinnu- og havnaøki verður økið broytt til 4. grundumráði. Mett verður, at hendan ásetingin er hóskandi fyri økið, ið hevur verið nýtt sum grótbrot, tyrving og til moldbreiðslu, og sum sambært nýggju ásetingini framyvir kann nytast sum landbúnaðarøki.

2) Møgulig víðkan av bústaðarøki í býlinginum Á Bø. (*mál nr. 25/05141)*

Eigari av matr. nr 89 hevur søkt Búnaðarstovuna um at keypa lendi frá matr. nr 49a, soleiðis at matr. nr 89 veksur úr 272 fermetrum uppí 400 fermetrar. Hetta er í sambandi við møguliga útbygging av húsunum. Mælt verður til at rætta byggisamtyktina eftir nýggjum møguligum marki, soleiðis at matr. nr 89 í framtíðini kann víðkast uppí 400 fermetrar, tí hetta er í samsvari við minst loyvdu grundstykkjavídd. Í nýggjum uppskoti verður mælt til at víðka bústaðarøki norðanfyri matr. nr 89, við umleið 130 $m^2$, soleiðis at viðkomandi grundøki kann víðkast samsvarandi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Byggimálsdeildin viðmerkti uppskotið, og vóru eftirfylgjandi gjørdar hesar broytingar:

1) Byggi- og nýtslustigini eru broytt frá einum til tveir desimalar.
2) Upplýsingar til møguliga heildarætlanir eru nágreinaðar og lagdar afturat í breddanum.
3) P-krøvini eru broytt, soleiðis at tey eru galdandi fyri bústaðarøkir burturav (Kap III §3).

At enda viðmælti byggimálsdeildin, at talmerking av greinum ikki byrjar umaftur undir hvørjum kapitli, men ístaðin er kronologisk fyri alla byggisamtyktina. Hetta er vanligur bygnaður í kunngerðum og lógum, og sambært byggimálsdeildini, eisini lættari at umsita.

Býarskipanardeildin vil tó fyribils ikki at broyta bygnaðin, av tí at verandi bygnaður er galdandi í øllum byggisamtyktunum í Tórshavnar kommunu, og er m.a. eitt av endamálunum í hesi endurskoðan at javnstilla byggisamtyktirnar í bygnaði. Hendan viðmerkingin verður tikin við til eina seinni dagføring av byggisamtyktini.

**Nýggj skjøl:**
- *J.nr. 25/01096-13- Upprunaligt uppskot, 11.01.2024*
- *J.nr. 25/01096-8 - Viðmerkingar og broytingaruppskot*
- *J.nr. 25/01096-12 - Kort - Kaldbak eftir broyting, dagf. nov. 2025*
- *J.nr. 25/01096-12 - Almenna byggisamtyktin – Kaldbak – Við markeraðum broytingum*
- *J.nr. 25/01096-12 – Uppskot – Almenn byggisamtykt fyri Kaldbak, nov. 2025*
- *J.nr. 25/01096-12 - Kaldbak - áðrenn og eftir broyting*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja nýggja uppskotið um byggisamtykt fyri Kaldbak sambært skjølunum *Uppskot – almenn byggisamtykt fyri Kaldbak, nov. 2025* og *Kort – Kaldbak eftir broyting, dagf. nov. 2025*, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, tó so at tað eiga at vera fleiri økir afturat til bústaðarbygging.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur gjørt nýtt uppskot, og lagt fleiri økir afturat til bústaðarbygging. A1-sethúsaøkið er víðkað fram við vegunum Á Soylugørðum og Á Gørðum. Økið er tilsamans umleið 4500 m2 til víddar, og gevur væntandi pláss til umleið 8 sethús.

Umsitingin metir, at víðkanin av sethúsaøkinum framvið hesum vegunum stuðlar verandi býlingamynstur og gagnnýtur vegaskipanina. Tó er ein møgulig framtíðar útstykking treytað at vegirnir verða dagførdur.

Hendan broytingin gongur móti broytingaruppskotinum frá Búnaðarstovuni, sum í sínum hoyringsskrivi mælir til at varðveita matr. nr. 11a sum landbúnaðar- og matvøruframleiðslulendi.

Umsitingin metir, at um ynskið annaðhvørt er at avmarka ella økja byggilendi enn meiri, eigur hetta at grundast á eina dagførda bygdaætlan.

**Nýggj skjøl**

- *j.nr. 25/01096-18 - Kort - Kaldbak eftir broyting, dagf. feb. 2026, j.nr.*
- *j.nr. 25/01096-18 - Broyting markerað - feb 2026*

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja dagførda uppskotið um byggisamtykt fyri Kaldbak sambært skjølunum *Uppskot – almenn byggisamtykt fyri Kaldbak, nov. 2025* og *Kort - Kaldbak eftir broyting, dagf. feb. 2026*, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. mars 2026:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Birgir Nielsen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Kári Johansen tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Atkvøtt varð um tilmæli frá meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við tíggju atkvøðum fyri, trimum atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Gunnar Djurhuus, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Elin Heðinsdóttir Joensen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Eingin.

**Ískoyti**
Dagførda uppskotið um endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kaldbak lá til almenna hoyring millum 25. mars og 6 mai 2026. Tá ið hoyringsfreistin var farin, hevði kommunan móttikið eina viðmerking (sí skjal *Hoyringsskriv, j.nr. 25/01096-22*).

- **Matr. nr. 47a skal gerast byggilendi og partur av umráðisparti A.**

Borgari mælir til, at byggisamtyktin fyri matr. nr. 47a, omanfyri vegin Á Gørðum, verður broytt frá landbúnaðarøki til sethúsaøki. Hetta fer at økja um møguleikarnar at byggja stak- ella tvíhús í økinum, og hevur týdning fyri, at bygdin kann vaksa. Lagt verður eisini afturat, at lendishallið ikki átti at verið ein trupulleiki, og at byggisamtyktin verður í leingjan av A økinum beint norðanfyri (matr. nr. 45b) sambært uppskotinum.

Í viðmerkingini verður eisini víst á hoyringarskriv frá umboði frá Kaldbaksnevndini, har mælt verður til, at hetta stykkið verður tikið við í umráðispart A.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar.***
*Sum viðmerkjari vísir á, hevur hetta økið áður verið viðgjørt, sum møguligt sethúsaøki. Umsitingin ásannar, at tað kann vera skynsamt at staðseta nýggja sethúsaútstykkingar fram við frammanundan bygdum vegi. Umsitingin metir tó framvegis, út frá einum varðveitandi útgangstøði, at ein nýggj bygdaætlan eigur at staðfesta, hvussu ynskiligt er, at bygdin skal mennast, áðrenn landbúnaðarjørð verður umskipað til byggilendi.*

*Mett verður, at ávegis útstykking umframt nýggju A økini sambært uppskotinum nøkta ein ávísan bústaðareftirspurning komandi tíðina. Mælt verður til at halda fast í uppskotinum, og ikki at broyta matr. nr. 47a til sethúsaøki í hesum umfarinum.*

**Nýggj skjøl**
Skjal nr. 25/01096*, Hoyringsskriv*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at halda fast við verandi uppskot til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kaldbak og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. august 2026:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Heidi Lava Elgeirsdóttir og Bergur Robert Dam Jensen, tekur undir við tilmælinum.

Birgir Nielsen og Kári Johansen taka ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 17. september 2026:** Annfinn Brekkstein legði fram broytingaruppskot við tilmæli um at partur av matr. nr. 47a er partur av umráðisparti A.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið varð fall við fimm atkvøðum fyri, seks atkvøðum ímóti og tveimum blonkum atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Blankt atkvøddi: Heðin Mortensen og Bergur Robert Dam Jensen.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

# 255/26 Trivnaðarøki í Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Kollafjarðarnevndin | 20.05.2025 | 13/25 | 25/03667-1 |
| 2 Kollafjarðarnevndin | 13.11.2025 | 22/25 | 25/03667-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.04.2026 | 95/26 | 25/03667-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.06.2026 | 133/26 | 25/03667-1 |
| 5 Kollafjarðarnevndin | 09.06.2026 | 9/26 | 25/03667-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 10.06.2026 | 140/26 | 25/03667-1 |
| 7 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 202/26 | 25/03667-1 |
| 8 Býráðsfundur | 17.09.2026 | 255/26 | 25/03667-1 |

**Upprunin til málið**
Staðbundna nevndin í Kollafirði ynskir trivnaðarøki í Kollafirði og eitt borgarahús.

Staðbundna nevndin sigur:
Fyri at samla bygdirnar og økja um trivnaðin í økinum, manglar ein miðdepil – eitt torg og eitt borgarahús, sum stendur í sama stað. Hetta málið hevur undanfarna nevnd arbeitt nógv við og eru vit sera nøgd við miðstaðarætlannina, sum var løgd fram fyri nevndina seint í seinastu setu. Vit ynskja at arbeiðið skal fara í gongd beinanvegin.

Umsitingin kunnar um málið.

**Kollafjarðarnevndin 20. mai 2025:** Umrøtt. Nevndin mælir til, at kommunan ognar sær neyðugt øki í sambandi við miðstaðarætlanina fyri Kollafjørð.

**Ískoyti**
Kommunan er í samráðingum við eigararnar av lendinum.

Kunnað verður um málið.

**Kollafjarðarnevndin 13. november 2025:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Politiskt er ynski at koma í gongd við at menna eitt miðsavnandi uppihaldsøki í miðstaðnum í Kollafirði.

Ein heildarætlan fyri miðstaðin í Kollafirði er gjørd. Sí skjal nr. *25/03667, Heildarætlan Kollafjørður_mál nr. 25_02604.*

**Miðsavningarøkið:**

Á síðu 8 og 9 í Heildarætlanini verður miðsavningarøkið lýst. Ætlanin er, at gera eitt miðsavningarøki á grøna økinum beint vestan fyri grótbrúnna um Botnánna. Økið er kommunalt, og er áleið 1.835 $m^2$ til støddar og kann tískil rúma fleiri endamálum.

Her er talan um slættan, sum er á tí norðara áarbakkanum niðan móti fleiri almennum bygningum í bygdini. Mælt verður til, at økið verður skipað sum ein fløttur, so tað kann inntakast til alskyns felagstiltøk og hátíðarhald í bygdini.

Møguleikin er somuleiðis at skipa økið við eitt nú bálplássi, møguleikanum til konsertir o.a.

Lagt verður upp til, at Ormurin Langi frá gitna kvæðnum hjá Sjóvarbóndanum verður tema í økinum.

Harumframt skal lendisgøta gerast í økinum, soleiðis at økið kemur at hanga saman við kringliggjandi økjum, og soleiðis at økið kann brúkast til at ganga túrar í osfr.

Kommunan yvirtók lendið fyri nógvum árum síðani, men av tí at vetrarbitið ikki varð endaliga avgreitt, so verður neyðugt at fáa hetta avgreitt, samstundis sum økið verður planlagt, og áðrenn verkætlanin verður framd í verki.

**Felagsveltan:**
Á síðu 12 verður økið eystan fyri Vegin við Sjógv, partur av matr. nr. 107a, og innan fyri landsvegin, lýst sum eitt øki til felagsveltu, uppihald, nýtslu av ánni og gøtusamband inn undir brúnna og út á sandin.

Fyrr hevur hetta økið verið eitt virkið stað til eplavelting, har bøndur dyrkaðu eplir, ið vóru ein partur av okkara landbúnaðarligu siðmentan. Heildarætlanin leggur upp til, at økið skal gagnnýtast til felagsveltu, har fólk kunnu dyrka grønmeti og frukt. Við evt. at byggja felags vakstrarhús og gagnnýta jarðhitan frá hitakeldu í Kollafirði, kann tað gerast møguligt at dyrka serligar fruktir og grønmeti.

Felagsveltan hevur til høvuðsendamál at skapa samanhald millum borgararnar í bygdini, og skal felagsveltan røkka sínum deilendamáli um at fáa dyrkað jørðina aftur, so er tað týdningarmikið at virksemið er sjálvrikið. Tískil er týdningarmikið at fáa savnað fólk til veltuvirksemið, áðrenn bygging av vakstrarhúsum osfr. verður sett á breddan.

Heildarætlanin leggur somuleiðis upp til, at ein demningur verður gjørdur tvørtur um ánna, soleiðis áin gerst djúpari, og kann geva børnum møguleika at nýta hana til leik, sum til dømis við at byggja flaka ella nýta gummibát.

Hetta kann umframt at skapa gleði og ítróttarligt virksemi, eisini veita børnunum djúpari samband til náttúruna.

Økið er partur av festinum Sjóvarhagi, og tí skal avtala gerast við festaran, samstundis sum økið verður planlagt, og áðrenn nakað kann serast í verk á økinum.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**
Avtala má gerast við avvaraðandi partar, sum varða av lendunum. Inntil endalig avtala er fingin í lag við partarnar, verður lagt upp til, at økini verða planløgd, soleiðis at tað er púra greitt, hvat skal gerast á økjunum, tá endaligar avtalur er fingnar við avvarðandi partar.

Stjórnarstovan varðar av samráðingum við lendisánararnar, meðan Býarskipanardeildin varðar av planleggingini av økjunum.

**Skjøl:**
*Skjal nr. 25/03667-4, Heildarætlan Kollafjørður_mál nr. 25_02604*.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6275 | LK62060 | Trivnaðarøki í Kollafirði | 6275 | L62060 | | Trivnaðarøki í Kollafirði | 500.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 500.000 |
| Áður játtað | Upphædd: | 0 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | Kemur seinni |

## Tilmæli:

Kommunustjórin, teknisku stjóri og býararkitekturin mæla til:

- At taka upp samráðingar við avvarðandi partar, sum varða av lendunum, sum ætlanin er at inntaka til trivnað í bygdini.
- At miðsavningarøkið verður boðið út í sniðkapping, sum skal liggja til grund fyri eini heildararbeiðstøku eftirfylgjandi.
- At játtaðar verða kr. 500.000 til sniðkapping og eftirfylgjandi gerð av útboðstilfari av kt. 6275, LK62060, Trivnaðarøki í Kollafirði til nýggja verkætlan undir kt. 6275, L62060, Trivnaðarøki í Kollafirði.
- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. apríl 2026:** Samtykt við tí nágreingin, at punkt eitt má avgreiðast, áðrenn farast kann víðari við málinum, og at tá punkt eitt er avgreitt, verður málið lagt fyri nevndina aftur.

## Ískoyti:

Á seinasta fundi í Byggi- og býarskipanarnevndini varð samtykt, at punkt 1 mátti avgreiðast, áðrenn farast kundi víðari við málinum, og at tá punkt 1 var avgreitt, skuldi málið leggjast fyri nevndina aftur.

Viðv. økinum vestan fyri grótbrúnna um Botnánna, partur av matr. nr. 107o.
Økið er kommunalt, og er áleið 1.835 $m^2$ til støddar. Kommunan hevur yvirtikið økið frá Sjóvarhaga í 1996, og kommunan er tískil eigari av lendinum, men hevur Ognarmørkin rætt til bit á hesum lendi. Ognarmørkin skal tískil endurgjaldast fyri missin av hesum biti, og hevur fundur verið við Ognarmørkina hesum viðvíkjandi. Enn er eingin endalig semja funnin, men hevur Ognarmørkin játtað, at kommunan kann fara undir sniðkapping av økinum.

Tó Ognarmørkin hevur rætt til bit á lendinum, so kann Ognarmørkin ikki nokta kommununi at gera nýtslu av sínum ognarrætti á hesum matrikli. Mælt verður tí til, eisini hóast endalig semja um endurgjaldið enn ikki er avgreitt, at kommunan útskrivar sniðkapping av økinum.

Ein sniðkapping um, hvussu økið skal háttast, merkir ikki, at kommunan kemur at gera inntriv í økið. Fyrst skal fyriskipast ein sniðkapping, sum skal liggja til grund fyri eini heildararbeiðstøku eftirfylgjandi. Tað vil siga, at áðrenn nakað kann setast í verk í økinum, so verður málið lagt fyri avvarðandi nevndir upp til fleiri ferðir. Ætlanin er at samráðast við Ognarmørkina, meðan sniðkappingin verður skipað, soleiðis at tá semja er viðv. endurgjaldinum fyri vetrarbit, so kann verkætlanin bjóðast út í heildararbeiðstøku.

Viðv. økinum eystan fyri Vegin við Sjógv, partur av matr. nr. 107a.

Økið er partur av sjóvarhaga festinum, og festarin er bjóðaður til fundar. Enn hevur fundurin ikki verið, hóast kommunan í fleiri umførum hevur sent fundarboð. Somuleiðis hevur Búnaðarstovan sent festaranum hoyringsvar um ætlanirnar hjá kommununi. Kommunan frættir aftur frá Búnaðarstovuni, tá hoyringssvarið frá festaranum er komið.

Av tí at lendisviðurskiftini ikki eru endaliga avgreidd við festaran enn, so verður hesin parturin av heildarætlanini ikki settur í verk í núverandi løtu.

Hóast hesin parturin av heildarætlanini ikki verður settur í verk í núverandi støðu, so verður mælt til, at gonguleiðir út á Ósan verða raðfestar, tvs. at ein gonguleið undir landsvegin og út í Ósan og ein gonguleið um brimgarðin, soleiðis at gerst lættari hjá borgarum at koma til økið og gera gagn av tí.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6275 | LK62060 | Trivnaðarøki í Kollafirði | 6275 | L62060 | | Trivnaðarøki í Kollafirði | 500.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 500.000 |
| Áður játtað | Upphædd: | 0 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | Kemur seinni |

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til:

- At miðsavningarøkið á matr. nr. 107o verður boðið út í sniðkapping, sum skal liggja til grund fyri eini heildararbeiðstøku eftirfylgjandi.
- At gonguleiðir verða gjørdar út á Ósan, herundir at arbeiðini verða boðin út og sett í verk
- At játtaðar verða kr. 500.000 til sniðkapping, gerð av útboðstilfari til Trivnaðarøkið og gonguleiðir til Ósan av kt. 6275, LK62060, Trivnaðarøki í Kollafirði til nýggja verkætlan undir kt. 6275, L62060, Trivnaðarøki í Kollafirði.
- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. juni 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, tó skal nágreinast undir punkt 2, at tað er gonguleiðin umvegis brimgarðin.

Anja Weyhe var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Kollafjarðarnevndin 09. juni 2026:** Málið varð umrøtt.

**Fíggjarnevndin 10. juni 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við byggi- og býarskipananevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Høgni Vilhelmsen og Tróndur Sigurðsson, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Atkvøtt varð um broytingaruppskot frá Tróndi Sigurðsson um at beina málið aftur í nevnd, ið fall við seks atkvøðum fyri, seks ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Bergur Robert Dam Jensen, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Astrið Breckmann og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Blankt atkvøddi: Heðin Mortensen.

Síðani varð atkvøtt um broytingaruppskot frá Heidi Lava Elgeirsdóttir, har skotið verður upp, at tikið verður undir við tilmælinum við teirri broyting, at 300.000 kr. verða játtaðar afturat á løgukontu 6275 til gonguleið undir landsvegin og træbrúgv um Botnánna í samráð við Landsverk, ið varar av lendinum, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála og Astrið Breckmann.

Ímóti atkvøddu: Bergur Robert Dam Jensen, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddi:Heðin Mortensen.

Anja Weyhe luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Til kunningar skal upplýsast, at Anja Weyhe luttók ikki í viðgerðini av málinum ella í atkvøðugreiðsluni. Jón Kragesteen luttók í viðgerðini av málinum og í atkvøðugreiðsluni. Av misgáum er navnið hjá Anju Weyhe skrivað í gerðabókina sum luttakandi í atkvøðugreiðsluni, og ikki navnið hjá Jón Kragesteen. Hetta er tíverri ein feilur í gerðabókini, og verður býráðið biðið um taka hesa kunning til eftirtektar.

**Býráðsfundur 17. september 2026:** Tikið til eftirtektar.

# 256/26 Útbygging. Lonir til Skúlan á Fløtum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 12.02.2026 | 11/26 | 26/01053-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.02.2026 | 23/26 | 26/01053-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 36/26 | 26/01053-1 |
| 4 Trivnaðarnevndin | 03.09.2026 | 39/26 | 26/01053-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 09.09.2026 | 167/26 | 26/01053-1 |
| 6 Býráðsfundur | 17.09.2026 | 256/26 | 26/01053-1 |

**Upprunin til málið**
Innskriving í forskúla og 1. Flokk.
Sí mál 25/08236

**Lýsing av málinum**
Tørvur er á eyka skúlastovum til Skúlan á Fløtum, tí komandi árini verða fleiri næmingar innskrivaði til skúlan. Tríggir eyka flokkar verða tiknir inn komandi trý árini. Tørvurin er longu við skúlabyrjan eftir summarfrítíðina 2026.

Umsitingin er í fyrireikingum at útvega lonir til endamálið. Eftir ætlan verða lonirnar staðsettar og samanbygdar í ein minni bygning fyri seg á grundøkið skúlans, men leyst av skúlanum. Millum verandi skúla og Glasir. Lonirnar koma at innihalda 3 skúlastovur, dur og gongd, klæðirúm og lítið tøknirúm. Inngongdin verður eftir ætlan yvirdekkað við einari hálvtekju at verja móti vindi og regni.

Teknisk fyrisiting samráðist um keyp av samanbygdum lonum frá Moelven í Noregi, samstundis sum arbeiðið við avgrevstri, fundering og leiðingum og annað arbeiði í hesum sambandi verður fyrireikað og boðið út í Føroyum.

Tíðarælanin er knøpp.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Byggingin skal lúka BK17 krøv, og mett verður ikki at neyðugt er at biðja um frávik.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Byggimálsdeildin er kunnað um málið, og umsókn um byggiloyvi er ávegis. Verður sent inn tá tekningar og útrokningar eru lidnar.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| | | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| | | | |

| |
|---|
| **Upphædd** |
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 9.500.000,00 |
| Áður játtað til økið | Upphædd: | 10.000.000,00 er játtað á karminum. |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2026-2027 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og leiðarin á mentamáladeildini mæla til at 9,5 mió verða fluttar av karminum LK41999 útbygging av skúlaøkinum og fluttar á nýggja løgukonto "Útbygging. Lonir til Skúlan á Fløtum".

- At nevndin gevur umsitingini heimild at samráðast og gera sáttmála við modulveitara um keyp av lonum, umframt at bjóða út og gera sáttmála um neyðugar arbeiðstøkur áðrenn lonirnar koma til Føroya og meðan hesar skulu setast upp og byggjast saman.

- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 12. februar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Kristianna Winther Poulsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála, Kristianna Winther Poulsen og Høgni Vilhelmsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Tróndur Sigurðsson legði fram broytingaruppskot um at arbeiðini vera boðin til føroyskar veitarar og at arbeiðið verður útint av føroyskum handverkarum. Eisini mælt til at Sankta Frans skúli er umfataður av hesari loysn

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið fall við fimm atkvøðum fyri, átta atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen, Høgni Vilhelmsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, tveimum atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen.

**Ískoyti:**
Bygningsarbeiði er boðið út í summar og samlaður kostnaður fyri verkætlanina er nú kendur.

JEP Smíð, Eysturlon og HVT vórðu biðin um at bjóða.
Eysturlon var bílígast. HVT meldaði frá stutt undan freist.

Innbúgvið er eisini boðið út millum tríggjar. NDO Supply Føroyar, Elding og Inventartænastan. NDO Supply var bílígast.

Samlaður kostnaður verður 12 mió kr fyri verkætlanina. Tørvur er tískil á 2,5 mió kr afturat verandi játtan.

Jørð og lendisarbeiðið er um at verða liðugt og betongarbeiðið byrjar 18 august. Modulini koma til Føroya um hálvan september.

**Skjøl**
Kostnaðarætlan er tøk til fundin.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 4175 | LK41013 | Hoyvíkar skúli, høvuðsumvæli |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 4175 | L41022 | Útbygging, Lonir til | |

| **Upphædd** |
|---|
| 2.500.000 |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | ng og dagføring | | | Skúlan á Fløtum | | |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 12.000.000,00 |
| Áður játtað til verkætlæn | Upphædd: | 9.500.000,00 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | Liðugt í novembur 2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | Innanfyri verandi rakstrarkarm í 2026s |

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, leiðarin á mentamáladeildini og leiðarin á bygningsdeildini mæla til at:

- Fluttar verða 2.500.000 kr av løgukarmi LK41013, “Hoyvíkar skúli høvuðsumvæling og dagføring”, á løgukonto L41022 “Útbygging, Lonir til Skúlan á Fløtum”.

  At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 03. september 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 09. september 2026:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 17. september 2026:** Tróndur Sigurðsson legði fram broytingaruppskot við tilmæli um at fíggja peningin av meirinntøkum 2026.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið fall við fimm atkvøðum fyri, átta atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen, Høgni Vilhelmsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Síðandi varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við ellivu atkvøðum fyri, tveimum atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

# 257/26 Nýtt endurnýtslupláss í Nólsoy

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 13.04.2026 | 33/26 | 26/02779-1 |
| 2 Nólsoyarnevndin | 27.05.2026 | 4/26 | 26/02779-1 |
| 3 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 31.08.2026 | 49/26 | 26/02779-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 09.09.2026 | 179/26 | 26/02779-1 |
| 5 Býráðsfundur | 17.09.2026 | 257/26 | 26/02779-1 |
| 6 Nólsoyarnevndin | 22.09.2026 | 9/26 | 26/02779-1 |

**Upprunin til málið**
Ein stórur trupulleiki í Nólsoy er, at tað er sera óruddiligt á havnarøkinum úti á Malarenda, har sum báturin leggur at. Tað er serliga í landsynningshorninum, har sum núverandi ruskpláss er, at nógv ymiskt rusk liggur og sløðist. Nólsoyingar ynskja, at øki verður ruddað og hildið ruddiligt framyvir.

Ruskplássið treingir til ábøtur, og til dømis er eingin serlig bingja til papp, so tað ber illa til at skilja ruskið á sama hátta sum aðrastaðir í kommununi.

Nólsoyingar kundu eisini hugsað sær, at tað bleiv lættari at sleppa av við ruskið. Ruskplássið er opið tríggjar tímar tvær ferðir um vikuna, men tað er ikki altíð, at tað liggur fyri hjá bygdarfólkinum at fara við ruski, tá ið tað er opið – serliga hjá teimum, sum arbeiða í havn og aðrastaðir.

**Lýsing av málinum**
Trupulleikin við óruddi o.a. rundan um ruskplássið í Nólsoy kemur helst av, at sjálvt ruskplássið er alt ov lítið. Innigirda plássið er ikki meiri enn 235 m² til støddar, og har skulu minst 5 bingjur passa inn. Tað letur seg ikki gera, og tí standa bingjur uttan fyri ruskplássið. Eisini er talan um, at nógv av tí, sum liggur og sløðist uttan fyri ruskplássið, er stór ting, sum eingin klárar at fáa upp í bingjurnar – hesi blíva bara sett uttanfyri, har best ber til.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Umsitingin hevur gjørt uppskot til eitt nýtt og størri pláss á sama stað, sum kann innrættast soleiðis, at allar neyðugar bingjur kunnu standa har, tað er til papp, glas, jarn, restburturkast osfr.

Eisini hevur verið tosað um, sum eina royndarætlan, at hava eitt opið pláss, so fólk altíð kunnu sleppa av við burturkast. Møguliga er neyðugt við kamera, og best hevði verið, um eitt fólk, sum býr í Nólsoy, kundi havt eftirlit við plássinum og boða frá, tá bingjur eru fullar.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og leiðarin á Umhvørvisdeildini mæla til, at umsitingin ger uppskot til staðseting, innrætting, kostnaðarmeting o.a. til komandi fund, og at beina málið í staðbundnu nevndina fyri Nólsoy til kunningar og møguligar viðmerkingar.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 13. apríl 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Nólsoyarnevndin 27. mai 2026:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt uppskot til endurnýtslupláss í Nólsoy, har verandi endurnýtslupláss verður víðkað suðureftir.

Ætlanin er at víðka verandi pláss, soleiðis at tað verður íalt 435 $m^2$ til víddar, verandi pláss er 235 $m^2$.

Ein 60 cm høgur garður verður stoyptur runt um plássið (sum verandi). Vanligt hegn verður uppsett aftanfyri, inn ímóti beninum, og tætt hegn verður sett upp út ímóti havnarøkinum, soleiðis at fólk, sum ferðast framvið, ikki koma at síggja inn á plássið.

2 portur verða, soleiðis at tað ber til at koyra inn og út á plássið, um talan er um størri burturkast sum skal inn.

Lendið verður stoypt við halli ímóti verandi frárenning.

Ljóssteyrar verða settir upp.

Mett verður, at alt arbeiðið kemur at kosta umleið 600.000 kr.

**Skjøl**
J.nr. 26/02779-2, støðumynd.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 7175 | LK71999 | Renovatión | 7175 | | | Endurnýtslan í Nólsoy | 105.000 |
| 7175 | L71009 | Virksemi á Sundi oa á Hjalla | 7175 | | | Endurnýtslan í Nólsoy | 495.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 600.000,- |
| Áður játtað | Upphædd: | 0,- |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2026/27 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 0,- |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á Umhvørvisdeildini og leiðarin á KOB mæla til:

- at nevndin tekur undir við uppskotinum at víðka endurnýtsluna í Nólsoy sambært tekning j.nr. 26/02779-2.
- at játtaðar verða 105.000 kr av løgukarmi LK71999. Renovatión, á nýggja verkætlan, Endurnýtslan í Nólsoy.
- at játtaðar verða 495.000 kr av løgu L71009. Virksemi á Sundi og á Hjalla, á nýggja verkætlan, Endurnýtslan í Nólsoy.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Umframt at tá plássið er liðugt, so verður plássið alment opið alla tíðina, sum eina royndarætlan, og at hetta verður lagt fyri nevndina aftur til at eftirmeta, tá ein tíð er farin.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 31. august 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 09. september 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 17. september 2026:** Tikið av skrá.

# 258/26 Góðselevatorar á Bacalao og í Sjóvinnuhúsinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 02.09.2025 | 33/25 | 25/08024-23 |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.09.2025 | 151/25 | 25/08024-23 |
| 3 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 203/25 | 25/08024-23 |
| 4 Havnanevndin | 01.09.2026 | 40/26 | 25/08024-23 |
| 5 Fíggjarnevndin | 09.09.2026 | 180/26 | 25/08024-23 |
| 6 Býráðsfundur | 17.09.2026 | 258/26 | 25/08024-23 |

**Upprunin til málið**
Støðan viðv. góðselevatorunum á Bacalao og í Sjóvinnuhúsinum.

**Lýsing av málinum**
Góðselevatorarnir í Sjóvinnuhúsinum og Bacalao eru helst líka gamlir sum bygningarnir, t.v.s. áleið 60 ár (+/-), og eru nú í so ringum standi, at teir hava mist góðkenningina frá myndugleikanum og eru tí óvirknir. Tað eru gjørdar fleiri kanningar av støðuni og royndir at feilfinna og umvæla, men bæði strukturelli og eltekniski parturin er í so ringum standi, at tað ikki ber til at umvæla longur. Neyðugt verður tí at útskifta góðselevatorarnar til aðrar nýggjar elevatorar, um bygningarnir skulu hava góðselevatorar framyvir.
Tórshavnar havn hevur í mars 2025 heitt á tvær elevatorfyritøkur (KONE Elevator ávíkavist El-net saman við PD Elevator) um at kanna viðurskiftini nærri og koma við uppskotum og tilboðum upp á at útskifta og/ella albøta báðar góðselevatorarnar. Bæði feløgini mæla til at útskifta heldur enn at albøta, tí ein albøting kann væntast at kosta nærum líka nógv sum at útskifta.

Tilboðið frá KONE Elevator er áljóðandi 1,2 mió. kr. fyri góðselevator til Bacalao, og 1,1 mió. kr. fyri góðselevator til Sjóvinnuhúsið. Íroknað tilboðini er niðurtøku av gomlu elvatorunum.

Tilboðið frá EL-Net / PD Elevator er 1,025 mió. kr. fyri góðselevator til Bacalao og 0,954 mió. kr. fyri góðselevator til Sjóvinnuhúsið. Íroknað tilboðini er niðurtøka av gomlu elevatorunum, sum er príssett til 154 tkr fyri hvønn elevator.

Fyri at fáa tilgongdina at fáa nýggjar elevatorar at ganga so skjótt sum gjørligt, hevur Tórshavnar havn longu tikið av tí partinum av tilboðnum frá PD Elevator, sum er at taka gomlu elevatorarnar niður. Niðurtøkan, ið kostar 308 tkr., verður fíggjað av rakstrarjáttanini ha Tórshavnar havn og verður væntandi liðugt ultimo oktober 2025.
Tá ið teir gomlu elevatorarnir eru tiknir niður, kunnu endalig mát takast, áðrenn framleiðslan kann fara í gongd. Framleiðslutíðin er 10-12 vikur, og uppsetingartíðin 3 vikur fyri hvønn elevator.
Galdandi myndugleikakrøv áseta krøv til at grøvin undir elevatorunum skal vera minst 1,3 m djúp (til trygdarrúm), og tískil verður neyðugt at dýpa gravirnar umleið 0,35 m og stoypa nýggjn botn og veggir undir elevatorunum. Eisini verður neyðugt við nýggjum el-heysiportri frammanfyri elevatorin á Bacalao, nýggjum elveitingum og møguliga ventilatión í elevatorskaktunum. Hesi arbeiðið eru mett til umleið 0,3 mió kr í alt.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
J.Nr. 25/08024-19 : Tilboð frá El-net / PD Elevator upp á góðselevatorar

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til at taka av tilboðnum frá El-net / PD Elevator upp á nýggjar góðselevatorar til Bacalao og Sjóvinnuhúsið; at játtaðar verða 2,0 mió av íløgukarminum P00 hjá Tórshavnar havn til arbeiðið, og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 02. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 10. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Uppsetan av góðselevatorunum er í gongd. Elevatorurin á Bacalao er uppsettur, men tó ikki tikin í nýtslu enn, meðan elvatorurin í Sjóvinnuhúsinum eftir ætlan verður uppsettur í september-oktober 2026.
Upprunaliga vórðu avsettar 2,0 mió til verkætlanina, harav 1,7 mió til sjálvar elevatorarnar og 0,3 mió til ymisk atknýtt arbeiðið í hesum sambandi, t.d. dýping av skaktunum, el-portur og elveitingar. Upphæddin á 0,3 mió bygdi á eina meting útfrá vitanini, ið tá var tøk. Nú arbeiðið líður væl áleiðis er greitt, at hesi atknýtt arbeiðini eru meiri umfatandi enn áður mett og verða nú mett at kosta uml 0,58 mió.

**Skjøl:**
J.Nr. 25/08024-27: Kostnaðarmeting elevatorar

**Tilmæli**
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til at játta 300 tkr. aftrat til verkætlanina P54/P55 av løgukarminum P00 hjá Tórshavnar havn, og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 01. september 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 09. september 2026:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 17. september 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við tólv atkvøðum fyri, einari atkvøðu ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

# 259/26 NAX : Leigusáttmáli um grundøki á Sundi - broyting av endamálsorðing

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 01.09.2026 | 38/26 | 26/06036-1 |
| 2 Býráðsfundur | 17.09.2026 | 259/26 | 26/06036-1 |

**Upprunin til málið**
Fyrispurningur frá NAX um at fáa tillaga endamálsorðingina í leigusáttmálanum um grundøki á Sundi.

**Lýsing av málinum**
NAX, ið hevur leigusáttmála við Tórshavnar havn um grundøki á Sundi, hevur spurt um at fáa broytt endamálsorðingina fyri leigusáttmálan um grundøki á Sundi.

Sambært leigusáttmálanum, ið er undirskrivaður í 2020, er endamálsorðingin soljóðandi:

*"Økið verður at nýta sum grundøki til bygging av høll til goymslu av útgerð til tiltøk, sum leigarin hevur á sjónum".*

Leigarin ynskir at fáa broytt orðingina soleiðis, at bygningurin kann nýtast til ferðavinnutiltøk, og ikki einans til goymslu.

Partarnir hava viðgjørt fyrispurningin og eru komnir ásamt um hesa orðing:

*"Økið verður at nýta til bygging av høll til ferðavinnutiltøk, sum leigarin hevur á sjónum, og til goymslu av útgerð í hesum sambandi."*

**Lógir, ásetingar o.a.**
Almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu

**Upplýsingar frá umsitingini**
Leiguøkið liggur á í umráðispart B1 í 3. Grundumráði, ið sambært byggisamtyktini hevur hesar ásetingar:
*Umráðisparturin verður sum heild lagdur til endamál, ið hava beinleiðis við **havnarakstur at gera**, fyrst og fremst skrivstovur og goymslur í samband við skipaferðslu og vøruflutning og tílíkt og til virksemi, ið hava samband við hesi, t.e. tænastuvirksemi og bilstøðlar o.t.*

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- J.Nr. 17/01437 : Umsókn frá NAX um leigu av øki á Sundi til bygging av høll til útgerð til ferðavinnu á sjónum.
- J.Nr. 25/10211 : Umsókn um endurgjald fyri planering á grundøki matr.nr.53-2 Sund hjá spf. Nax.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
J.Nr. 17/01437-33 : Leigusáttmáli NAX á Sundi

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>17. september 2026 | Blað nr.: 990<br>Forkvinnunnar merki: |

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli**:
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til at broyta endamálsorðingina fyri leigusáttmálan hjá NAX á Sundi til hesa orðing:

*"Økið verður at nýta til bygging av høll til ferðavinnutiltøk, sum leigarin hevur á sjónum, og til goymslu av útgerð í hesum sambandi."*

og at málið verður beint í býráðið.

**Havnanevndin 01. september 2026:** Samtykt at broyta endamálsorðingina fyri leigusáttmálan hjá NAX á Sundi til hesa orðing: *"Økið verður at nýta til bygging av høll til ferðavinnutiltøk, sum leigarin hevur á sjónum, og til goymslu av útgerð o.a. í hesum sambandi."* og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 17. september 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá havnanevndini, ið varð samtykt við tólv atkvøðum fyri, einari atkvøðu ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

# 260/26 Matr.nr. 11a, Kaldbaks bygd. Leigusáttmáli millum Búnaðarstovuna og Tórshavnar kommunu. Lendi til eina transformarastøð.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Kaldbaksnevndin | 15.06.2026 | 10/26 | 25/02706-10 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 31.08.2026 | 176/26 | 25/02706-10 |
| 3 Fíggjarnevndin | 09.09.2026 | 181/26 | 25/02706-10 |
| 4 Býráðsfundur | 17.09.2026 | 260/26 | 25/02706-10 |

**Upprunin til málið.** SEV hevur sent kommununi umsókn um byggiloyvi til eina transformara støð á part av matr.nr. 11a, Kaldbak.

**Lýsing av málinum.**

SEV hevur søkt um byggiloyvi til eina transformarastøð í Kaldbak, til býlingin við Á. Matr.nr. 11a, Kaldbak.

Málið um byggiloyvi og staðseting, er viðgjørt í Byggi- og býarskipanarnevndini 12.02.2024, í Kaldbaks nevndini 02.04.2024 og í fíggjarnevnd 17.04.2024 sí mál 23/06902 seinasta samtykt skjal nr. 9.

Síðani tá hevur kommunan verið í samráðingum við Búnaðarstovuna, um aðrar møguleikar til staðseting, og fyriliggur nú ein endalig staðseting sí kortskjal 25/02706 skjal nr. 23.

Vísandi til at talan er um festi jørð, krevur Búnaðarstovan, at kommunan leigar lendið til Transformarastøðina hjá SEV.

Búnaðarstovan hevur sent kommununi eitt uppskot til leigusáttmála. Talan verður um ein 10 ára leigusáttmála sum umfatar eitt lendi á uml. 73 fermetrar. Kostnaður. kr. 500 pr. ár. og eitt eingangsgjald fyri avgreiðslu á kr. 2.000.

**Lógir, ásetingar o.a. Matrikkullógin og Viðtøkur fyri SEV.**

Sambært grein 10 stk. 1, í viðtøkunum fyri SEV framgongur**,** at hvør limakommuna letur innanfyri kommunumark felagnum ókeypis til handa ta vídd, ið tørvar til háspennings- og lágspenningsleiðingar, transformarastøðir og til vegir til støðirnar.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☒ Nei ☒**

**Skjøl.**
25/02706-23. Nýggjur leigusáttmáli.
25/02706-21. Nýggj tekning yvir leigara økið.
25/02706-22. Skriv/góðkenning frá Yvirfriðingarnevndini.
25/02706-18. Skriv frá friðingarnevndini, Streymoyar sýsla.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | | | | 6111 | | 2500 |

Rakstrarkontoa 6111, aðrar útreiðslur ( traðir og urtagarðskyttir v.m.

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 2500 |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 500 |

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til umvegis kaldbaksnevndina, byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina, at leiga lendið frá Búnaðarstovuni í 10 ár, sí sáttmála skjal 25/02706 – 23.

**Kaldbaksnevndin 15. juni 2026:** Kaldbaksnevndin tekur undir við valdu staðsetingini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. august 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 09. september 2026:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipananevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 17. september 2026:** Einmælt samtykt.

# 261/26 Ábyrgd av tænastum til fólk við demenssjúku undir fólkapensjónsaldur flutt til kommunurnar - fígging

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 08.09.2026 | 104/26 | 26/05097-1 |
| 2 Heilsu- og eldranevndin | 03.09.2026 | 21/26 | 26/05097-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 09.09.2026 | 184/26 | 26/05097-1 |
| 4 Býráðsfundur | 17.09.2026 | 261/26 | 26/05097-1 |
| 5 Býráðsfundur | | | 26/05097-1 |

**Upprunin til málið**
Upprunin til málið er, at ábyrgdin av tænastum til fólk við demenssjúku undir fólkapensjónsaldur bleiv flutt til kommunurnar 1. januar 2026.

**Lýsing av málinum**
Løgtingið hevur samtykt, at kommunurnar ikki longur skulu rinda kommunala rakstrarstuðulin til lærlingaundirvísing til landið. Rakstrarstuðulin til lærlingaundirvísing, sum kommunurnar sleppa undan at rinda, skal fíggja yvirtøkuna av ábyrgdini av tænastunum til fólk við demenssjúku undir fólkapensjónsaldur.

Upprunaliga játtanin til 4201 Endurgjald til lærlingaútreiðslur í 2026 er 1.656 t.kr., samstundis er eitt framflutt hall frá undanfarnum árum á 858 t.kr, sostatt er tøka netto játtanin í 798 t.kr. at flyta til 2722 – Tilboð og tiltøk.

2026

**4201 - Endurgjald til lærlingaútreiðslur**

| | t.kr. |
|---|---|
| Upprunalig fíggjarætlan 2026 | 1.656 |
| Framflutt hall frá undanfarnum árum | -858 |
| | **798** |
| Eykajáttan 2026 Flutt av 4201 til 2722 | **-798** |
| | **0** |

**2722 – Tilboð**

| | t.kr. |
|---|---|
| Fíggjarætlan 2026 | 0 |
| Framflutt hall frá undanfarnum árum | 0 |
| | **0** |
| Eykajáttan 2026 Flutt á 2722 frá 4201 | **798** |
| | **798** |

Mettur fíggjartørvur í 2027 á 2722 Tilboð og tænastur til at veita tænastur til fólk við demenssjúku undir fólkapensjónsaldur, sum kommunan hevur fingið sambært lógarbroytingini 1. januar 2026, er 2.500 t.kr.

1.656 t.kr. verður flutt frá 4201 Endurgjald til læringaútreiðslur í samband við fíggjarætlan 2027 og mettur tørvur á meir fígging er sostatt 844 t.kr.

2027

**2722 – Tilboð**

| | t.kr. |
|---|---|
| Fíggjarætlan 2027, mettur fíggjartørvur | 2.500 |
| Flutt frá 4201 - Endurgjald fyri lærlingaútreiðslur | -1.656 |
| ***Mettur tørvur á meir fígging ísv. fíggjarætlan 2027*** | **844** |

**Lógir, ásetingar o.a.**
Víst verður til løgtingsmálini:

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m.
(Ábyrgdin av tænastum til fólk við demenssjúku undir fólkapensjónsaldur verður flutt til kommununar), sum broytt 4. desember 2025.

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um yrkisskúlar og løgtingslóg um skúladepil í Marknagili, broytt 24. november 2025
(Avtaka kommunala rakstrarstuðulin til lærlingaundirvísing)

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| **Játtast av:** | **Játtast á:** | |
|---|---|---|

| Deild | Verk-ætlan | Navn |
|---|---|---|
| 4201 | | Endurgjald til lærlinga-útreiðslur |

| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |
|---|---|---|---|
| 2722 | | Tilboð | |

| Upphædd |
|---|
| 798 t.kr. |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**:
Miðfyrisitingarstjórin, Trivnaðarstjórin og Heilsu- og umsorganarstjórin mæla til,

- at 798 t.kr. verða fluttar av kontu 4201 Endurgjald til lærlingaútreiðslur á kontu 2722 Tilboð og tiltøk og at konta 4201 samstundis verður niðurløgd. Tørvur á meir fígging í 2026 verður kláraður innanfyri verandi játtan á 2722 Tilboð og tiltøk.
- at hædd verður tikin fyri tørvinum á meir fígging á 2722 Tilboð og tiltøk á fíggjarætlanini fyri 2027.
- at málið verður beint í mentamálanevndina og heilsu- og eldranevndina til kunningar.
- at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina sum eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir.

**Heilsu- og eldranevndin 03. september 2026:** Kunnað varð um málið.

**Mentamálanevndin 08. september 2026:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 09. september 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 17. september 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við fyristu viðgerð við ellivu atkvøðum fyri, einari atkvøðum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

# 262/26 Tilmæli um regulering av brúkaragjøldum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 09.09.2026 | 185/26 | 26/05986-1 |
| 2 Býráðsfundur | 17.09.2026 | 262/26 | 26/05986-1 |

**Upprunin til málið**
Ein partur av inntøkunum hjá kommununi koma frá brúkaragjøldum. Í 2025 vóru staðfestu inntøkurnar frá brúkaragjøldum 114.430 t.kr., har av størsti parturin kom frá dagstovnaøkinum 57.754 t.kr. og eldraøkinum 30.848 t.kr.

Sum støðan er í dag er eingin felags leistur fyri javning av brúkaragjøldum í Tórshavnar kommunu. Ætlanin er at fáa samtykt ein leist, sum brúkargjøld frameftir verða reguleraði eftir.

**Lýsing av málinum**
Brúkaragjøld verða ikki javnað saman árliga í samband við fíggjarætlanina, og av tí sama fylgja øll brúkaragjøldini ikki vøkstrinum í rakstrarútreiðslunum. Tá brúkaragjøld verða reguleraði, hevur verið vanligt at árliga javningin í kommununi einans tekur útgangsstøði í prístalinum, men nógv tann størsti vøksturin í rakstrarútreiðslunum hjá kommununi er lønarvøkstur. Haraftrat sveiggjar prístalið ár undan ári. Prístalið var í 2022 7,7 %, í 2023 4,7 %, í 2024 2,0 % og í 2025 0,9 %. Væntaður lønarvøkstur hjá kommununi í 2027 er umleið 4 %.

Brúkaragjøldini á eldraøkinum hava seinni árini fylgt ein fastan leist fyri øll eldrasamstørvini í Føroyum, har hesi verða reguleraður sambært kunngerð um javningarprosent til almannaveitingar frá undanfarna ári.
Javningin av almannaveitingum (og lestrarstuðlinum, ið fylgir javningarprosentið fyri almanna-veitingum) er ásett í løgtingslóg nr. 64 frá 30. apríl 2018 um javningarprosent til almannaveitingum. Javningarprosentið verður útroknað sum miðaltal av

1) prosentvísu broytingini av lønarkarminum hjá Fíggjarmálaráðnum í 12 mðr skeiðnum, sum endaði 1/10 í inniverandi ári og
2) prosentvísu broytingini í brúkaraprístalinum 2. ársfjórðing í inniverandi ári, í mun til 2. ársfjórðing árið fyri.

Er roknaða javningarprosentið hægri enn prosentvísa hækkingin í lønarkarminum, verður javningarprosentið sett til prosentvísu broytingina í lønarkarminum.

Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð javningarprosentið fyri komandi árið í seinasta lagi 1. november.

Tórshavnar kommuna hevur eina røð av brúkaragjøldum – alt frá dagstovnagjøldum, gjøld fyri búpláss á røktarheimi, heimahjálp og umlætting, musikk- og kvøldskúlagjøld, atgongugjøld til svimjing, leiga av hølum og hallum og gjøld fyri burturbeining av burturkasti.

Nøkur gjøld eru fyri tænastur til borgarar, har meginparturin av útreiðslum eru til lønir, meðan onnur eru fyri gjøld, ið ikki hava eins høgar starvsfólkaútreiðslur. Tað gevur tí meining at gera mun á, hvussu gjøldini verða javnaði.

Mælt verður til at gera tvær ymiskar javningar:

1) brúka javningarprosentið til almannaveitingar til gjøldini á eldraøkinum og á teimum har værur (t.d. orka) fylla nógv
2) brúka eitt indeks, t.d. 90% løn og 10 % brúkaraprís til onnur gjøld

Gjøldini fyri tænastur á dagstovnaøkinum verður javnað sambært einum býtislykli, ið verður roknaður út eftir kostnaðinum, undantikið húsaútreiðslur, tó mesta lagi 30% av kostnaðinum, sambært dagstovnalógini. Tó er foreldragjaldið í 2026 ávikavist 23% av kostnaðinum fyri vøggustovu, og 27% av kostnaðin fyri hini dagstovnatilboðini – í 11 mánaðir. Verður foreldragjaldið fyri vøggustovu tað sama í 2027, sum í 2026 er foreldragjaldið 19% av kostnaðinum.

Uppskot til javning í 2027, brúka staðfest tøl:

- Ársmiðal prísvøkstur í 2025: **0,90%**
- Lønarkarmur 1. okt 2025: **3,87%**
- Javningarprosent í 2026: **2,71%** *(javnað var við 3,6% á eldraøkinum í 2026, sum var javningarprosentið í 2025)*

**Javning í 2027:**

- Eldraøkið og vørutungar tænastur: **2,71%**
- Lønartungar tænastur: **3,57% (=90%*3,87 + 10%*0,90)**

Sum útgangsstøði verða øll gjøld javnaði samstundis. Undantøk kunnu gerast til hendan leistin um okkurt serligt er galdandi. Hetta skal tó lýsast og positivt samtykkjast sum undantak til meginregluna saman við fíggjarætlanini.

Við at hava ein fastan leist fyri, hvussu øll gjøld hjá kommununi verða javnaði, og at javningin er árliga, verður hækkingin varligari og lættari hjá brúkarunum at gjalda, heldur enn um gjøldini verða reguleraði við fleiri ára millumbili. Tá er ofta neyðugt at hækka gjøldini munandi fyri at fáa samsvar millum gjøld og vøkstrinum í rakstrarútreiðslunum.

Ætlanin er, at býráðið umvegis fíggjarnevndina viðgerð málið og tekur støðu til, um ein fastur leistur skal vera, t.d. í sambandi við árligu fíggjarætlanina, og hvussu gjøldini vera reguleraði.

**Lógir, ásetingar o.a.**
- Løgtingslóg nr. 64 frá 30. apríl 2018 um javningarprosent til almannaveitingar, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 145 frá 15. november 2021
- Kunngerð nr. 162 frá 23. oktober 2025 um javningarprosent til almannaveitingar 2026

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | x | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

Brúkargjøld, ið verða javnað sambært javningarprosent ásett í kunngerð um javningarprosent fyri inniverandi ár, t.e. í 2026, verða brúkaragjøld javnað sambært kunngerð um javningarprosent til almannaveitingar 2026, t.e. 2,71%. Til samanberingar var javningarprosentið í 2025 3,6%, ið brúkaragjøldini fyri 2026 á eldraøkinum eru javnaði við, rundað upp til næmastu heilu krónu, har tað gevur best meining, galdandi frá 1. januar 2026.

Um brúkaragjøldini verða javnað 2,71% í 2027, gevur hetta eina meirinntøku á 1.536 t.kr. í 2027. Tá er dagstovnaøkið ikki tikið við. Brúkaragjøldini á eldraøkinum fyri búpláss, heimahjálp og umlætting standa fyri 836 t.kr.

Fíggjardeildin umsitur samlað yvirlit yvir øll galdandi brúkaragjøld og Snarskivan ger øll galdandi brúkaragjøld tøk á heimasíðuni hjá kommununi.

**Tilmæli**:
Kommunustjórin, fyrisitingarstjórin, trivnaðarstjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla til, at býráðið, umvegis fíggjarnevndina, samtykkir:

- at øll brúkaragjøld frameftir verða javnaði árliga í samband við fíggjarætlanina áðrenn 1. desember at verða galdandi frá 1. januar árið eftir
- at brúkaragjøld fyri eldraøkið og vørutungar tænastur (undantikið dagstovnaøkið) verða javnað samsvarandi javningarprosentið frá undanfarna ár (t.e. at gjøld fyri 2027 verða javnaði samsvarandi kunngerð fyri almannaveitingar 2026, 2,71%)
- at lønartungar tænastur, (undantikið dagstovnaøkið), verða javnað 90% løn+10% brúkaraprístal fyri undanfarna ár, í 2027 er tað 3,57% (=90%*3,87+10%*0,90)
- at dagstovnaøkið verður javnað sambært býtislykli, ið býráðið samtykkir áðrenn 1. desember at verða galdandi frá 1. januar árið eftir
- at gjøld, ið ikki hava verið dagførd í fleiri ár, verða dagførd í stigum í 3-5 ára, til tey eru komin á tíðarhóskandi gjald og síðani javnaði árliga eftir samtykta leistinum.

**Fíggjarnevndin 09. september 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Høgni Vilhelmsen og Kári Johansen, tekur ikki undir við tilmælinum og mælir til at faknevndirnar viðgera príshækkingar, áðrenn tær koma í fíggjarnevndina.

**Býráðsfundur 17. september 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

# 263/26 Gjøld fyri íbindingar og tænastur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 09.09.2026 | 186/26 | 26/06941-1 |
| 2 Býráðsfundur | 17.09.2026 | 263/26 | 26/06941-1 |

**Upprunin til málið**
Í samband við fíggjarætlanararbeiði 2027 er komið á gjøld, sum ikki eru dagførd. Somuleiðis er staðfest, at kommunan veitir tænastur, sum í vavið eru vaksnar, men tilsvarandi játtan ikki er tilskilað hesar tænastur.

**Lýsing av málinum**
Ítøkiliga er talan um at dagføra íbindingargjaldið í samband við byggiloyvi, soleiðis at útrokningargrundarlagið verður ein takstur pr. PE (Persónsekvivalent) kr. 3.000 í staðið fyri kr. 750. Harumframt verður skotið upp at hækka gjald fyri parkeringsloyvi í miðbýnum frá kr. 780 til 1780 árliga íroknað MVG.

Eisini er talan um uppskot at krevja gjald fyri viðgerð av byggimálum, har søkt verður um frávik. Gjaldið, ið skotið verður upp er kr. 10.000 fyri hvørja umsókn við fráviki.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Tórshavnar býráð hevur í málið 2008-0191 samtykt at íbindingargjald verður kravt í samband við bygging.

Kunngerð nr. 72 frá 27. juni 2016 um bygningskunngerð 2017, sum heimilar kommunum at taka gjald fyri byggiloyvir.

Parkeringpolitikkurin fyri Tórshavnar kommunu frá 2015

Býráðssamtykt frá 30. mars 2017 um parkeringsloyvir í miðbýnum í Havn

**Upplýsingar frá umsitingini**
Í hesum málinum verða trý gjøld viðgjørd: Íbindingargjøld, gjald fyri viðgerð av byggimálum við fráviki og gjald fyri parkeringsloyvir í miðbýnum í Havn. Niðanfyri eru hesi lýst hvør sær.

*Íbindingargjøld*
Í samband við dagføring av íbindingar gjøldum verður víst til mál 2008-0191 Íbindingargjald. Í málinum verður greitt frá søguligu gongdini í samband við íbindingargjøld. Í 2008 verður samtykt at fara frá einum gjaldi á 10 kr/$m^2$ til ein skipan, har goldið var sambært umrokning av bygdum fermetrum til PE (Persónsekvivalentar), sum eru mát fyri ávirkan av hvørjum íbúgva á útlátið í kloakkirnar og nýtsluna av vatnið. Uppskotið varð samtykt 31. januar 2008.

Sum dømi var íbindingargjaldið tá:
- Sethús á 100 m² eitt plan kr. 23.750
- Sethús á 100 m² við kjallara: kr. 39.900
- Sethús á 100 m² við kjallara og loft kr. 49.875.

Eftirfylgjandi varð biðið um at málið kom aftur á skrá til tillaging. Á býráðsfundi 2. mai 2012 kom soljóðandi uppskot til støðutakan:

1. Útrokningarhátturin verður soleiðis, at gjaldið verður útroknað í mun til mest loyvdu bygging á hvørjum matrikli (nettonýtslustig), og PE-eindir/fermetur, sambært skjal 2008-0191/16.

2. Gjaldið fyri hvørja PE-eind, verður ásett til kr. 1.500, og verður hetta tal nýtt saman við nettonýtslustiginum í fyriliggjandi uppskoti til broyting av nettonýtslustigum í almennu byggisamtyktini.
3. Verður játtað frávik at byggja meira enn mest loyvda nettonýtslustig, verður gjaldið regulerað soleiðis, at goldið verður fyri allar bygdu fermetrarnar.
4. Útrokningarhátturin verður ikki galdandi fyri broytingar ella víðkan av verandi bygningum. Tó so at um broytingar av verandi bygningum viðføra, at nýggjar ella eyka leiðingar skulu leggjast til bygningarnar, rindar eigarin eftir rokning tað sum broytingin av leiðingum kostar.
5. Íbindingargjøld fyri øll sløg av kommunalum útstykkinginum og byggiætlanum verða innroknað í søluprísin av grundøkinum.
6. Íbindingargjaldið fyri allar privatar útstykkingarætlanir verður goldið tá ið byggiloyvið verður útskrivað til hvønn einstakan bygning á hvørjum av grundstykkjunum.
7. Íbindingargjaldið fyri allar privatar byggiætlanir av húsum við fleiri bústaðar- ella nýtslueindum, so sum íbúðarblokkar, skrivstovubygningar, vinnubygningar o.l. verður goldið soleiðis, at helvtin av gjaldinum verður goldið, tá ið útstykkingarloyvið verður útskrivað, og hin helvtin tá ið byggiloyvið verður útskrivað til hvønn einstakan bygning.
8. Serlig mál, har ávísar byggingar viðføra serliga stórar útreiðslur fyri kommununa, verða viðgjørd einsæris, og kann kommunan í slíkum førum krevja gjald eftir rokning í mun til útreiðsluna.

Hetta málið bleiv samtykt við teirri broyting, at gjaldið skuldi verða 750 kr/PE.

Tað kann tó upplýsast, at praksis í dag er, at gjaldið verður goldið samlað í samband við byggiloyvi og ikki lutvíst við útstykkingarloyvi og lutvíst við byggiloyvi. Harafturat verður íbindingargjaldið ikki íroknað sølukostnað av kommunalum grundstykkjum, men goldið í samband við byggiloyvi. Tó hevur gjaldið á 750 kr/PE verið galdandi síðani 2012, og í veruleikanum afturvirkandi frá 1. mai 2011, tí í samtyktini frá 2. mai 2012, var samtykt, at tey, ið høvdu goldið áður galdandi gjald fram til 1. mai. 2011, skuldu fáa munin endurrindaðan.

Tað sæst ikki, hví Býráðið í 2012 valdi, at gjaldið skuldi verða helvtina av tí, sum umsitingin tá mælti til. Men tað kann staðfestast, at kostnaðurin av einum sethúsum í 2012 lág millum 1,8 og 2,3 mió. kr. Hetta merkir, at umsitingin mælti til, at íbindingargjaldið, skuldi verða uml. 2 prom. av húsakostnaðinum (100 $m^2$ sethús við kjallara). Býráðið samtykti íbindingargjaldið til at vera uml 1 prom. av húsakostnaðinum. Í dag er sethúsakostnaðurin í Havn uml. 4.2 mió kr. og skuldi íbindingargjaldið tí verið uml. 42.000 kr fyri eini sethús á 100 $m^2$ við kjallara. Niðanfyri eru sett dømi fyri, hvat íbindingargjaldið vildi verið við verðandi taksti, við 1.500 kr/PE og við 3.000 kr/PE. Her sæst, at við einum gjaldi á 3.000 kr/PE svarar hetta mest til lutfalsliga kostnaðin av íbindingargjaldinum í mun til húsakostnaðin.

| **Dømi** | **750 kr/PE** | **1.500 kr/PE** | **3.000 kr/PE** |
|---|---|---|---|
| Sethús (500 $m^2$ gr. vídd) | 9.450 | 18.900 | 37.800 |
| Tvíhús/raðhús (300 $m^2$ gr. vídd) | 5.513 | 11.026 | 22.052 |
| Íbúð (pr. 100 $m^2$ íbúð) | 3.300 | 6.600 | 12.600 |

Fyri at venda burtur frá, at inntøkusíðan í samband við byggiloyvir verður útholað, verður mælt til at taksturin fyri hvønn PE verður dagførdur til 3.000 kr. Eftirfylgjandi eigur hesin takstur árliga at verða dagførdur.

Samstundis eigur reglugerðin fyri íbindingargjaldið verða broytt soleiðis, at taksturin fyri hvønn PE í punkt 2 verður broyttur. Eisini eiga punkt 5, 6 og 7 at verða strika, og staðin skulu setast inn 2 nýggj punkt við orðingunum:" Íbindingargjaldið fyri allar útstykkingarætlanir verður goldið tá ið byggiloyvið verður útskrivað til hvønn einstakan bygning á hvørjum av grundstykkjunum." og "Íbindingargjaldið fyri allar byggiætlanir av húsum við fleiri bústaðar- ella nýtslueindum, so sum íbúðarblokkar, skrivstovubygningar, vinnubygningar o.l. verður goldið tá ið byggiloyvið verður útskrivað til hvønn einstakan bygning".

*Gjald á umsóknir um byggiloyvi við fráviki*

Upprunin til uppskot um gjald á viðgerð av byggiloyvum við frávikum er at leysliga mett helvtin av øllum byggiloyvum eru byggiloyvir við frávikið. Hesi byggimál krevja nógv meira viðgerð enn umsóknir uttan frávik. Hetta tí at hesi mál umframt at tey krevja eina gjølligari greining av frávikinum, eisini skal fyrireikast til grannahoyring, møguliga partshoyring og nevndarviðgerð.

Hetta er tíðarkrevjandi viðgerð, sum alt annað líka vil seinka viðgerðina av teimum málum sum ikki hava frávik. Tað vil við øðrum orðum siga, at umsóknir við frávikum fáa ein forrætt fram um aðrar umsóknir. Mett verður, at eitt gjald á umsóknir við frávikum vil avmarkað talið av hesum umsóknum, so byggimálsviðgerðin yvirskipað verður stytt, umframt at inntøkurnar frá hesum gjøldum, um tær kunnu endurspeglast í játtanini fyri umsitingina av byggimálum, kunnu viðvirkað til ressursurnar, sum kunnu nýtast til byggmálsviðgerðina, økjast.

Sambært kunngerð nr. 72 frá 27. juni 2016 um bygningskunngerð 2017, sum heimilar kommunum at taka gjald fyri byggiloyvir, kann kommunan áseta gjald fyri viðgerð av byggiloyvum. Gjaldið má ikki verða meira enn kostnaður, sum beinleiðis ella óbeinleiðis stendst av viðgerðini.

Ein leyslig meting er, at ein málsviðgeri í miðal brúkar uml. 3 – 4 arbeiðsdagar eyka til eina umsókn, sum hevur frávik í mun til eina umsókn, sum ikki hevur frávik. Hetta merkir, at í miðal vil kostnaður í løn og øðrum útreiðslum til ein málsviðgera og onnur, sum hava við málið at gera verða uml. kr. 10.000.

*Dagføring av gjaldi fyri parkeringsloyvir í miðbýnum í Havn*
Síðani 3 mai. 2017 hevur tað verið møguligt, hjá borgarum, sum eru búsitandi í ávísum økjum í miðbýnum í Havn, og sum samstundis lúka ávísar treytir, sum eru settar í í reglugerðini fyri parkeringsloyvir fáa eitt parkeringsloyvi, sum gevur hesum borgarum rætt til at óavmarkað at parkera bil, sum er tilskilaður í givna loyvinum í avmerktum básum í ávísum økjum. Ein av hesum treytum er, at borgarin ikki skal kunna skipa parkering inni á egnum øki fyri undir 50.000 kr.

Fyri hetta loyvi skal borgarin gjalda 780 kr. árliga, íroknað MVG ella 65 kr mánaðarliga, íroknað MVG. Tað eru í dag 174 virkin parkeringsloyvir.

Seinastu árini er miðbýurin vorðin alt meira merktur av øktari ferðslu og har við eisini øktari parkering. Samstundis hevur deild 7610 Parkeringskipanin, sum umsitur parkeringsskipanina, ið umframt parkeringsloyvini eisini umsitur samskifti við fútan um parkeringsgjøld, seinnu árini verið merkt av, at útreiðslurnar ikki svara til inntøkurnar.

Í mun til ásetingarnar í treytunum fyri parkeringsloyvir kann í dag viðmerkjast, at 50.000 kr. er ein sera lágur kostnaður fyri at gera parkeringsøki inni á egnum matrikli. Um upphæddin á 780 kr. árliga var ásett sum eitt ávíst lutfall við minsta kostnaðin at gera parkeringsbás á egnum øki, so var hetta talið í 2017 1,56%. Mett verður, at minsta upphæddin fyri at gera ein parkeringsbás inni á egnum øki mitt í Havnini er munandi hægri enn ásetta markið, tó uttan at kunna siga, hvussu nógv hetta er.

Í donskum býum er gjaldið fyri parkeringsloyvir sera ymiskt frá býi til bý, og somuleiðis fyri nakrar býir eisini ymiskt, alt eftir, hvar í býnum loyvið er til. Odense hevur fast gjald á 600 kr., men har er talið av básum, sum kunnu nýtast avmarkað. Í Aalborg er gjaldið 2.600 kr., í Aarhus er gjaldið uml. 2.700 kr árliga og í Keypmannahavn er gjaldið millum kr. 1.235 og kr. 6.135. Samanumtikið verður tað tí mett, at gjaldið á 780 kr. árliga er lutfalsliga lágt.

Í dag hevur skipanin við parkeringsloyvum bæði jaliga og neiliga ávirkan á miðbýin. Jaliga ávirkanin er, tað er gjørligt at búgva í býnum, og hava lætta atgongd til bil, hóast ein ikki hevur møguleika fyri at parkera inni á egnum matrikli. Neiliga ávirkanin er, at upp til 174 parkeringsbásar í miðbýnum ikki eru heilt ella lutvíst tøkir hjá øðrum ferðandi í býnum, umframt at skipanin eisini er skeiklandi fyri møguleikarnar fyri at fremja býartætting í miðbýnum, tí møguleikin fyri fleiri parkeringsloyvum er sera avmarkaður. Tí eru fleiri orsøkir til at tálma nýtsluni av møguleikanum fyri parkeringsloyvum, enn at eggja til at nýta møguleikan.

Mett verður, at ein hækking av gjaldinum fyri parkeringsloyvir við kr. 1.000 um árið (83.33 um mánaðin) vil hava henda tálmandi virknað, tó uttan at møguleikin verður heilt burtur hjá teimum, sum hava ein veruligan tørv á hesum loyvi.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
2008-0191 Íbindingargjald
14/04932 Parkeringspolitikkur í Tórshavnar kommunu
16/01724 Átak parkeringspolitikkur - Parkeringsloyvir til íbúgvar í miðbýnum
17/02781 Átak parkeringspolitikkur - Parkeringsloyvir til íbúgvar í parkeringsøki 2 í miðmýnum

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**
2008-0191/18 Býráðið 02.05.12
14/04932-1 Parkeringspolitikkur í Tórshavnar kommunu
16/01724-23 Samtykt Býráðsfundur,30.03.2017 kl. 18:00
17/02781-9 Samtykt Býráðsfundur,22.11.2017 kl. 18:00
26/06941-3 Útrokning av íbindingargjaldi og depositum dømi 750 kr pr PE.pdf
26/06941-4 Útrokning av íbindingargjaldi og depositum dømi 1500 kr pr PE.pdf
26/06941-5 Útrokning av íbindingargjaldi og depositum dømi 3000 kr pr PE.pdf
26/06941-6 BK17 BK 17 - Kunngerð 72 juni 27 2016 .pdf

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli**:
Tekniski stjóri og Miðfyrisitingarstjórin mæla til at:

- Reglugerðin fyri íbindingargjøld verður broytt til soljóðandi, at galda fyri byggiloyvir, sum søkt verður um eftir 1. Januar 2027:
    1. Útrokningarhátturin verður soleiðis, at gjaldið verður útroknað í mun til mest loyvdu bygging á hvørjum matrikli (nýtslustig), og PE-eindir/fermetur, sambært skjal 2008-0191/16.
    2. Gjaldið fyri hvørja PE-eind, verður ásett til kr. 3.000, og verður hetta tal nýtt saman við nýtslustiginum í byggisamtyktini, sum byggingin, ið loyvið verður søkt um, verður skipað eftir. Gjaldið skal dagførast árliga.
    3. Verður játtað frávik at byggja meira enn mest loyvda nýtslustig, verður gjaldið regulerað soleiðis, at goldið verður fyri allar bygdu fermetrarnar.
    4. Útrokningarhátturin verður ikki galdandi fyri broytingar ella víðkan av verandi bygningum. Tó so at um broytingar av verandi bygningum viðføra, at nýggjar ella eyka leiðingar skulu leggjast til bygningarnar, rindar eigarin eftir rokning tað sum broytingin av leiðingum kostar.

5. Íbindingargjaldið fyri allar útstykkingarætlanir verður goldið tá ið byggiloyvið verður útskrivað til hvønn einstakan bygning á hvørjum av grundstykkjunum.
6. Íbindingargjaldið fyri allar byggiætlanir av húsum við fleiri bústaðar- ella nýtslueindum, so sum íbúðarblokkar, skrivstovubygningar, vinnubygningar o.l. verður goldið tá ið byggiloyvið verður útskrivað til hvønn einstakan bygning.
7. Serlig mál, har ávísar byggingar viðføra serliga stórar útreiðslur fyri kommununa, verða viðgjørd einsæris, og kann kommunan í slíkum førum krevja gjald eftir rokning í mun til útreiðsluna.

- Gjald verður lagt á allar umsóknir um byggiloyvi við fráviki, sum koma inn eftir 1. Januar 2027.
    1. Gjaldið fyri hvørja umsókn um frávik verður ásett til kr. 10.000.
    2. Gjaldið verður ikki afturgoldið, uttan so at viðgerðin ikki er byrjað, áðrenn umsóknin verður tikin aftur.
- Gjaldið fyri parkeringsloyvir í miðbýnum í Havn verður fyri loyvir í 2027 broytt til kr. 1780 um árið (kr. 148,33 um mánaðin) íroknað mvg.

**Fíggjarnevndin 09. september 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við tillagingunum fyri íbindingargjøld, tó við teirri broyting at PE-eindin verður ásett til kr. 1500,-.

Tikið verður eisini undir við at gjaldið fyri parkeringsloyvi í miðbýnum í Havn verður fyri loyvir í 2027 broytt til kr. 1780 um árið (kr. 148,33 um mánaðin) íroknað mvg.

Biðið verður eisini um, at umsitingin kemur aftur í nevnd við uppskoti um, hvussu gjøldini framyvir verða dagførd.

Málið verður beint í býráðið.

Ein minniluti, Høgni Vilhelmsen og Kári Johansen, tekur ikki undir við tilmælinum og mælir til at faknevndirnar viðgera príshækkingar, áðrenn tær koma í fíggjarnevndina.

**Býráðsfundur 17. september 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

# 264/26 Fíggjarætlan 2027, Tórshavnar kommuna

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.06.2026 | 162/26 | 26/04948-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 09.09.2026 | 187/26 | 26/04948-1 |
| 3 Býráðsfundur | 17.09.2026 | 264/26 | 26/04948-1 |

**Upprunin til málið**
Fíggjarnevndin skal sambært kommunustýrislógini leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið í seinasta lagi 1. oktober. Býráðið skal síðan viðgera uppskotið tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Hetta er ein sokallað teknisk framskriving av fíggjarætlanini 2026, sum er fyrsta stigið í sambandi við fyrireikingarnar og planleggingina av fíggjarætlanini 2027 hjá Tórshavnar Kommunu.

**Lýsing av málinum**
Tekniska framskrivingin av fíggjarætlanini 2026 er grundað á ta vitan og teir upplýsingar, ið eru tøkir í løtuni, og tekniska framskrivingin kann býtast upp í hesar tríggjar høvuðspartar:

1. Frakskriving av kommunuskattinum og skattinum av eftirlønargjøldunum.
2. Framskriving av rakstrarútreiðslunum.
3. Virksemisbroytingar eftir 1. desember 2025, tá fíggjarætlanin fyri 2026 varð samtykt.

**Ad. 1: Framskriving av kommunskattinum og skattinum av eftirlønargjøldum**
Búskaparráðið metir í várfrágreiðing sínari, frá apríl 2025, at føroyska bruttotjóðarúrtøkan, BTÚ, fer at vaksa 3,3% í ársins prísum í 2027. Í játtanarkørmunum hjá landinum, eisini frá apríl í ár, verða landsskattainntøkurnar framskrivaðar við 7,9% í 2027.

Tað er rættiliga stórur munur á metta búskaparvøkstrinum hjá Búskaparráðnum í 2027 og metta vøkstrinum í landsskattinum hjá Fíggjarmálaráðnum í 2027. Hetta kemst m.a. av, at Búskaparráðið hevur gjørt nýggjar og væl hægri metinar av búskaparvøkstrinum í 2025 og 2026 í várfrágreiðingini 2026 í mun til heystfrágreiðingina 2025. Í heyst metti Búskaparráðið vøksturin í BTÚ í leypandi prísum av verða 2,0%, meðan nýggja metingin í várfrágreiðingini sigur 5,8% í 2025.

Metingin og framskrivingin hjá Fíggjarmálaráðnum av landsskattinum eitt ár fram plagar at halda betri enn framskrivingin hjá Búskaparráðnum av BTÚ, sum er munandi truplari at framskriva samanborið við landsskattin.

Flestu greinarar kring heimin vísa á, at tað er óvanliga stór óvissa knýtt at øllum búskaparligum forsagnum í løtuni. Hetta kemst serliga av kríggi, hækkandi oljuprísum, inflatión og hækkandi rentum. ECB hevur nýliga hækkað rentuna 0,25% og fleiri rentuhækkingar eru væntandi.

Stóra óvissan leggur upp til varisligar metingar av inntøkunum hjá kommununi. Í fíggjarætlanaruppskotinum 2027 verður mett, at inntøkurnar fara at vaksa 5,5% samanborið við upprunaliga samtykta fíggjarlógaruppskotið 2026.

Hetta er við óbroyttum skattaprosentið á 19% og óbroyttum barnafrádrátti á 9.000 kr.

Skatturin av eftirlønargjøldum verður tó mettur at vaksa meira enn 7% í 2027 samanborið við upprunaliga fíggjarætlanina 2026, men frá 2027 og árini frameftir fer vøksturin í skattinum av eftirlønargjøldum at fylgja vøkstrinum í vanliga lønarskattinum. Hetta kemst av, at eftirlønarskattaprosentið nú er komið í eina fast legu.

**Ad 2: Framskriving av rakstrarútreiðslum**
Samlaðu rakstrarútreiðslurnar eru býttar sundur í lønir og rakstrarútreiðslur annars. Tað eru bert lønarútreiðslurnar av samlaðu rakstrarútreiðslunum, sum eru framskrivaðar í hesi fyrstu teknisku framskrivingini hjá kommununi. Lønirnar eru framskrivaðar við 4% frá FÆ-2026 til FÆ-2027. Hetta er grundað á væntaða vøksturin í sáttmálalønunum.

**Ad. 3: Virksemisbroytingar**
Virksemisbroytingarnar snúgva seg um lógarbroytingar og býráðssamtyktir eftir at fíggjarætlanin fyri 2026 varð samtykt umframt avleiddar broytingar í rakstrinum frá avhendaðum íløgum. Samanlagt kosta virksemisbroytingarnar, eftir at fíggjarætlanin fyri 2026 var samtykt, 45,5 mió. kr. Størstu virksemisbroytingarnar stava frá øktum virksemi undir greinunum børng & ung, undirvísing og almanna & heilsumál.

**Mett úrslit av rakstrinum í 2027 eftir tekniskar framskrivingar**
Í hesi fyrstu teknisku framskrivingini av FÆ-2026, sum er fyrsta grundarlagið undir fíggjarætlanini 2027 vaksa inntøkurnar 5,48% og rakstrarútreiðslurnar 6,28%. Í hesi fyrstu teknisku framskrivingini vaksa rakstrarútreiðslurnar sostatt meira enn mettu inntøkurnar. Tórshavnar Kommuna hevur vanliga sett sær sum innanhýsis mál, at rakstrarútreiðslurnar skulu vaksa minni enn mettu inntøkurnar.

Í hesi teknisku framskrivingini eru 281.726 t.kr. eftir til skattafíggjaðar íløgur í 2027. Tá er Tórshavnar Havn tikin burtur úr framskrivingini.

**Skjøl**
-Tíðarætlan Fíggjarætlan 2027
-Teknisk framskriving av FÆ-2026

**Tilmæli**:
Kunnað verður um málið.

**Fíggjarnevndin 18. juni 2026:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Fyrsta tekniska framskrivingin av rakstrinum til fíggjarætlanina 2027 varð løgd fyri fíggjarnevndina til kunningar tann 18. juni 2026. Eftir hetta hevur umsitingin dagført búskaparmetingina og gjørt metingarnar neyvari við nýggjastu tølunum, sum eru tøk í løtuni. Nýggj inntøkumeting er gjørd. Lønarlistar umframt yvirlit yvir nýtt samtykt virksemi og lógarbroytingar eru dagførdar.

Sí talvuna niðanfyri til fíggjarætlan 2027.

| | | Roknskapur | Ætlan | Ætlan | Ætlan | Broyting 2026/2027 | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **1.000 kr.** | | **2025** | **2025** | **2026** | **2027** | **pct.** | **kr.** |
| | | | | | | | |
| **Inntøkur** | | | | | | | |
| 20501 | Kommunuskattur | 1.153.244 | 1.099.983 | 1.158.556 | 1.220.000 | 5,30% | 61.444 |
| 20601 | Felagsskattur | 71.666 | 58.000 | 58.000 | 60.000 | 3,45% | 2.000 |
| 20502 | Húsaleiguskattur | 1.268 | 1.000 | 2.000 | 2.000 | 0,0% | 0 |
| 20801 | Skattur af eftirlønarinngjøldum | 248.847 | 231.376 | 265.000 | 285.000 | 7,5% | 20.000 |
| 20802 | DIS, FAS og frádráttir | 35.322 | 35.322 | 34.000 | 34.000 | 0,0% | 0 |
| 20804 | Kommunanna partur av Veiðigjaldi | 697 | 800 | 800 | 800 | 0,0% | 0 |
| 20805 | Kommunanna partur av Tøkugjaldi | 294 | 200 | 200 | 200 | 0,0% | 0 |
| 20806 | Tænastugjald á tóm býli | 0 | 0 | 2.900 | 4.200 | 44,8% | 1.300 |
| | **Inntøkur íalt** | **1.511.338** | **1.426.681** | **1.521.456** | **1.606.200** | **5,6%** | **84.744** |
| | | | | | | | |
| **Rakstur** | | | | | | | |
| §1 | Kommunal fyrisiting | 109.199 | 106.920 | 113.025 | 120.718 | 6,8% | 7.692 |
| §2 | Almanna- og heilsumál | 341.784 | 354.202 | 370.740 | 390.447 | 5,3% | 19.707 |
| §3 | Børn og ung | 273.243 | 256.354 | 276.077 | 289.786 | 5,0% | 13.709 |
| §4 | Undirvísing | 59.564 | 57.753 | 61.468 | 67.313 | 9,5% | 5.845 |
| §5 | Mentan og frítíð | 84.772 | 81.001 | 83.728 | 87.779 | 4,8% | 4.051 |
| §6 | Teknisk mál | 171.758 | 167.051 | 173.734 | 181.345 | 4,4% | 7.611 |
| §7 | Kommunal virkir TK | 102.855 | 102.084 | 104.921 | 110.309 | 5,1% | 5.388 |
| | **Rakstur íalt uttan TH** | **1.143.174** | **1.125.365** | **1.183.682** | **1.247.696** | **5,4%** | **64.014** |
| §7 | Kommunal virkir TH | -48.266 | -36.985 | -37.975 | -37.680 | -0,8% | 295 |
| | **Rakstur íalt** | **1.094.908** | **1.088.380** | **1.145.707** | **1.210.016** | **5,6%** | **64.309** |
| | | | | | | | |
| **Aðrar útreiðslur** | | | | | | | |
| 20101 | Stuðul til rentuútreiðslur | 33.650 | 30.000 | 30.000 | 30.000 | 0,0% | 0 |
| 20910 | Aðrar inntøkur | 961 | 2.000 | 2.000 | 2.000 | 0,0% | 0 |
| | **Aðrar útreiðslur íalt** | **34.611** | **32.000** | **32.000** | **32.000** | **0,0%** | **0** |
| | | | | | | | |
| | **Úrslit áðrenn rentur** | **381.818** | **306.301** | **343.749** | **364.184** | **5,9%** | **20.435** |
| | | | | | | | |
| **Rentur** | | | | | | | |
| 20301 | Rentuútreiðslur TK | 11.148 | 10.962 | 8.867 | 8.195 | -7,6% | -672 |
| 20301 | Rentuútreiðslur TH | | 5.037 | 7.250 | 7.808 | 7,7% | 558 |
| 20401 | Rentuinntøkur TK | 0 | 0 | 0 | 0 | 0,0% | 0 |
| 20401 | Rentuinntøkur TH | | 0 | 0 | 0 | 0,0% | |
| | **Rentur íalt** | **11.148** | **15.999** | **16.117** | **16.003** | **-0,7%** | **-114** |
| | | | | | | | |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **370.670** | **290.303** | **327.632** | **348.181** | **6,3%** | **20.549** |
| | | | | | | | |
| | | | | | | | |
| | **Avdráttir TK** | **15.900** | **22.733** | **20.003** | **20.219** | 1,1% | 216 |
| | **Avdráttir TH** | **14.484** | **15.874** | **15.873** | **20.672** | 30,2% | 4.799 |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **340.286** | **251.696** | **291.756** | **307.290** | **5,3%** | **15.533** |
| | | | | | | | |
| | **Avlop til skattafíggjaðar íløgur hjá TK*** | **306.504** | **235.622** | **276.904** | **298.090** | **7,7%** | **21.185** |
| | | | | | | | |

Í uppskotinum til fíggjarætlan 2027 er roknað við, at kommunuskattaprosentið er 19,00% og barnafrádrátturin er 9.000 kr., ið er tað sama sum í dag. Høvuðstølini í talvuni eru býtt á kommunugreinar.

Niðanfyri er greitt nærri frá grundarlagnum og fortreytunum fyri dagførdu framrokningunum.

**Inntøkumeting**
Inntøkumetingin er gjørd av nýggjum í september, men hetta hevur ikki broytt metingina frá fyrr í ár.

*Kommunuskattur*
Við støði í teimum upplýsingum og ta vitan, sum var tøk í september 2026, verður kommunuskatturin mettur at hækka 5,3 % frá 2026 til 2027. Kommunuskatturin hækkar sostatt úr 1.158.566 t.kr. í FÆ-2026 upp í 1.220.000 t.kr. í hesum uppskotinum.

*Húsaleiguskattur*

Við støði í gongdini í inntøkunum frá húsaleiguskattinum í ár verður mett, at húsaleiguskatturin fer at verða 2 mió. kr. í 2026, sum er tað sama sum í FÆ-2026.

*Felagsskattur*
Mett verður at felagsskatturin í 2027 verður 60 mió. kr. Inntøkurnar frá felagsskattinum hevur sveiggja frá ári til ár, í FÆ26 var mett at felagsskatturin var 58 mió. kr.

*Skattur av eftirlønargjøldum*
Skatturin av eftirlønargjøldum er mett at hækka úr 265.000 t.kr. upp í 285.000 t.kr., sum er ein hækking á 7,5 %.

*Veiðugjald*
Kommunurnar fingu fyri fyrstu ferð part av veiðugjaldinum í 2025. Mett verður, at Tórshavnar kommuna aftur í ár fer at fáa á leið somu upphædd, sum í 2025 og 2026, t.e. 800 t. kr. í veiðugjaldi.

*Tøkugjald*
Kommunurnar fingu fyri fyrstu ferð part av tøkugjaldinum í 2025. Mett verður, at Tórshavnar kommuna aftur í ár fer at fáa á leið somu upphædd, sum í 2025 og 2026, t.e. 200 t. kr. í tøkugjaldi.

*DIS, FAS og frádráttir*
Inntøkurnar á hesi kontuni verða mettar at verða tær somu, sum mett var í 2026, t.e. 34.000 t.kr.

*Samlaðu inntøkurnar*
Samanlagt hækka inntøkurnar hjá Tórshavnar kommunu 5,6% í hesum uppskotinum samanborið við FÆ-2026.

**Rakstrarútreiðlsur**
Vanliga mannagongdin í uppskotinum til fíggjarætlan er, at samlaði vøksturin í rakstrarútreiðslunum skal liggja innanfyri karmin av metta vøkstrinum av samlaðu inntøkunum. Hetta merkir, at í hesum uppskotinum eigur vøksturin í samlaðu rakstrarútreiðslunum í mesta lagi at vera 5,6%.

í hesum uppskotinum til fíggjarætlan 2027 er samlaði vøksturin í rakstrarútreiðslunum 5,6%.

Munandi partur av samlaðu rakstrarútreiðslunum eru lønarútreiðslur. Samlaði lønarvøksturin var stórur frá 2026 til 2027. Hetta er fyrst og fremst orsakað av stórum vøkstri í sáttmálalønunum á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Flestu sáttmálarnir við tey stóru føroysku fakfeløgini ganga út í 2026, tá skulu nýggir sáttmálar gerast.

Niðanfyri er í stuttum greitt frá broytingunum í rakstrinum á ymsu greinunum í fíggjarætlanini 2027.

**§ 1 Kommunal fyrisiting:**
Á grein 1 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2027 við 6,8%, svarandi til góðar 7,7 mió. kr. Broytingin er í høvuðsheitum broytingar í sáttmálalønum, men eisini dýrkandi útreiðslur til kunningartøkni og KT-trygdarskipanir.

**§ 2 Almanna- og heilsumál:**
Á grein 2 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2027 við 5,3%, svarandi til 19,7 mió. kr. Eldraøkið er framskrivað við sama virksemi sum í dag og bert lønarhækkanir og samtyktar virksemisbroytingar eru lagdar afturat.

Sosiala deild er tillagað. Virknisfremjandi tiltøk eru sett í verk, so deildin brúkar minni av uttanhýsis fyriskipanum, sæst hetta aftur í fíggjarætlanini fyri 2027, ið bert hevur ein lítlan vøkstur. Framskrivingin er við sama virksemi sum í dag, men sambært kunngerð er vistarhald til forsturforeldur hækkað við 625 tús.kr.

**§ 3 Børn og ung:**
Á grein 3 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2027 við 5,0%, Á hesi greinini er tað serliga barnatalið, sum stýrir játtanini. Nógv størsti parturin av hækkingini er lønir, sum hækka við 9.450 mió. kr. Ein annar partur, ið ávirkar, er at vøggustovugjaldið hækkar bert 1 %, svarandi til 169 kr. fyri hvørt barn í vøggustovu. Somuleiðis er starvsaldurin fyri námsfrøðingar hækkaður eitt lønarstig.

**§ 4 Undirvísing:**
Á grein 4 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2027 við 9,5%. Á hesi greinini er tað talið av børnum og ungum í fólkaskúlunum, sum stýra játtanini. Munandi partur av vøkstrinum í rakstrarútreiðslunum fara til Skúlan á Trøðni til heildagstilboðið.

Aftrat hesum eru tað serliga tvey økir, sum gera, at raksturin á skúlunum hækkar. Allir skúlaskrivarar eru umflokkaðir, haraftrat er KT útbúnaður vorðin munandi dýrari og gjald fyri KT trygd. Eisini er sáttmálin við Nám fyri undirvísingartilfar dagførdur.

**§ 5: Mentan og frítíð:**
Á grein 5 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2027 við 4,8%. Á Musikkskúlanum hækkar raksturin góðar 700 tús. kr., sum er afturberingin til landið vegna økt tímatal.

Inntøkugrundarlagið hjá Ítróttarannlegg er nærum burtur. Tað eru tvinnar orsøkir til tað. Onnur er, at býráðið hevur samtykt at eingi tiltøk skulu verða í hallinum og hin, at øll ítróttarfeløg í Tórshavnar kommunu skulu fáa ókeypis hallartímar. Samlað ávirkar hetta raksturin við áleið 1,5 mió. kr.

Fyri flestu stovnarnar er sama virksemi framskrivað.

**§ 6: Teknisk mál:**
Á grein 6 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2026 við 4,4%, svarandi til uml. 7,6 mió. kr. Har av eru uml. 3,5 mió. kr. vegna øktar lønir.

Viðmerkjast skal, at moldgoymslurnar, sum áður hava verið undir konto 7110 Renovatión nú eru komin undir grein 6.

Í 2027 eru tað serliga og stóru útstykkingarnar í Argjahaganum og í Hoyvíkshaganum, sum hava virksemisbroytingar við sær. Í 2026 blivu virksemisbroytingarnar frá Havnarvegnum við íbindingum og Húsareynstunlinum býttar í 2 til 4, soleiðis at summar av hesum virksemisbroytingunum koma inn í 2027 eisini, og aðrar koma inn í 2027-2029.

Hetta merkir øktar viðlíkahaldskostnaðir fyri kommununa. Útrokningar vísa, at um allir hesir viðlíkahaldskostnaðir til m.a. vatnveiting, kloakkir, vegir, reinhald, asfalt, kavarudding og gøtuljós vórðu innførdir í einum, hevði tað kosta 9,9 mió. kr. Í staðin verður hesin viðlíkahaldskostnaður innførdur so líðandi, soleiðis at kostnaðurin fyri 2026 var 3,6 mió. kr. og fyri 2027 verður hetta uml. 3 mió kr.

Útreiðslurnar til røkt av bygningum eru í 2019-2026 øktar 36%. Tó hava lønarvøkstur og øktir tilfarskostnaðir merkt, at neyðugt er við 16% aftrat í øktari játtan, um støði frá 2020 skal haldast. Hetta kann ikki koma undir virksemisbroyting, men ynski verður sett fram um, at játtanin kann økjast tilsvarandi, møguliga yvir eitt 2 ára skeið.

Útreiðslur til Fríðkan og viðlíkahald og røkt av kirkjugørðum økjast við 7,4%, svarandi til 1,4 mió kr., men tað er íroknað, at raksturin av moldplássunum í kommununi fer inn undir hetta økið frá grein 7. Um henda flyting ikki verður roknað við, er talan um eina netto øking á undir 4%.

**§ 7: Kommunal virkir:**
Á grein 7 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2027 við 5,1%, svarandi til uml. 5,4 mió. kr., tá er Tórshavnar havn ikki við.

Mett verður, at netto rakstrarinntøkurnar hjá Tórshavnar kommunu frá Tórshavnar havn fara at verða umleið 0,3 mió kr. hægri í 2027 enn tær vóru í 2026, svarandi til 0,8%. Væntað netto úrslit er 37,7 mió kr.

Kommunala brennistøðin fer at kosta Tórshavnar kommunu 4,6% meira í rakstri í 2027 enn í 2026. Hetta er mest vegna lønarhækkingar og at nýggjur sáttmáli um ruskinnheintan kemur í gildið í oktober 2026. Hetta er eisini íroknað, at raksturin av moldplássunum er farin undir grein 6.

Brandstøðin fer at kosta 10,6% meira í rakstri í 2027 enn í 2026. Hetta yvirskipað vegna øktar útreiðslur til leigu av nýggjum sløkkibili, og vegna øktan kostnað til tilfar og útgerð.

Bussleiðin fer at kosta 3,3% meira í 2027 enn 2026, og er hetta mest vegna útreiðslur í samband við indeksregulering av sáttmálanum við veitaran.

**Skattafíggjaðar íløgur**
Í hesum uppskotinum eru góðar 298 mió. kr. eftir til skattafíggjaðar íløgur. Tórshavnar kommuna byggir nýtt Røktarheim á Stórubrekku, tí fer størsti parturin av íløguætlanini komandi ár til almanna og heilsumál. Íløgur verða somuleiðis gjørdar í børn og ung, undirvísing og mentan. Peningur verður settur av til Oyggjaleikir 2027. Innan tekniska øki verða størstu íløgurnar m.a. gjørdar í átøk innan orku og umhvørvið, kloakk og spillivatnsætlan, og renovatión.

**Tilmæli:**
Sambært kommunustýrislógini skal fíggjarnevndin leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið innan 1. oktober.

Býráðið skal viðgera uppskotið til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili.

Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember. Stjórnin mælir fíggjarnevndini til at leggja fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið.

**Fíggjarnevndin 18. juni 2026:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Fyrsta tekniska framskrivingin av rakstrinum til fíggjarætlanina 2027 varð løgd fyri fíggjarnevndina til kunningar tann 18. juni 2026. Eftir hetta hevur umsitingin dagført búskaparmetingina og gjørt metingarnar neyvari við nýggjastu tølunum, sum eru tøk í løtuni. Nýggj inntøkumeting er gjørd. Lønarlistar umframt yvirlit yvir nýtt samtykt virksemi og lógarbroytingar eru dagførdar.

Sí talvuna niðanfyri til fíggjarætlan 2027.

| | | Roknskapur | Ætlan | Ætlan | Ætlan | Broyting 2026/2027 | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **1.000 kr.** | | **2025** | **2025** | **2026** | **2027** | **pct.** | **kr.** |
| | | | | | | | |
| **Inntøkur** | | | | | | | |
| 20501 | Kommunuskattur | 1.153.244 | 1.099.983 | 1.158.556 | 1.220.000 | 5,30% | 61.444 |
| 20601 | Felagsskattur | 71.666 | 58.000 | 58.000 | 60.000 | 3,45% | 2.000 |
| 20502 | Húsaleiguskattur | 1.268 | 1.000 | 2.000 | 2.000 | 0,0% | 0 |
| 20801 | Skattur af eftirlønarinngjøldum | 248.847 | 231.376 | 265.000 | 285.000 | 7,5% | 20.000 |
| 20802 | DIS, FAS og frádráttir | 35.322 | 35.322 | 34.000 | 34.000 | 0,0% | 0 |
| 20804 | Kommunanna partur av Veiðigjaldi | 697 | 800 | 800 | 800 | 0,0% | 0 |
| 20805 | Kommunanna partur av Tøkugjaldi | 294 | 200 | 200 | 200 | 0,0% | 0 |
| 20806 | Tænastugjald á tóm býli | 0 | 0 | 2.900 | 4.200 | 44,8% | 1.300 |
| | **Inntøkur íalt** | **1.511.338** | **1.426.681** | **1.521.456** | **1.606.200** | **5,6%** | **84.744** |
| | | | | | | | |
| **Rakstur** | | | | | | | |
| §1 | Kommunal fyrisiting | 109.199 | 106.920 | 113.025 | 120.718 | 6,8% | 7.692 |
| §2 | Almanna- og heilsumál | 341.784 | 354.202 | 370.740 | 390.447 | 5,3% | 19.707 |
| §3 | Børn og ung | 273.243 | 256.354 | 276.077 | 289.786 | 5,0% | 13.709 |
| §4 | Undirvísing | 59.564 | 57.753 | 61.468 | 67.313 | 9,5% | 5.845 |
| §5 | Mentan og frítíð | 84.772 | 81.001 | 83.728 | 87.779 | 4,8% | 4.051 |
| §6 | Teknisk mál | 171.758 | 167.051 | 173.734 | 181.345 | 4,4% | 7.611 |
| §7 | Kommunal virkir TK | 102.855 | 102.084 | 104.921 | 110.309 | 5,1% | 5.388 |
| | **Rakstur íalt uttan TH** | **1.143.174** | **1.125.365** | **1.183.682** | **1.247.696** | **5,4%** | **64.014** |
| §7 | Kommunal virkir TH | -48.266 | -36.985 | -37.975 | -37.680 | -0,8% | 295 |
| | **Rakstur íalt** | **1.094.908** | **1.088.380** | **1.145.707** | **1.210.016** | **5,6%** | **64.309** |
| | | | | | | | |
| **Aðrar útreiðslur** | | | | | | | |
| 20101 | Stuðul til rentuútreiðslur | 33.650 | 30.000 | 30.000 | 30.000 | 0,0% | 0 |
| 20910 | Aðrar inntøkur | 961 | 2.000 | 2.000 | 2.000 | 0,0% | 0 |
| | **Aðrar útreiðslur íalt** | **34.611** | **32.000** | **32.000** | **32.000** | **0,0%** | **0** |
| | | | | | | | |
| | **Úrslit áðrenn rentur** | **381.818** | **306.301** | **343.749** | **364.184** | **5,9%** | **20.435** |
| | | | | | | | |
| **Rentur** | | | | | | | |
| 20301 | Rentuútreiðslur TK | 11.148 | 10.962 | 8.867 | 8.195 | -7,6% | -672 |
| 20301 | Rentuútreiðslur TH | | 5.037 | 7.250 | 7.808 | 7,7% | 558 |
| 20401 | Rentuinntøkur TK | 0 | 0 | 0 | 0 | 0,0% | 0 |
| 20401 | Rentuinntøkur TH | | 0 | 0 | 0 | 0,0% | |
| | **Rentur íalt** | **11.148** | **15.999** | **16.117** | **16.003** | **-0,7%** | **-114** |
| | | | | | | | |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **370.670** | **290.303** | **327.632** | **348.181** | **6,3%** | **20.549** |
| | | | | | | | |
| | | | | | | | |
| | **Avdráttir TK** | **15.900** | **22.733** | **20.003** | **20.219** | 1,1% | 216 |
| | **Avdráttir TH** | **14.484** | **15.874** | **15.873** | **20.672** | 30,2% | 4.799 |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **340.286** | **251.696** | **291.756** | **307.290** | **5,3%** | **15.533** |
| | | | | | | | |
| | **Avlop til skattafíggjaðar íløgur hjá TK*** | **306.504** | **235.622** | **276.904** | **298.090** | **7,7%** | **21.185** |
| | | | | | | | |

Í uppskotinum til fíggjarætlan 2027 er roknað við, at kommunuskattaprosentið er 19,00% og barnafrádrátturin er 9.000 kr., ið er tað sama sum í dag. Høvuðstølini í talvuni eru býtt á kommunugreinar.

Niðanfyri er greitt nærri frá grundarlagnum og fortreytunum fyri dagførdu framrokningunum.

**Inntøkumeting**
Inntøkumetingin er gjørd av nýggjum í september, men hetta hevur ikki broytt metingina frá fyrr í ár.

*Kommunuskattur*
Við støði í teimum upplýsingum og ta vitan, sum var tøk í september 2026, verður kommunuskatturin mettur at hækka 5,3 % frá 2026 til 2027. Kommunuskatturin hækkar sostatt úr 1.158.566 t.kr. í FÆ-2026 upp í 1.220.000 t.kr. í hesum uppskotinum.

*Húsaleiguskattur*

Við støði í gongdini í inntøkunum frá húsaleiguskattinum í ár verður mett, at húsaleiguskatturin fer at verða 2 mió. kr. í 2026, sum er tað sama sum í FÆ-2026.

*Felagsskattur*
Mett verður at felagsskatturin í 2027 verður 60 mió. kr. Inntøkurnar frá felagsskattinum hevur sveiggja frá ári til ár, í FÆ26 var mett at felagsskatturin var 58 mió. kr.

*Skattur av eftirlønargjøldum*
Skatturin av eftirlønargjøldum er mett at hækka úr 265.000 t.kr. upp í 285.000 t.kr., sum er ein hækking á 7,5 %.

*Veiðugjald*
Kommunurnar fingu fyri fyrstu ferð part av veiðugjaldinum í 2025. Mett verður, at Tórshavnar kommuna aftur í ár fer at fáa á leið somu upphædd, sum í 2025 og 2026, t.e. 800 t. kr. í veiðugjaldi.

*Tøkugjald*
Kommunurnar fingu fyri fyrstu ferð part av tøkugjaldinum í 2025. Mett verður, at Tórshavnar kommuna aftur í ár fer at fáa á leið somu upphædd, sum í 2025 og 2026, t.e. 200 t. kr. í tøkugjaldi.

*DIS, FAS og frádráttir*
Inntøkurnar á hesi kontuni verða mettar at verða tær somu, sum mett var í 2026, t.e. 34.000 t.kr.

*Samlaðu inntøkurnar*
Samanlagt hækka inntøkurnar hjá Tórshavnar kommunu 5,6% í hesum uppskotinum samanborið við FÆ-2026.

**Rakstrarútreiðlsur**
Vanliga mannagongdin í uppskotinum til fíggjarætlan er, at samlaði vøksturin í rakstrarútreiðslunum skal liggja innanfyri karmin av metta vøkstrinum av samlaðu inntøkunum. Hetta merkir, at í hesum uppskotinum eigur vøksturin í samlaðu rakstrarútreiðslunum í mesta lagi at vera 5,6%.

í hesum uppskotinum til fíggjarætlan 2027 er samlaði vøksturin í rakstrarútreiðslunum 5,6%.

Munandi partur av samlaðu rakstrarútreiðslunum eru lønarútreiðslur. Samlaði lønarvøksturin var stórur frá 2026 til 2027. Hetta er fyrst og fremst orsakað av stórum vøkstri í sáttmálalønunum á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Flestu sáttmálarnir við tey stóru føroysku fakfeløgini ganga út í 2026, tá skulu nýggir sáttmálar gerast.

Niðanfyri er í stuttum greitt frá broytingunum í rakstrinum á ymsu greinunum í fíggjarætlanini 2027.

**§ 1 Kommunal fyrisiting:**
Á grein 1 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2027 við 6,8%, svarandi til góðar 7,7 mió. kr. Broytingin er í høvuðsheitum broytingar í sáttmálalønum, men eisini dýrkandi útreiðslur til kunningartøkni og KT-trygdarskipanir.

**§ 2 Almanna- og heilsumál:**
Á grein 2 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2027 við 5,3%, svarandi til 19,7 mió. kr. Eldraøkið er framskrivað við sama virksemi sum í dag og bert lønarhækkanir og samtyktar virksemisbroytingar eru lagdar afturat.

Sosiala deild er tillagað. Virknisfremjandi tiltøk eru sett í verk, so deildin brúkar minni av uttanhýsis fyriskipanum, sæst hetta aftur í fíggjarætlanini fyri 2027, ið bert hevur ein lítlan vøkstur. Framskrivingin er við sama virksemi sum í dag, men sambært kunngerð er vistarhald til forsturforeldur hækkað við 625 túsund kr.

**§ 3 Børn og ung:**
Á grein 3 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2027 við 5,0%, Á hesi greinini er tað serliga barnatalið, sum stýrir játtanini. Nógv størsti parturin av hækkingini er lønir, sum hækka við 9.450 mió. kr. Ein annar partur, ið ávirkar, er at vøggustovugjaldið hækkar bert 1 %, svarandi til 169 kr. fyri hvørt barn í vøggustovu. Somuleiðis er starvsaldurin fyri námsfrøðingar hækkaður eitt lønarstig.

**§ 4 Undirvísing:**
Á grein 4 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2027 við 9,5%. Á hesi greinini er tað talið av børnum og ungum í fólkaskúlunum, sum stýra játtanini. Munandi partur av vøkstrinum í rakstrarútreiðslunum fara til Skúlan á Trøðni til heildagstilboðið.

Aftrat hesum eru tað serliga tvey økir, sum gera, at raksturin á skúlunum hækkar. Allir skúlaskrivarar eru umflokkaðir, haraftrat er KT útbúnaður vorðin munandi dýrari og gjald fyri KT trygd. Eisini er sáttmálin við Nám fyri undirvísingartilfar dagførdur.

**§ 5: Mentan og frítíð:**
Á grein 5 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2027 við 4,8%. Á Musikkskúlanum hækkar raksturin góðar 700 tús. kr., sum er afturberingin til landið vegna økt tímatal.

Inntøkugrundarlagið hjá Ítróttarannlegg er nærum burtur. Tað eru tvinnar orsøkir til tað. Onnur er, at býráðið hevur samtykt at eingi tiltøk skulu verða í hallinum og hin, at øll ítróttarfeløg í Tórshavnar kommunu skulu fáa ókeypis hallartímar. Samlað ávirkar hetta raksturin við áleið 1,5 mió. kr.

Fyri flestu stovnarnar er sama virksemi framskrivað.

**§ 6: Teknisk mál:**
Á grein 6 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2026 við 4,4%, svarandi til uml. 7,6 mió. kr. Har av eru uml. 3,5 mió. kr. vegna øktar lønir.

Viðmerkjast skal, at moldgoymslurnar, sum áður hava verið undir konto 7110 Renovatión nú eru komin undir grein 6.

Í 2027 eru tað serliga og stóru útstykkingarnar í Argjahaganum og í Hoyvíkshaganum, sum hava virksemisbroytingar við sær. Í 2026 blivu virksemisbroytingarnar frá Havnarvegnum við íbindingum og Húsareynstunlinum býttar í 2 til 4, soleiðis at summar av hesum virksemisbroytingunum koma inn í 2027 eisini, og aðrar koma inn í 2027-2029.

Hetta merkir øktar viðlíkahaldskostnaðir fyri kommununa. Útrokningar vísa, at um allir hesir viðlíkahaldskostnaðir til m.a. vatnveiting, kloakkir, vegir, reinhald, asfalt, kavarudding og gøtuljós vórðu innførdir í einum, hevði tað kosta 9,9 mió. kr. Í staðin verður hesin viðlíkahaldskostnaður innførdur so líðandi, soleiðis at kostnaðurin fyri 2026 var 3,6 mió. kr. og fyri 2027 verður hetta uml. 3 mió kr.

Útreiðslurnar til røkt av bygningum eru í 2019-2026 øktar 36%. Tó hava lønarvøkstur og øktir tilfarskostnaðir merkt, at neyðugt er við 16% aftrat í øktari játtan, um støði frá 2020 skal haldast. Hetta kann ikki koma undir virksemisbroyting, men ynski verður sett fram um, at játtanin kann økjast tilsvarandi, møguliga yvir eitt 2 ára skeið.

Útreiðslur til Fríðkan og viðlíkahald og røkt av kirkjugørðum økjast við 7,4%, svarandi til 1,4 mió kr., men tað er íroknað, at raksturin av moldplássunum í kommununi fer inn undir hetta økið frá grein 7. Um henda flyting ikki verður roknað við, er talan um eina netto øking á undir 4%.

**§ 7: Kommunal virkir:**
Á grein 7 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2027 við 5,1%, svarandi til uml. 5,4 mió. kr., tá er Tórshavnar havn ikki við.

Mett verður, at netto rakstrarinntøkurnar hjá Tórshavnar kommunu frá Tórshavnar havn fara at verða umleið 0,3 mió kr. hægri í 2027 enn tær vóru í 2026, svarandi til 0,8%. Væntað netto úrslit er 37,7 mió kr.

Kommunala brennistøðin fer at kosta Tórshavnar kommunu 4,6% meira í rakstri í 2027 enn í 2026. Hetta er mest vegna lønarhækkingar og at nýggjur sáttmáli um ruskinnheintan kemur í gildið í oktober 2026. Hetta er eisini íroknað, at raksturin av moldplássunum er farin undir grein 6.

Brandstøðin fer at kosta 10,6% meira í rakstri í 2027 enn í 2026. Hetta yvirskipað vegna øktar útreiðslur til leigu av nýggjum sløkkibili, og vegna øktan kostnað til tilfar og útgerð.

Bussleiðin fer at kosta 3,3% meira í 2027 enn 2026, og er hetta mest vegna útreiðslur í samband við indeksregulering av sáttmálanum við veitaran.

**Skattafíggjaðar íløgur**
Í hesum uppskotinum eru góðar 298 mió. kr. eftir til skattafíggjaðar íløgur. Tórshavnar kommuna byggir nýtt Røktarheim á Stórubrekku, tí fer størsti parturin av íløguætlanini komandi ár til almanna og heilsumál. Íløgur verða somuleiðis gjørdar í børn og ung, undirvísing og mentan. Peningur verður settur av til Oyggjaleikir 2027. Innan tekniska øki verða størstu íløgurnar m.a. gjørdar í átøk innan orku og umhvørvið, kloakk og spillivatnsætlan, og renovatión.

**Tilmæli:**
Sambært kommunustýrislógini skal fíggjarnevndin leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið innan 1. oktober.

Býráðið skal viðgera uppskotið til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili.

Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember. Stjórnin mælir fíggjarnevndini til at leggja fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið.

**Fíggjarnevndin 09. september 2026:** Framlagt.

**Býráðsfundur 17. september 2026:** Framlagt.

# 265/26 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.02.2026 | 48/26 | 26/00100-1 |
| 2 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 67/26 | 26/00100-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.03.2026 | 73/26 | 26/00100-1 |
| 4 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 96/26 | 26/00100-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 22.04.2026 | 99/26 | 26/00100-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 29.04.2026 | 107/26 | 26/00100-1 |
| 7 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 136/26 | 26/00100-1 |
| 8 Býráðsfundur | 05.05.2026 | 169/26 | 26/00100-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 13.05.2026 | 128/26 | 26/00100-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 27.05.2026 | 134/26 | 26/00100-1 |
| 11 Býráðsfundur | 04.06.2026 | 198/26 | 26/00100-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 10.06.2026 | 154/26 | 26/00100-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 18.06.2026 | 163/26 | 26/00100-1 |
| 14 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 238/26 | 26/00100-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 09.09.2026 | 190/26 | 26/00100-1 |
| 16 Býráðsfundur | 17.09.2026 | 265/26 | 26/00100-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Framlagt.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2026:** Framlagt.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagt frá á fundinum.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2026:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 29. apríl 2026:** Framlagt.

Tróndur Sigurðsson var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Útsett.

**Býráðsfundur 05. mai 2026:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 13. mai 2026:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 27. mai 2026:** Framlagt.

**Býráðsfundur 04. juni 2026:** Framlagt og góðkent.

**Fíggjarnevndin 10. juni 2026:** Útsett.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mai verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 18. juni 2026:** Framlagt.

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri juni og juli verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 09. september 2026:** Framlagt.

**Býráðsfundur 17. september 2026:** Framlagt og góðkent.

# 266/26 Fjallasúkklubreyt til Oyggjaleikir 2027

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 05.11.2025 | 121/25 | 25/09594-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.11.2025 | 211/25 | 25/09594-2 |
| 3 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 300/25 | 25/09594-2 |
| 4 Mentamálanevndin | 11.02.2026 | 29/26 | 25/09594-2 |
| 5 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 47/26 | 25/09594-2 |
| 6 Býráðsfundur | 17.09.2026 | 266/26 | 25/09594-2 |
| 7 Mentamálanevndin | 08.09.2026 | 102/26 | 25/09594-2 |
| 8 Mentamálanevndin | 30.09.2026 | 112/26 | 25/09594-2 |

**Upprunin til málið**
Umbøn frá Sersambandinum fyri Súkkling og Triathlon (SST), at byggja eina altjóða góðkenda fjallasúkklubreyt í Flatnahaga/vesturvarða, í sambandi við Oyl 2027.

**Lýsing av málinum**
Tann 21.10.2025 var SST á fundi við TK viðv. nýggja fjallasúkklubreyt. Umframt at fjallasúkklubreyt er týdningarmikið fyri Oyl 2027, so hevur slík breyt, sbrt. SST, eisini **stóran trivnaðar- og samfelagsligan týdning:**

1. Skúlar kundu brúkt hana sum eitt náttúrligt og trygt læruumhvørvi fyri børn og ung at lært at handfara súkklu.
2. Hon hevði kunnað styrkt **súkklutrygdina**, við at børn og ung læra at súkkla undir tryggum og skipaðum umstøðum – vekk frá ferðsluni og vekk frá gongubreytum.
3. Breytin hevði gjørt tað møguligt hjá bæði børnum og vaksnum at spæla, venja og læra súkkling í einum umhvørvi, sum er bæði sunt og fjølbroytt.

Samlaði kostnaðurin fyri alla verkætlanina er 9.459.901 kr uttan MVG. Hetta er við projektering, ráðgeving frá Kanadiskum serfrøðingi, útinning og 10% í óvæntaðum.

SST hevur boðað TK frá, at tey hava fingið 500.000 kr. í stuðli frá føroyskari fyritøku til fjallasúkklubreytina. SST boðar frá, at partur av hesari upphæddini skal brúkast til projektering.
Harumframt hevur SST køn fólk, sum fara at søkja út útlendskum fondum. Fleiri freistir eru um árskiftið 2025/26. Í samband við hetta arbeiðið krevst ein tilsøgn um fíggjarligan stuðul frá TK. SST leggur upp til eina tilsøgn á 3,5 mió kr. fram til 2027.

Vísandi til skjal 25/09594-1 SST leggur upp til fylgjandi leist:

Stig 1) Projektera og gera part av fjallasúkklubreytini oyggjaleikaklára. Kostnaður 4 mió kr. TK gevur eina tilsøgn á 3,5 mió kr. fram til 2027
Stig 2) Gera eitt felagshús við startmálið á við gomlu ríðingabreytini á Marknagilið. Kostnaðurin er mettur at verða 2 mió kr.
Stig 3) Gera restina av verkætlanini klára.

Í oyggjaleikahøpi brúkar man hugtakið “Legacy of the game”. Tvs. hvat liggur eftir í samfelagnum eftir einar oyggjaleikir. Innan oyggjaleikirnar í 1989, høvdu Føroyar onga rennibreyt, og tí íðkaðu vit ikki frælsan ítrótt, sum vit síggja í dag. SST ynskir at ein altjóða fjallasúkklubreyt verður “Legacy of the games” í 2027.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
**15/03842 (Umsókn um lendi til fjallasúkklurás)**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamáleiðarin mæla til at geva SST eina tilsøgn upp á samanlagt kr. 2.000.000 kr. komandi ár, treytað av, at upphæddin verður sett av á fíggjarætlanini 2026.

**Mentamálanevndin 05. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, um tilsøgnina á 2.000.000 og beina málið í fíggjarnevndina.

Mentamálanevndin setur sum treyt at ein nýggj staðseting verður funnin, um ikki verandi uppskot kann tillagast, soleiðis at nevndin kann taka undir við staðsetingini. Partar, sum hava virksemi í økinum skulu hoyrast og atlit má takast til ávirkanina í náttúruni.

At leggja fyri mentamálanevndina aftur.

**Fíggjarnevndin 19. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti 4. desember 2025**
Sbrt. mál 25/09786 (Eykajáttan av meirinntøkum 2025) eru 2.000.000 kr. settar av til nýggja fjallasúkklubreyt.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til:

- At geva Sersambandinum fyri Súkkling og Triathlon (SST) tilsøgn upp á kr. 2.000.000 í 2025 til nýggja fjallasúkklubreyt. Upphæddin verður játtað av 5370 Stuðul til íløgur.
- Stuðulin og tilsøgnin er treytað av, at øll neyðug loyvi eru fingin til vega.
- At beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Borgarstjórin legði fram broytingaruppskot um at taka undir við tilmælinum um at geva tilsøgn um stuðul kr. 2 mió av 5370 og at uppskot um staðseting av súkklubreyt verður lagt aftur fyri mentamálanevndina til góðkenningar.

Atkvøtt varð fyri broytingaruppskotinum, ið varð samtykt við tólv atkvøðum fyri og einari blankari atkvøðu.
.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, Rúni Reginsson Hammer og Annfinn Brekkstein

Atkvøddu blankt: Kári Johansen

**Ískoyti:**
TK hevur skipað fyri tveimum fundum við viðkomandi partar í rossaumhvørvinum í Havnardali og við Oyggjarvegin, og súkklusambandið (SST).

Endamálið við fyrsta fundinum var, at SST og rossafólkini kundu greiða frá sínum sjónarmiðum við møguligari fjallasúkklubreyt í Flatnahaga/frá Vesturvarða.

SST vísir á, at økið er ideelt til fjallasúkkling, bæði tí at lendið er gott, og tí tað liggur stutt frá vesturbýnum. Stutta frástøðan ger, at t.d. børn hava nemmari koma til breytina. Samstundis vísur SST á, at tey hava longu brúkt pengar

og orku upp á økið, og at kommunan hevur sjálv víst á økir í Flatnahaga, herundir eisini partvís við Vesturvarða. Hetta sær man í málsgongdini í mál 15/03842 (Umsókn um lendi til fjallasúkklurás).

Rossafólkini greiddu frá hvat ross er fyri eitt djór, og at tað kann verða farligt, at ross og fjallasúkklur eru ov tætt saman. Tað má verða ein ávís fjarstøða, so vandastøða ikki tekur seg upp. Og her metta tey, at uppskotið um fjallasúkklubreyt kom ov tætt við teirra virksemi, sum tey eisini hava brúkt brúkt pengar og orku upp á. Avtalað var, at SST ger eitt tillagað uppskot, har einans stutta oyggjaleikabreytin er.

Á næsta fundinum, tann 7. Januar 2026, leggur SST eitt tillagað uppskot fram. Her er talan um tað stuttu oyggjaleikabreytina. Tað tættasta breytin kemur at verandi grúsgøtum er 30m. Tó eru tvey íbindingarpunkt til breytina, eitt við "undir Fjalli" og eitt undir gamla startmálinum við gomlu ríðingarbreytina.

SST boðar frá, at tey hava longu brúkt ½ mió upp á hesa verkætlanina, og um breytin verður flutt, so dýrkar verkætlanin og verður samstundis seinkað.

Rossafólkini boða frá, at økt virksemi við einari fjallasúkklubreyt ger, at fleiri súkklur koma til økið, áðrenn tey skulu inn á fjallasúkklubreytina. Tey vísa á, at á sumri fara áleið 100 ross eftir grúsgøtuni kring fjallasúkklubreytina um dagin, og spyrja um hvør hevur ábyrgdina um nakað hendir. Rossini í Havn blivu í sínari tíð flutt í Havnardal, so tað m.a. ikki skuldi uppstanda óhepnar støður. Rossafólkini boðaðu frá, at teirra fyrsti prioritetur og tilráðing er, at fjallasúkklubreytin verður staðsett aðrastaðni, í t.d. Húsahaga ella á økinum við "Dynamithúsið/vatnbrunnin.

Á fundinum bleiv kjakast um hvussu man kann skelta seg til, at økið verður betri skipað. Støðan í dag er, at ongin skelting er við grúsgøtuna, og tí brúka bæði hestar, gongufólk, súkklur og prutl gøtuna. Sbrt. rossafólkunum, hevði ein gøta undir Skotabrúnni og inn Havnardal hjálpt báðum ríðingafeløgunum, tó ikki Berghestum.

Eisini var kjakast um, at um Oyggjaleikabreytin skal víðkast til eina størri breyt í framtíðini, sbrt. upprunatekningini, so ynskja rossafeløgini trygd fyri, at hetta ikki hendir. Støðan hjá SST er, at størra fjallasúkklubreytin nýtist ikki at verða á sama stað sum oyggjaleikabreytin.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at samtykkja uppskotið um Oyggjaleikabreyt.

**Mentamálanevndin 11. februar 2026:** Ein meiriluti, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Heðin Mortensen og Bergur Robert Dam Jensen, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Høgni Vilhelmsen, tekur ikki undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein krevur málið fyri býráðið.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Annfinn Brekkstein legði fram broytingaruppskot um at finna aðra staðseting

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið fall við fimm atkvøðum fyri, átta atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen, Høgni Vilhelmsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Blankt atkvøddi: Eingin.

Síðani varð atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í mentamálanevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Borgarstjórin ynskir, at málið verður viðgjørt av nýggjum.

Samstundis skulu møguleikarnir fyri aðrari staðseting kannast, har pláss er bæði fyri tí styttru og tí longru súkklubreytini, í sama øki.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at viðgera málið og gera eina samtykt á fundinum.

**Mentamálanevndin 08. september 2026:** Útsett.

**Ískoyti:**
Tróndur Sigurðsson biður um at fáa málið fyri býráðið aftur á komandi fundi, til umrøðu og støðutakan.

**Býráðsfundur 17. september 2026:** Heidi Lava Elgeirsdóttir skeyt upp at atkvøða um at uppskot um at beina málið aftur í umsiting, og síðani nevnd og býráð, skal til atkvøðugreiðslu.

Fyri atkvøddu seks býráðslimir, ímóti atkvøddu seks býráðslimir og ein atkvøddi blankt. Uppskotið um at atkvøða í málinum fall sostatt.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkøddu: Bergur Robert Dam Jensen, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddi: Heðin Mortensen

Tróndur Sigurðsson bað um at fáa viðmerkt til gerðabókina, at hann hevur í hyggju at kæra um, at býráðið valdi at taka málið upp til atkvøðugreiðslu, tá ið hann hevði tikið sína umbøn um støðutakan aftur.

# 267/26 Umsókn um leingjan av leigusáttmálanum matr. nr. 970n, Álakeri 20, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 17.02.2026 | 6/26 | 25/09934-3 |
| 2 Havnanevndin | 10.03.2026 | 14/26 | 25/09934-3 |
| 3 Havnanevndin | 16.03.2026 | 23/26 | 25/09934-3 |
| 4 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 137/26 | 25/09934-3 |
| 5 Býráðsfundur | 05.05.2026 | 170/26 | 25/09934-3 |
| 6 Havnanevndin | 09.06.2026 | 30/26 | 25/09934-3 |
| 7 Býráðsfundur | 17.09.2026 | 267/26 | 25/09934-3 |

**Upprunin til málið**
Umsókn frá P/F Mariebase og P/F Bátatænastuni d.f. 3.november 2025.

**Lýsing av málinum**
P/F Mariebase leigar eitt grundøki matr. 970n í Álakeri frá Tórshavnar havn. Á grundøkinum stendur bygningur, sum P/F Bátatænastan nýtir til bátaverkstað og handil, ið selur ymiska útgerð til báta útgerð. Harumframt verður ein partur av bygninginum leigaður út til málingahandil, og loftið verður leigað út til skrivstovu hja bilútleigufyritøku.

P/F Mariebase og P/F Bátatænastan søkja í skrivi d.f. 3.november 2025 um at leingja leigusáttmálan. Orsøkin er, at P/F Bátatænastan ætlar at keypa allan partapeningin í P/F Marine Base, sum framhaldandi skal standa sum leigari í leigusáttmálanum.
Núverandi eigarar í P/F MarineBase eru P/F Bátatænastan, ið eigur 1/3, meðan Ruth Holding Aps eigur 2/3.

Peningastovnur hvur játtað teimum fígging, tó treytað av, at leigusáttmálin við Tórshavnar havn verður longdur. Umsøkjarin søkir um at longja sáttmálan í 25 ár.

Formliga er tað P/F Marine Base, sum er leigari, og soleiðis avtaluparturin hjá Tórshavnar Havn, og hava sostatt broytingar í partaeigaraskarðanum einki við leigusáttmálan ella Tórshavnar Havn at gera.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Leigumálið kom í gildi 23. oktober 2007 og kann tað ikki, um sáttmálin ikki verður mishildin, sigast upp av eigaranum fyrr enn 25 ár ár eru farin, t.v.s. til 23. oktober 2032. Eftir hetta kann leigumálið sigast upp við 1 ára freist til ein av ásettu gjaldsdøgunum, sum eru 1.januar ella 1.juli.
Tá leigumálið er at enda komið, skal økið latast eigaranum aftur slættað og ruddað fyri alt.
Er virksemið á økinum, tá ið tey 25 árini eru farin, ið lýkur treytirnar í § 3 (handil/skrivstova/verkstað hjá leigaranum, umvæling av smábátum og annað virksemi knýtt at sjóvinnuni), og eigarin ikki ynskir at taka økið til egið brúk (...), hevur leigarin rætt at leingja leigumálið við 10 árum aftrat.
Aftaná at hesi 10 árini eru farin, hevur leigarin fyrsta rætt til at gera nýtt leigumál, um eigarin ikki nýtir rættin at taka økið til egið brúk.
Ynskir eigarin at taka bygningar á økinum til egið brúk, hevur hann rætt til at gerast eigari av hesum fyri 50% av tí metingarvirðinum.

Sostatt er leigumálið óuppsigiligt fram til 1. januar 2034, og um kommunan tá ikki skal nýta økið til annað endamál, kann leigumálið halda áfram til 2044, og síðani kann leigarin gera nýtt leigumál, um kommunan tá ikki skal nýta økið til annað endamál.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
J.Nr. 25/09934-1 : Umsókn um at leingja leigusáttmála
J.Nr. 25/09934-6 : Leigusáttmáli

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Stjórin í Tórshavnar havn mælir frá at ganga umsóknini um at leingja leigumálið við 25 árum á møti, vísandi til, at tað er betri fyri kommununa og Tórshavnar havn at hava møguleikan opnan at taka økið til aðra nýtslu í framtíðini (í 2034), um tørvur skuldi verið á tí.

**Havnanevndin 17. februar 2026:** Útsett til komandi fund.

**Havnanevndin 10. mars 2026:** Útsett til eykafund 16.03.26 í havnanevndini.

**Havnanevndin 16. mars 2026:** Útsett.

Kári Johansen og Birgir Nielsen krevja málið fyri býráðið.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Útsett.

**Býráðsfundur 05. mai 2026:** Atkvøtt varð um at beina málið aftur í nevnd, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fýra atkvøðum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Jón Kragesteen, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

**Havnanevndin 09. juni 2026:**

**Ein meiriluti:** Heðin Mortensen, Kári Johansen, Birgir Nielsen samtykti at leingja leigusáttmálan upp til 15 ár.

**Ein minniluti:** Heidi Elgeirsdóttir tekur ikki undir við málinum av tí at samráðingar eru við Landsstýrið um Landssjúkrahúsið og útbygging av lestraríbúðum og málið er sostatt ikki búgvið at taka støðu til.

**Ein minniluti:** Kristianna Winther Poulsen tekur støðu á seinni fundi.

**Ískoyti:**
Kári Johansen krevur, at málið verður sett á skrá til atkvøðugreiðslu á fyrst komandi býráðsfundi, ella á fyrst komandi eykabýráðsfundi.

**Býráðsfundur 17. september 2026:** Borgarstjórin skeyt upp at atkvøða um at uppskot um at leingja sáttmálan skal til atkvøðugreiðslu.

Uppskotið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og einari ímóti.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein

Ímóti atkvøddi:Guttormur í Skála.

Síðani varð atkvøtt um at leingja leigusáttmálan matr. 970n, Álakeri 20.

Uppskotið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, seks atkvøðum ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen, Annfinn Brekkstein, Heðin Mortensen og Bergur Robert Dam Jensen.

Ímóti adkvøddu: Elsa Berg, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

# 268/26 Eldradepil í Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Heilsu- og eldranevndin | 05.06.2025 | 16/25 | 25/06061-1 |
| 2 Heilsu- og eldranevndin | 04.09.2025 | 18/25 | 25/06061-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 10.09.2025 | 134/25 | 25/06061-1 |
| 4 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 187/25 | 25/06061-1 |
| 5 Kollafjarðarnevndin | 24.09.2025 | 14/25 | 25/06061-1 |
| 6 Býráðsfundur | 18.06.2026 | 239/26 | 25/06061-1 |
| 7 Býráðsfundur | 17.09.2026 | 268/26 | 25/06061-1 |
| 8 Kollafjarðarnevndin | | | 25/06061-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

Tekstur og tilmæli kemur áðrenn fundin.

**Heilsu- og eldranevndin 05. juni 2025:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Í september 2017 samtykti býráðið eina útbyggingarætlan fyri eldraøkið í Tórshavnar kommunu. Síðsta tilmælið í útbýggingarætlanini var at gera ein eldradepil í Kollafirði. Hini tilmælini í útbygginargarætlanini eru gjørd ella eru í gerð. Urd og Demensdepilin vóru liðug og lótu upp á sumri í 2021, og nýtt røktarheim við 64 búplássum og 16 røktaríbúðum er í gerð á Stórubrekku í Hoyvík.

Síðan útbyggingarætlanin bleiv samtykt hevur Heilsu- og umsorganartænastan miðvíst arbeitt við ymsum átøkum, sum stuðla undir, at fólk á eldraøkinum klára seg betur sjálvi og hetta sæst aftur í bíðilistunum. Serliga sæst broyting í bíðilistunum, eftir at Urd og demensdepilin lótu upp á sumri í 2021. Hóast fólkatalið er javnt vaksandi, hevur biðilistin til búpláss verið rættiliga stabilur í nøkur ár. Nú er bíðilistin spakuliga byrjaður at vaksa aftur, tó ikki til sama stig, sum áðrenn 2021.

Væntandi kemur bíðilistin til búpláss aftur á stigið frá 2022, tá nýggja røktarheimið á Stórubrekku letur upp.

Síðsta tilmæli í útbyggingarætlanini er at gera eldradepil í Kollafirði.

Í virkisætlanini stendur soleiðis í tilmælinum um eldradepil í Kollafirði:

*5. Eldradepil í Kollafirði 2024-2025*
*Mælt verður til:*
*- At bygdur verður eldradepil við umleið 24-30 plássum. Blandað røktarbúpláss, stutttíðarpláss og røktaríbúðir saman við dagtilhaldi og venjingarumstøðum. Við atliti at tørvinum á størri røktarbygging í høvuðsstaðarøkinum, verður mett, at eldradepilin í Kollafirði verður raðfestur at taka í nýtslu um 7-8 ár.*
*- At heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at ávísa hóskandi grundøki til at byggja á.*

Verðandi umstøður á Sambýlinum í Kollafirði eru als ikki nøktandi. Kømrini eru smá og hava ikki egi wc. Arbeiðsumstøðurnar hjá starvsfólkunum eru ikki nøktandi, og umstøðurnar eru soleiðis, at ikki ber til at hava fólk við stórum røktartørvi ella demenssjúku búgvandi á sambýlinum. Hetta ger, at tað til tíðir eru tøk pláss, tí tey sum hava tørv á plássunum ikki rúmast á sambýlinum, men mugu flyta til Havnar í hóskandi umstøður á heimum, sum eru gjørd til tørvin.

| Ár | 2000 | 2005 | 2010 | 2015 | 2020 | 2025 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fólkatal í alt | 1.188 | 3.278 | 3.249 | 3.196 | 3.293 | 3.304 |
| Fólkatal 67+ | 99 | 110 | 138 | 169 | 179 | 197 |
| Fólkatal 80+ | 27 | 32 | 38 | 53 | 47 | 59 |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| - Kollafjørður | | | | | | |
| - Oyrareingir | | | | | | |
| - Signabøur | | | | | | |
| - Kaldbak | | | | | | |
| - Kaldbaksbotnur | | | | | | |
| - Mjørkadalur | | | | | | |
| - Sund | | | | | | |
| - Norðradalur | | | | | | |
| - Syðradalur, Streymoy | | | | | | |

Talvan omanfyri vísir samlaðu gongdina í fólkatalinum í nevndu bygdum frá 2000 til 2025. Runt roknað kann man siga, at talið av fólki ávíkavist 67+ og 80+ er dupult so stórt í 2025, sum tað var í 2000.

Til ber ikki at fáa framroknaði tøl frá hagstovunum um nevndu økir. Tó vita vit, at talið av eldri borgarum fer at vaksa fleiri ár afturat.

Í løtuni (juli 2025) búgva 10 borgarar á røktarheimi í Tórshavn, sum áðrenn tey fluttu inn, høvdu bústað í Kollafirði. Tað búgva í løtuni 6 fólk á sambýlinum í Kollafirði. Tað vil siga í løtuni búgva 16 fólk úr Kollafirði á búplássum í kommununi.

Við hesum í huga og at talið av eldri fer at vaksa í framtíðini er tað hóskandi, at ein eldradepil í Kollafirðið rúmar eini 24 búfólkum við blandaðum tørvi. Tað verið seg tørvur á lættari røkt (sambýli) tyngri røkt (røktarheim) og demenssjúkum (demensdeild). Eisini er hugsa, at umlætting kann rúmast á teimum 26 plássunum. Umráðandi er, at eldradepilin í Kollafirðið kann vera fleksibul við atliti at tørvinum hjá borgarunum.

Ein loysn kann vera at skipa eldradepilin við tveimum deildum við 11 búfólkum og tveimum atknýttum í røktaríbúðum pr. deild. Soleiðis, at samlaða talið verður 26 pláss til tann blandaða tørvin. Hetta eigur tó at vera lýst nærri í einari neyvari tørvslýsing, so atlit eisini verður tikið til framtíðar rakstur av eldradeplinum.

**Frontaldemens deild á eldradeplinum í Kollafirði.**
Í Tórshavnar kommunu er stórur tøvur á at skipa frontaldemesøkið. Arbeiðið við at menna fakligt tilboð til fólk við frontaldemens er í gongd, men tað er trupult at veita hetta tilboð á vanligum demensdeildum, tí tørvurin á hjálp, røkt, vegleiðing osv. hjá fólki við frontaldemens er ikki tann sami, sum tørvurin hjá fólki við øðrum demenssjúkum. At fólk við frontaldemenssjúku búgva millum við øðrum demenssjúkum skapar stórar avbjóðingar á deildunum. At hesi búgva á somu deildum er ikki nøktandi tilboð fyri hvørgan partin. Tað er sera trupult hjá starvsfólkunum at tryggja eina góða røkt til allar borgarar, tá fólk við frontaldemens og fólk við øðrum demenssjúkum er saman á røktarheimum.

Tørvur er á at skipa eitt samlað frontaldemenstilboð í Tórshavnar kommunu, bæði viðvíkjandi hølisviðurskiftum og fakligaheit. Hetta kundi møguliga verið gjørt í samstarvi við aðrar kommunur.

Frontaldemens er sergrein innan demensøkið, og tí er umráðandi, at servitanin verður savnað á einum stað fyri at tryggja borgaranum allar bestu røktina í sínari demenssjúku.

Í dag hava vit ikki umstøður at skipa eitt samlasamlað tilboð til borgarar við frontaldemens á einum stað.

Ein møguleiki kundi verið at skipa eina frontaldemensdeild í samband við byggingina av eldradeplinum í Kollafirði.

Ein frontaldemensdeild eigur at hava gott pláss soleiðis, at møguleiki er at skerma hvønn einkultan borgara, bæði fyri at verja viðkomandi og fyri at verja hini, sum eru á deildini. Eisini skal vera møguleiki hjá borgaranum at fara útum,uttan at vera til vanda fyri seg sjálvan ella onnur. Tvs. at ein góður garður eigur at vera uttanum.

Frontaldemensdeildin eigur at hava pláss fyri 6 borgarum. Um man ynskir at kunna bjóða tænastuna til aðarar kommunur í Føroyum, so kundi talan verið um 8 pláss. Ábendinagar eru um, at áhugi er fyri hesum uttanfyri Tórshavnar kommunu. Hetta skal tó kannast nærri og skipast í fasta legu. Tó ber til eftir lógini um heimatænasu, eldrarøkt v.m at bjóða tænastur út til onnur samstørv.

Samlað svarar tað til ein eldradepil, sum hevur búpláss til 32 fólk. (34 fólk) Umlætting og búpláss verður skipað eftir galdandi tørvinum til eina og hvørja tíð.

Umframt blandað pláss fyri 32 fólkum, (34), skal eldradepilin hava rúm fyri dagtilhaldi til 30 fólk og venjingarhølir til bæði heimabúgvandi og búfólk. Felagskøkur má vera í húsinum, sum ger mat til búfólk og fólk á dagtilhaldinum. Eisini eiga hølir at vera gjørd til heimatænastuna evt. sum sjúkrarøktarfrøðingaklinikk. Umframt hetta so mugu vera øll vanlig arbeiðsrúm, skrivstovur, samrøðurúm og fundarhøli. Kølirúm eigur at vera í húsinum. Hugsast má um uttanum øki har tað skulu vera góðir møguleika at fara útum, og tað er serliga umráðandi, at uttanum øki á frontaldemseindini er skipað soleiðis, at borgarin fær góðan møguleika at røra seg.

Hóast bíðilistarnir til búpláss ikki eru á sama stigi, sum tá virksemisætlanin bleiv samtykt, so er ongin ivi um, at Sambýlið í Kollafirðið ikki longur er tíðarhóskandi og kann ikki halda fram at vera sambýli. Um ein frontaldemenseind kann rúmast í projektinum, verður hetta eitt nýbrot innan eldraøkið og ein stórur bati fyri tænastuna og tilboðini á eldraøkinum í Tórshavnar kommunu

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorgarnarstjórin og leiðarin á heilsu- og umsorganardeildini mæla til, at valda staðseting verður endaliga fingin uppá pláss. Haraftrat at seta bygginevnd til eldradepilin í Kollafirði, at heimila fyrisitingini at fara undir at gera byggiskrá, og til tað endamálið at játta kr. 1 mio av L27013 Eldradepil í Kollafirði til LK 27013 Eldradepil í Kollafirði.

At leggja málið fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina

**Heilsu- og eldranevndin 04. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 10. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum.

Somuleiðis einmælt samtykt at velja hesi í bygginevndina fyri verkætlanina: Kristianna Winther Poulsen og Birgir Nielsen.

**Kollafjarðarnevndin 24. september 2025:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Bergur Robert Dam Jensen biður um at fáa málið á skrá til komandi býráðsfund.

**Býráðsfundur 18. juni 2026:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 17. september 2026:** Bergur Robert Dam Jensen bað um at fáa uppskot til atkvøðugreiðslu um at broyta staðsetingina av eldradeplinum frá Todnesi til Norðreki skal til atkvøðugreiðslu.

Uppskotið varð samtykt við níggju atkvøðum fyri og fýra ímóti.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmse, Birgir Nielsen, Annfinn Brekkstein, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Bergur Robert Dam Jensen og Kristianna Winther Poulsen.

Ímóti atkvøddi: Elsa Berg, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe og Guttormur í Skála.

Síðan varð atkvøtt um uppskot frá Bergi Robert Dam Jensen um at eldradepilin verður fluttur av Todnesi til Norðreki, og at umsitingin kemur við eini heildarætaln fyri Norðreki, har nýggj kirkja, eldradepil og evt eldrabústaðir verða staðsettir, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, seks atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bergur Robert Dam Jensen, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen, Høgni Vilhelmsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála

**FUNDURIN LOKIN KL. 23:00**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Elsa Berg | Heðin Mortensen | Heidi Lava Elgeirsdóttir |
| Annita á Fríðriksmørk | Anja Weyhe | Kristianna Winther Poulsen |
| Bergur Robert Dam Jensen | Guttormur í Skála | Annfinn Brekkstein |
| Tróndur Sigurðsson | Kári Johansen | Høgni Vilhelmsen |
| | Birgir Nielsen | |